| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 522 |
| | Formansins merki: |

# GERĐABÓK

**Dato:** 20. juni 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 132/19-170/19

**FUNDARLEIĐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIĐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Odd Færø

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Barbara Vang
Beinta Dalbø
Marius Muller
Sigurð Vang
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 523 |
| | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 132/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 525 |
| 133/19 | 19/02221-2 | Umsókn frá Faroe Ship um at leingja grundøkis leigusáttmálan undir skrivstovubygninginum á matr.nr 617t á Eystaru bryggju | 527 |
| 134/19 | 19/00107-1 | Bátahylur í Kaldbaksbotni | 529 |
| 135/19 | 19/02426-1 | Áheitan um at flyta valstaðið á Argjum | 532 |
| 136/19 | 19/02126-1 | Samanlegging av rakstarstaðnum 5315 Finsen við 5312 Mentanarhølir í miðbýnum | 534 |
| 137/19 | 17/01053-1 | Integratión, samskipan og átøk | 536 |
| 138/19 | 17/02486-1 | Arbeiðsevni í leiðslubólkum á dagstovnaøkinum | 552 |
| 139/19 | 17/01361-1 | Listaverkstøð í Finsen | 560 |
| 140/19 | 17/01362-1 | Virknishøll í Finsen | 571 |
| 141/19 | 19/00411-1 | Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat | 578 |
| 142/19 | 14/04756-36 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642) | 582 |
| 143/19 | 19/01973-3 | Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn | 592 |
| 144/19 | 19/01612-2 | Gøtunavn til nýggja útstykking á Argjum, matr. nr. 32a og 135a, Argir | 593 |
| 145/19 | 15/04140-3 | Klippfisk - eftirmeting og framtíð | 594 |
| 146/19 | 18/03747-1 | Stovnsetan av listaráði | 598 |
| 147/19 | 18/01726-4 | Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali | 601 |
| 148/19 | 18/04368-1 | Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum 2019 | 605 |
| 149/19 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 610 |
| 150/19 | 18/02331-1 | Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu | 620 |
| 151/19 | 17/02741-1 | Kommunuskúlagarðurin | 631 |
| 152/19 | 18/00535-4 | Umbøn um at rætta marknalinjurnar á økinum matr. nr. 1381l, Tórshavn. | 633 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 153/19 | 18/00982-1 | Skógfriðing | 636 |
| 154/19 | 19/00876-2 | Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 135hg, Bertugøta 11, Hoyvík | 644 |
| 155/19 | 19/01034-1 | Raðfesting av smærri verkætlanum í bygdunum | 646 |
| 156/19 | 14/02605-15 | Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur | 649 |
| 157/19 | 19/01445-2 | Umsókn um keyp ella brúksrætt til part av matr. nr. 115, Nólsoy | 655 |
| 158/19 | 19/02316-1 | Kommunalar útstykkingar | 657 |
| 159/19 | 18/00808-1 | Vágsbotnur - skipan av økinum | 664 |
| 160/19 | 17/03594-2 | Umsókn um broyting av byggisamtykt til A1 øki í samband við makaskifti millum matr. nr. 157 og matr. nr. 92a, Kollafirði | 666 |
| 161/19 | 18/03782-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini undir Gráasteini, matr. nr. 1116a, Tórshavn | 669 |
| 162/19 | 19/01792-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Kirkjubøur Argir | 674 |
| 163/19 | 19/02464-1 | Áheitan um at fáa kunning um eftirmetingina av nýggju bussleiðini og víðari tilgongdina | 676 |
| 164/19 | 19/02467-2 | Áheitan um at endurskoða vegir, ferðslu og kollektivu ferðslu í Tórshavnar kommunu | 678 |
| 165/19 | 19/01483-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1378, Tórshavn til ummælis | 680 |
| 166/19 | 19/01484-3 | Vinnuøki á Gomlurætt | 683 |
| 167/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 689 |
| 168/19 | 19/00267-2 | Umsókn um keyp av uppískoytisstykki av festinum matr. nr. 3a, Velbastaður | 691 |
| 169/19 | 19/01811-2 | Marknaumskipan millum matr. nr. 216a, 216b og litra, Kollafirði í sambandi við gerð av gongubreyt | 694 |
| 170/19 | 14/01358-154 | Ytri Ringvegur vegføring frá Hjalla til Krákugjógv - atkomuvegur - innkomuvegur (2001-0407) | 696 |

## ***132/19 Mál beind í nevndir 2019***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 80/19 | 19/00098-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 103/19 | 19/00098-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 132/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 133/19 Umsókn frá Faroe Ship um at leingja grundøkis leigusáttmálan undir skrivstovubygninginum á matr.nr 617t á Eystaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.06.2019 | 35/19 | 19/02221-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 155/19 | 19/02221-2 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 133/19 | 19/02221-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá Faroe Ship, dagfest 26/4-2019 um at leingja grundøkisleigusáttmálan undir skrivstovubygnginum á Eystaru bryggju fram til 2044

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppruna leigusáttmálin er frá 1934, og er framlongdur í fýra umførum.
Verandi leigusáttmáli gongur út 1. januar 2028.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, og leingja grundøkisleigusáttmálan fram til 1. januar 2044.

| | **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 528 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Vinnunevndin 06. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 134/19 Bátahylur í Kaldbaksbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.01.2019 | 4/19 | 19/00107-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 27.02.2019 | 2/19 | 19/00107-1 |
| 3 Vinnunevndin | 14.05.2019 | 30/19 | 19/00107-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 154/19 | 19/00107-1 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 134/19 | 19/00107-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan úr Kaldbak í 2013, um at gera grótkast um bátaplássini í Kaldbaksbotni, fyri at verja móti vindi, sum kemur tvørtur um fjørðin.
Aftur í 2017 søkja bátaeigarar og Kaldbaksnevndin um, at arbeiðið at bøta um bátahylin í Kaldbaksbotni verður gjørt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað liggja 9 bátar í Kaldbaksbotni. Bátarnir liggja á sjónum alt árið. Tað er sera vindhart í Kaldbaksbotni. Tá vindurin liggur tvørtur um fjørðin, er tað serliga trupult at liggja á plássunum fram við vegnum, tí vindurin trýstir bátarnar inn móti landi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Tað eru ongar ásetingar í Byggisamtyktini í Kaldbaksbotni, sum loyva virksemi fram við sjónum, og tí má byggisamtyktin helst broytast.
Bygging út á sjógv, krevur loyvi frá friðingarnevndini.
Hetta er bygging fram við landsvegi, og krevur tí loyvi frá Landsverk.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í smábátahavnir. Á fíggjarætlanini fyri 2019 er avsett 1,2 mió til smábátahavn í Kaldbaksbotni.
Tá komið verður nakað úr landi við bryggjuna í Kaldbaksbotni, dýpur tað rættiliga skjótt. Hetta merkir, at eitt møguligt grótkast verður nógv dýrari enn tann avsetta upphæddin.

Sum ein alternativ loysn, ber til at útleggja ein 40 m langan flótandi bylgjubrótara, sum í hesum førinum kann verja móti vindvánni tvørtur um fjørðin.
Hóast ein bylgjubrótari verður lagdur út, verður tað framvegis avbjóðandi at liggja í Kaldbaksboti í nógvum vindi.
Tað ber til at leggja umleið 3 bátar fram við bylgjubrótaranum.
Um bátabummar halda móti tí nógva vindinum, ber tað til, ístaðin fyri tey 3 bátaplássini, at leggja bátabummar, so pláss verður fyri umleið 8 bátabummum afturat.

Kostnaðarmeting fyri loysnina við bylgjubrótara er mett til 1,5 mió, tá eru møguligir bátabummar ikki íroknaðir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Loyvi má fáast frá friðingarnevndini.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 530<br><br>Formansins merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Við teirri grundgeving, at býráðið hevur avgjørt at bøta um bátahylin í Kaldbaksbotni, verður mælt til at arbeiða víðari við loysnini at útleggja ein 40 m langan flótandi bylgjubrótara, og at fáa tey neyðugu loyvini, og at beina málið í Kaldbaksnevndina.

**Vinnunevndin 14. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 27. februar 2019:** Nevndin tekur undir við ætlanini um teir persónarnir, sum søktu kommununa um útbygging av bátahylinum, viðmæla ætlanini.

**Ískoyti:**
Øll neyðug loyvir eru fingin.

Mettur kostnaður fyri projektið er kr. 1.545.500

Um peningur verður játtaður, kann arbeiðið setast í verk.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2019 avsett 1,2 mió til smábátahavn í Kaldbaksbotni og 2 mió til smábátahavn í Álakeri.

Hóast írestandi fíggingin upp á (1.545.500 – 1.200.000) kr. 345.000 verður tikin av projektinum fyri smábátahavn í Álakeri, ber tað til at fyrireika útbjóðingina av bátahavn í Álakeri.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at seta arbeiði, at útleggja ein 40 m langan bylgjubrótara í Kaldbaksbotni, í verk.

Arbeiðið verður fíggjað soleiðis:

§ 7 Kommunal virki
Konto 7476 Fyrireiking av bátahyli í Kaldbaksbotni 1.200.000

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konto | 7476 | Smábátahavn | 345.500 |
| | Tilsamans | | 1.545.500 |

**Vinnunevndin 14. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 135/19 Áheitan um at flyta valstaðið á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 183/19 | 19/02426-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 135/19 | 19/02426-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Soleiðis sum umstøðurnar eru á Argjum, er tað sera trupult hjá illa gongdum fólki, og hjá teimum sum sita í koyristólum, at koma til valhølið í róðrarneystinum á Argjum. Brekkan oman til valhølið er ov brøtt til koyristólar og illa gongd fólk, trappan til valhølini er ikki nóg trygg at ganga í.

Veljarar í rullistóli, sleppa ikki inn í valklivarnar, tí teir eri ikki breiðir nokk til rullistólar.

Hesi viðurskifti mugu broytast til næsta val, antin við at bøta um verandi viðurskifti, ella flyta valstaðið í Látrið í skúlanum á Argjahamri.

Neyðugt verður at keypa nýggjar klivar, eins og teir í høllini á Hálsi.

Samb. Húsaumsitingini er Látrið vælegnað til valhøli.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri | Fyri ávís | Fyri ávísar | Fyri |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 533<br>Formansins merki: |

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at flyta valstaðið á Argjum í skúlan á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Bjørg Dam um at varðveita valstaðið í róðarneystinum á Argjum, soleiðis, at koyristólar og illa gongd eisini fáa atkomu til valstaðið via rampu og fíggja av 5370 stuðul til íløgur, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 1 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Odd Færø.

Ímóti atkvøddi Bjørg Dam

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein

| | Býráðsfundur<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 534<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 136/19 Samanlegging av rakstarstaðnum 5315 Finsen við 5312 Mentanarhølir í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 197/19 | 19/02126-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 164/19 | 19/02126-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 136/19 | 19/02126-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Mentanarhølini Aulan og Sangstovan í Finsen vóru tikin í brúk á heystið 2017. Í 2018 varð serstakt rakstrarstað stovnað til endamálið – konta 5315 Finsen. Frá byrjan hava hølini annars verið rikin sum partur av samskipanini kring Reinsaríið og Perluna, ið er skipað við rakstrarkontu 5312 Mentanarhølir í miðbýnum. Talan er í báðum førum um lutfalsliga smá rakstrarstøð og verður tí mett greiðast og skynsamast at rakstrarkonta 5315 Finsen verður løgd undir rakstrarkontu 5312 Mentanarhølir í miðbýnum.

Broytingin hevur ikki við sær eyka kostnaðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 535 |
| | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at leggja rakstrarstaðið 5315 Finsen undir rakstrarstaðið 5313 Mentanarhølir í miðbýnum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunnvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini.
Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 6 ímóti óg ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.

# 137/19 Integratión, samskipan og átøk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 03.04.2017 | 15/17 | 17/01053-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 01.05.2017 | 17/17 | 17/01053-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 109/17 | 17/01053-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 06.11.2017 | 44/17 | 17/01053-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 11.12.2017 | 50/17 | 17/01053-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 05.03.2018 | 15/18 | 17/01053-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 07.05.2018 | 21/18 | 17/01053-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 154/18 | 17/01053-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 211/18 | 17/01053-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 30/18 | 17/01053-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 203/18 | 17/01053-1 |
| 12 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 144/18 | 17/01053-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 13.09.2018 | 33/18 | 17/01053-1 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 01.10.2018 | 39/18 | 17/01053-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 278/18 | 17/01053-1 |
| 16 Trivnaðarnevndin | 05.11.2018 | 42/18 | 17/01053-1 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 26.11.2018 | 51/18 | 17/01053-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 347/18 | 17/01053-1 |
| 19 Trivnaðarnevndin | 06.06.2019 | 19/19 | 17/01053-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 161/19 | 17/01053-1 |
| 21 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 137/19 | 17/01053-1 |

**Málslýsing:**
**Bakstøði**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi býráðssamgongu verður sagt, at arbeiðast skal fyri, at tilmælini um integratiónspolitikk fyri Tórshavnar kommunu verða fylgd, og at tilboð fyri tilflytarar í kommununi verða raðfest og løgd í fasta legu.

Sett verða harumframt ymisk ítøkilig mál og ætlanir:
- At integratiónssamskipari verður settur at veita tænastur til tilflytarar, at savna og menna tilboð
- At skipa verður eitt altjóða hús sum royndarskipan at leiðbeina tilflytarum
- At virkast skal fyri, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut
- At virka verður fyri, at føroyskt undirvísing til tilflytarar á Kvøldskúlanum verður ment, og
- At kommunan skal ganga á odda við at bjóða starvsvenjing til tilflytarar á kommunalum arbeiðsplássum sum lopfjøl til, at hesi kunnu nýta teirra egnu førleikar.

**Í hesum uppriti verður lýst, hvussu hetta kann skipast, so tað verður samanhangur millum verandi tænastur á integratiónsøkinum og ætlanirnar hjá samgonguni.**

**Tørvur**
Sum partur av altjóða samfelagnum eru Føroyar í broyting. Hetta sæst millum annað aftur í fólkasamansetingini, har fleiri útlendingar flyta til landið at arbeiða, íðka ítrótt ella sum partur av familju. Hetta er gongd, sum hevur vundið uppá seg síðan aldarskiftið. Í árinum 2000 búðu

286 fólk í Føroyum, sum høvdu annan ríkisborgararætt enn norðurlendskan, í 2014 var samsvarandi talið 894.

Við ymiskum mentanum er kommunan vorðin uppaftur meira fjølbroytt, men skulu øll, bæði útlendingarnir, sum flyta higar, og tey, sum búgva her frammanundan, fáa fullgóða nyttu og uppliving av ymiskleikanum, so er tað umráðandi, at nýggju borgararnir so skjótt sum til ber verða innlimaðir í samfelagið, tað verið seg stovnsliga integratión (arbeiðsmarknaðartilknýti), mentanarliga integratión (mál, mentan og samfelagsviðurskifti), sosiala intgratión (gerandislig sambond) og politiska integratión (demokratisk luttøka).

Ásannandi hetta lat kommunan gera eitt álit um integratiónspolitikk, sum varð liðugt við ársenda 2015. Politikkurin skal vera brúgv hjá nýggju borgarunum til føroyska samfelagið, og tí varð í álitinum lýst, hvussu fólkasamansetingin í Tórshavnar kommunu sær út (tjóðskap, aldur v.m.), hvørjar avbjóðingarnar eru, og hvat kommunan kann gera við tað. Í álitinum eru 8 høvuðstilmæli, sum eisini verða tikin upp her.

**Bygnaður**
Integratión er sambært kommunustýrisskipanini politiskt ábyrgdarøki hjá trivnaðarnevndini. Av samgonguskjalinum framgongur, at talan um serliga politiskt raðfest øki.

Integratión í praksis er tó tvørsektorielt, tvs., at øll fakøki í umsitingini og virkisøkini annars hava ábyrgd av integratión, nøkur meira enn onnur.

Uppskot er tí, at meðan skipaða og samskipandi integratiónsarbeiðið verður bygt upp, eigur yvirskipaða fyrisitingarliga ábyrgdin, eisini samsvarandi serligu politisku raðfestingini, at liggja hjá stjórnini, sum leggur út í kortið ítøkiligar málsetningar samsvarandi politiskum samtyktum.

Landspolitiskt varar Uttanríkis- og vinnumálaráðið yvirskipað av integratión. Uppgávan er løgd til Útlendingastovuna, har integratiónssamskipari er settur. Kommunurnar hava hóast hetta rættiliga stórt frælsi til sjálvi at taka stig til integratiónsátøk innan hennara uppgávuøki, og sum mett verður tørvur er á. Samstundis kunnu kommunur samstarva sínamillum um integratión eins og Útlendingastovuna.

**Verandi tænastur á integratiónsøkinum**
Kommunan hevur sum er eina røð av tænastum til borgararnar í kommununi, sum eisini fevma um tænastur til tilflytarar. Tænastan til tilflytarar er eins og tænastan til hinar borgararnar í kommununi desentral og verður framd á avvarðandi fakøki.

**Børn og ung og tilflytarar**
Kommunan hevur sum tænastuveitari og myndugleiki innan dagstovnaøkið og barnaverndarøkið nógv samskifti við foreldur, harundir kravdar foreldraviðtalur. Á sama hátt er innan skúlaverkið, har ábyrgdin hjá kommununi tó er ikki hin sama við tað, at lærarar eru settir av landinum.

Sum lýst í tilmælinum um integratiónspolitikk eru avbjóðingarnar innan barnaøkið serliga hersar:
- Alt kunningartilfar er á føroyskum
- Misskiljingar vegna mentanarmunir
- Tulkatænasta

Kommunan er í gongd við at nágreina, hvussu kunningin á dagstovnaøkinum kann betrast bæði í mun til ítøkiligt tilfar til tilflytararnar og sum amboð til starvsfólkini. Partur av hesum er eisini at betra fatanina av mentanarmunum, tvs. at skapa eitt tvørmentanarlig umhvørvi.

Metast má, at skipað tulkatænasta, har tulkar eru góðkendir eisini í mun til verju av viðkvæmum persónsupplýsingu v.m., er mál fyri fleiri myndugleikar bæði hjá landinum og kommununum. Í integratiónsálitinum hjá landsstýrninum frá 2011 verður sagt, at tulkatænasta skal skipast, men ikki hvussu.

Atlit kann tó eisini takast til, at ikki øll tulking nýtist at vera um persónsviðkvæm viðurskifti, men um meira almenn viðurskifti, ið ikki setir somu krøv til tulkaran, og tað í hesum sambandi snýr seg um at skipa ein “tulka-banka” av sjálvbodnum og/ella fakligum tulkum.

**Kvøldskúlin og tilflytarar**
Kvøldskúlatilboðið í føroyskum máli til tilflytarar hevur góða undirtøku, men avbjóðingar eru fleiri. Yvirskipað er tørvur á, at krav verður sett tilflytarum um at læra seg málið. Í dag er talan um, at tilflytarin sjálvur ynskir at læra málið.

Onnur avbjóðing er, at sjálv undirvísingin er ikki skipað sum føst játtan ella tilboð, tí Mentamálaráðið stendur fyri størsta partinum av fíggingini. Tað fyriliggur heldur eingin formaliserað námsætlan fyri undirvísingina. Tað er Mentamálaráðið, sum skal skipa móðurmálsundirvísingina, íroknað upplýsing um mentan og samfelag, har tað eisini er møguligt hjá tilflytarum at fáa hægri málsliga undirvísing.

Ein triðja avbjóðing er, at teir flestu tilflytararnir eru eisini á arbeiðsmarknaðinum, og at undirvísingin má verða tillagað til tað, tvs. bæði dagtilboð og kvøldtilboð, møguliga eisini intensiv vikuskiftistilboð.

**Snarskivan og tilflytarar**
Snarskivan er tænastudepilin hjá borgarum í Tórshavnar kommunu, staðið har kommunan møtir borgaranum. Snarskivan er sostatt eitt slag av millumliðið millum borgaran og umsitingina í Tórshavnar kommunu. Snarskivan veitir eina røð av tænastum beinleiðis til borgaran, og virkar sum eitt kunnandi og ráðgevandi millumlið, tá talan er um mál, ið verða viðgjørd úti á fakdeildunum.

Kommunan møtir tilflytarum fyrstu ferð í Snarskivuni, har tey koma at skráseta flyting í kommununa. Her fáa tey m.a. ráðgeving um p-tøl, lækna, barnaansing og líknandi tænastur, sum tilflytarar hava tørv á at fáa greiði á sum skjótast.

Seinasta árið hevur verið miðað ímóti at menna eina betri tænastu til tilflytarar. Ein faldari við hentum upplýsingum á enskum máli er gjørdur sum partur av vælkomupakkanum til tilflytarar. Í næstum verður í samstarvi við Útlendingastovuna skipað fyri fundi við eina røð av tilflytarum úr ymiskum londum. Hetta fyri at fáa nærri at vita um teirra upplivingar í sambandi við flyting í kommununa, og við støði í hesum at framleiða málrættaða kunning til tørvin hjá tilflytarum.

Hetta er liður í arbeiðum at menna eitt sonevnt “tilflytarhorn” í Snarskivuni, har Tórshavnar kommuna verður sjónliggjørd sum ein fjølbroytt kommuna, og at kommunan ynskir, at øll kenna seg vælkomnan og væl kunnaðan. Hetta “horn” skal eisini avspeglast talgilt á torshavn.fo, sum skal útbyggjast við tilfari til tilflytarar á enskum máli. Hetta skal eisini avspeglast á sosialu miðlunum hjá Tórshavnar kommunu soleiðis, at fyrispurningar um

kunning og ráðgeving, sum kemur inn við Snarskivuna, um telefon, tpost o.s.fr., er skjótur at nøkta og bera fram á talgildu miðlunum.

**Hugskotið og tilflytarar**
Hugskotið, sum er íverksetarahúsið hjá Tórshavnar kommunu, ráðgevur persónum og fyritøkum um at stovna og reka egið virkið. Hugskotið ráðgevur sum er fleiri tilflytarum og eisini eru tað fleiri tilflytarar, sum leiga sær skrivstovuhøli í Hugskotinum, har teir arbeiða við at menna egin hugskot.
**Diversity**
Diversity er eitt tiltak hjá Tórshavnar kommunu, sum varð hildið á fyrsta sinni í 2016. Endamálið við tiltakinum var at heiðra fjølbroytni og á hendan hátt varpa ljós á ymiska tilfeingi í kommununi. Hetta var gjørt bæði gjørt út frá einum integratiónshugsunarhátti, men eisini sæð í ljósinum av, at samfeløg, har ymiskleiki er sjónligur, hava betri gróðrarlíkindi fyri nýhugsan og íverksetan.

**Tey átta integratiónstilmælini og samgonguskjalið**
Í stuttum kunnu tey níggju integratiónstilmælini í integratiónsálitinum hjá kommununi frá 2015 lýsast soleiðis:

1. Tulkatænasta – tryggja, at samskifti serliga millum stovn og foreldur og innan barnavernd verður fatað og skilt rætt bæði í mun til almenna kunning og viðbrekin mál
2. Starvsvenjing – útlendsku tilflytararnir hava í størri og minni mun útbúgvingar. Kommunan kann økja møguleikan fyri, at fakligu førleikararnir verða gagnnýttir innan fakøkið.
3. Málundirvísing – eggja til og krevja, at tilflytarar læra føroyskt mál, harundir eisini børn. Streingja á landsmyndugleikarnar um at skipa málundirvísingina betri og differentierað.
4. Kunning og ráðgeving – kunning um rættindi og skyldur, eitt nú kunningardag, ensktmælt kunningartilfar, “tilfytara-corner” á Snarskivuni
5. Mentorskipan – taka stig til sjálvbodna mentorskipan, har sjálvboðim hjálpa útlendskum tilflytara at finna seg til rættis á ymsan hátt, eitt nú luttøku í felagslívi (ítrótt v.m.), greiða frá fyrbrigdum, sum tilflytarin varnast og undrast á osfr.
6. Tilgongdir og tilfar í sambandi við familjusamførd børn – taka stig til serstakar tilgongdir og tilfar eitt nú í sambandi við eyka málundirvísing og tillagað tilfar
7. Tvørmentan – við tvørmentanarligum umhvørvi, har høvuðseykenni er opinleiki mótvegis mentanarmunum til tess at minka um málsligar og mentanarligar misskiljingar
8. Integratiónsskrá – samskipað integratiónsskrá til einstaka tilflytaran, og er skipaður eftir tørvin á vegleiðing og stuðli

Samgonguskjalið vísir til hetta og leggur so ítøkilig mál aftrat, serliga um at seta í starv integratiónssamskipara, og at skipa eitt altjóða hús. Niðanfyri verða hesi bæði mál nærri lýst sum grundarlag fyri víðari tilgongd.

**Integratiónssamskipari**
Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, er skilagott at seta integratiónssamskipara í starv, sum burturav fæst við hetta.

Mett verður, at integratiónssamskiparin tørvar egið fysiskt stað, har viðkomandi kann tosa við tilflytarar uttan órógv og sum beinleiðis inngongd hjá tilflytarum til restina av kommununi, eitt slag av "front office" fyri restina av tænastunum hjá kommununi.

Tað skal vera gjørligt hjá tilflytarum at støkka inn á gólvið og hitta integratiónssamskiparan, sum so kann leiðbeina borgaran til restina av kommununi. Eisini skal samskiparin vegleiða og vísa borgaran til rætta myndugleikan, tá ið spurt verður um tænastu, ráðgeving v.m., sum ikki liggur hjá kommununi, tað veri seg til Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Inngongdin hjá tilflytarum til kommununa og tænastur hennara skal vera tann sama sum hjá borgarunum annars, tvs. um Snarskivuna, eisini til tess at sjónliga signalera, at kommunan ynskir tilflytarum vælkomnar.

Umframt henda meira sjónliga partin, skal integratiónssamskiparin eisini seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella tørvur er á.

Harumframt skal hann í samskifti við ymsu fakøkini koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið fakøkini hava, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum verður tí eisini at fáa skipað grundarlagið undir tilboðum og tænastum samsvarandi teimum átta integratiónstilmælunum so sum tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi.

Integratiónssamskiparin skal hava hóskandi útbúgving og royndir, men metast má, at í starvi sum hesum eru persónligu eginleikararnir eisini sera týdningarmiklir aftrat fakliga profilinum. Samskiparin fær fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir internt og eksternt.

Setast kann spurningur við, hvørt talan skal vera um fulltíðar ella parttíðar starv, og um talan er um varandi starv skilt soleiðis, at endamál eisini má vera, at ymsu virkisøkini hjá kommununi við tíðini hava bygt upp førleikar og fortreytir til sjálvi at lyfta teirra viðkomandi integratiónsuppgávur.

Sæð í hesum ljósinum kundi starvið í fyrsta umfari verið skipað sum tíðaravmarkað verktætlanarstarv.

Integratiónsamskiparin verður eftir omanfyri standandi fysiskt staðsettur í Snarskivuni, men mett verður, at starvið yvirskipað vísir til stjórnina, í øllum førum ta tíð, tað tekur at byggja integratiónsarbeiðið upp.
Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin er knýttur at fakligum stýrisbólki ella kontaktbólki, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur, tørv v.m. Hetta kundi eitt nú veri sosialdeildarleiðarin, leiðarin á Snarskivuni, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á starvsfólkadeildini og leiðarin á Kvøldskúlanum, ella eftir tørvi.

**Altjóða hús**
Í samgonguskjalinum er skrivað, at altjóða hús skal skipast sum royndarverkætlan at leiðbeina tilflytarum. Um hetta er avmarkaða endamálið, so kann hetta skipast sum

afturvendandi kvøldsetur ella líknandi eitt nú á Býarbókasavninum ella øðrum tøkum høli hjá kommununi.

Um hugsað verður breiðari, so kann eitt altjóða hús eisini vera karmur um tvørmentanarligt virksemi, tvs. karmur, har føroyingar og tilflytrarar hittast eitt nú til mentanarlig tiltøk, fyrilestrar v.m.

Annað endamál við altjóða húsinum kundi verið sum sosialt tilhaldsstað hjá tilflytarum tó soleiðis, at endamálið má framhaldandi vera integratión skilt soleiðis, at altjóða húsið fremur samveru millum tilflytarar og føroyingar. Havast skal eisini í huga, at tilflytararnir umboða fleiri tjóðskapir.

Spurningur er, um altjóða hús sum royndarverkætlan skal hugsast sum egið hús/stað, ella um talan heldur er um skipan/bygnað, ið samskiparin stendur fyri, har ymisk høli verða nýtt. Í samgonguskjalinum er eisini nevnt, at sjálvboðin, lesandi, eldri tilflytarar og onnur, ið kunnu/vilja hjálpa, taka lut, og tað kundi m.a. verið ein møguleiki í mun til fyriskipan av tiltøkum í altjóða húsinum.

Mett verður skilagott, at integratiónssamskiparin fær sum uppgávu at nágreina konsept fyri altjóða húsið.

**Fígging v.m.**
Integratión sum sjálvstøðug uppgáva hevur onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging, meðan eitt nú málundirvísing er tengt at játtan frá landsstýrinum.

Skal setast ein integratiónssamskipari, so skal starvið fyrst normerast og flokkast, eins og fígging skal fáast til vega til løn og rakstur. Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí, eins og integratióssamskiparin kann hava tørv á játtan til ávís integrtatiónsátøk.

Spurningur er, um stovnast skal nýggj konta á fíggjarætlanini til Integratiónssamskipan og átøk.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, miðfyisitingarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at umrøða málini í hesum uppriti nærri sum grundarlag fyri raðfesting, fíggjarætlan v.m.

**Trivnaðarnevndin 03. apríl 2017:** Umrøtt. Biðið verður um starvs- og uppgávulýsing í mun til integratiónssamskiparastarvið til næsta fund.

**Ískoyti:**
Biðið er um starvs- og uppgávulýsing til starv sum integratiónssamskipari.

Til tess at byggja upp, skipa og samskipa kommunalu integratriónsátøkini, og at fáa miðsavnaða orku til endamálið, verður skipað nýtt starv sum integratiónssamskipara. Starvið er fulla tíð.

Integratiónssamskiparin skal vera samskipandi millumlið millum tilflytarar og kommununa. Integratiónssamskiparin skal í hesum sambandi vegleiða og kunna tilflytarar um viðurskifti, tænastur og tilboð í kommununi, harundir at vísa til rætta myndugleika, tá tað ikki er kommunan, eitt nú Útlendingastovuna ella aðrar almennar ella privatar stovnar.

Integratiónssamskiparin hevur fjøltáttaðar uppgávur og skal samstarva breitt við fleiri fakbólkar og skipanir innanhýsis og uttanhýsis. Integratiónssamskiparin skal virða og duga at seta seg inn í avbjóðingar hjá tilflytarum sum heild, verða tænastusinnaður, uppsøkjandi og fyrikomandi.

Integratiónssamskiparin skal seta í gongd og samskipa tey átøk, sum áløgd verða ella kommunan metir tørvur verða á. Integratiónssamskiparin skal í samstarvi við ymsu deildirnar í fyrisitingini taka stig til og koma við hugskotum til átøk, vísa á tørv v.m., eins og at hann skal kunna lofta teimum avbjóðingum, ið deildirnar og tænastuøkini annars hava á integratiónsøkinum, og koma við uppskotum um loysnir í samstarvi við avvarðandi partar.

Uppgáva hjá integratiónssamskiparanum er eisini at skipa grundarlag undir skipanum og tilboðum samsvarandi integratiónstilmælunum (frá desember 2015) so sum kunning, tulkatænastu, mentorskipan og starvsvenjingar v.m. í tann mun, ið kommunan sjálv kann fremja hesi ella í samstarvi við aðrar myndugleikar.

Integratiónssamskiparin skal hava útbúgving á bachelor- ella kandidatstigi. Umframt fullgóðan málsligan førleika á enskum og føroyskum, skal integratiónssamskiparin hava gott innlit í kommunalu skipanina og føroysk samfelagsviðurskifti annars.

Integratiónssamskiparin hevur skrivstovu í Snarskivuni tó við tilvísing til trivnaðarfyristingina. Aftrat sær hevur integratiónssamskiparin fakligan kontaktbólk, ið er mannaður við viðkomandi deildarleiðarum ella starvsfólkum í mun til faklig viðurskifti, tænastur v.m.

Víðari tilgongd:
Sum víst í málslýsingini til undanfarna fund í trivnaðarnevndini, hevur integratión sum sjálvstøðug uppgáva onga beinleiðis fígging. Fleiri tilmæli og átøk hava heldur ikki við sær beinleiðis tørv á nýggjari fígging.

Starvið sum integratiónssamskipari skal normerast av fíggjarnevndini, eins og fígging skal fáast til vega til løn, rakstur og møgulig integratiónstiltøk. Ítøkiligi fíggjartørvurin hongur lutvíst saman við ítøkiligu lønarútreiðslunum, tvs. sáttmála, starsvaldur v.m., og virksemisstiginum annars, men metast má, at starvið krevur kr. 500-700.000 árliga.

Alt eftir, hvussu virksemið við altjóða húsi verður skipað, er eisini fíggjartørvur knýttur at tí.

Spurningur í hesum sambandi er, hvørt integratión skal hava sítt egna rakstrarstað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at skipa starv sum integratiónssamskipari sambært omanfyri standandi starvs- og uppgávulýsing, og í hesum sambandi útvega fígging til løn, rakstur og integratiónsátøk. Mælt verður til at skipa serstaka rakstrarkontu til integratión.

**Trivnaðarnevndin 1. mai 2017:** Nevndin hevur onkra viðmerking til starvs- og uppgávulýsingina, sum verður tillagað samsvarandi. Samtykt at taka undir við tilmælinum um at skipa starv sum integratiónssamskipari og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at Kr. 200.000 verða at játta til at løna integratiónssamkipara restina av árinum fíggjað soleiðis, ið verður at fíggja soleiðis:
1311 Miðfyrisiting kr. 100.000
1312 Trivnaðarfyrsiting kr. 100.000

Starvið er tíðaravmarkað í eitt ár.

**Ískoyti:**
Starvið sum integratiónssamskipari er sett frá 1. november 2017. Samskiparin kemur á fundin at umrøða ymisk viðurskifti innan integratión saman við nevndini sum grundarlag fyri seinni arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 06. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Integratiónssamskiparin leggur fram uppskot til arbeiðsætlan.

**Trivnaðarnevndin 11. desember 2017:** Siri Helgadóttir Tórgarð, samskipari, kunnaði um ætlanir fyri 2018.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða starvsvenjing til tilflytarar.

Gjørt er uppskot til eitt pilotprojekt hesum viðvíkjandi, sí hjálagt.

Endmálið er at skipa eina starvsvenjing, ið miðar í móti at skapa eina heildarintegratión, sum fevnir um mál, mentan, arbeiði og samfelag. Hetta merkir eitt nú, at í starvsvenjingin er skipað bæði sum arbeiði og málmenning, har tað eisini fáa undirvísing.

Uppskotið leggur upp til eina royndarverkætlan, har samlaða kostnaðarmetingin er kr. 1,8 mió, og sum fevnir um 12 tilflytarar, ið fáa løn í starvsvenjingartíðarskeiðinum, settum lærara í ¾ tíð og samsýning til mentorar umframt útreiðslur til undirvísingartilfar v.m.

Uppskotið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppskotið og at fáa heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 05. mars 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eitt av høvuðstilmælunum í sambandi við integratiónsátøkini er at fáa sett í verk skipaða málundirvísing til tilflytarar. Gjørt er upprit um føroyskt sum fremmandamál, sí hjálagt.

Málið er grundarsteinur undir góðari integratión. Við góðum mál førleikum ber til at kunna seg um samfelagið, mentanina og fáa innlit í sosiala siðvenju. Sum foreldur gerst tað lættari at hjálpa og stuðla børnunum. Og tað gerst lættari at fáa eitt gott og gevandi arbeiðslív.

Umframt at lýsa verandi støðu og undirvísingartilboð, verður í uppritinum mælt til, at kommunan gongur á odda at skipa nýggjan leist til tilflytarar at læra føroyskt sum fremmandamál, ið eisini er tillagað til ymiskt førleikastig og ymiskt torleikastig.

Uppritið verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppritið og at geva umsitingini heimild til at arbeiða víðari við ætlanini.

**Trivnaðarnevndin 07. mai 2018:** Samtykt at fáa sett ætlanina í verk, harundir at fáa til vega fígging, og at beina málið til ummælis í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at heita á umsitingina um at avvarandi partar í umsitingini og Kvøldskúlanum greina málið nærri og koma aftur í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Viðv. skúlatilboði
Við greiningunum í málinum er fingið eitt enn betri grundarlag fyri at fara undir m.a at betra um eitt nú málundirvísingina og onnur átøk. Mett verður mest hóskandi at fingið dagført undirvísingartilboð skipað innan Kvøldskúlaskipanina og innan galdandi lóg, ið m.a. hevur eina samansetta fígging frá kommununi og Mentamálaráðnum. Skúlin hevur í mong ár havt skipaða undirvísing fyri tilflytarum, ið er ment og útbygd stigvíst. Kvøldskúlin og integratiónssamskiparin hava gjørt eitt dagført upprit um málundirvísing, ið er hjálagt.

Viðv. tilskundan til uppmøting og læring

Í fjør viðgjørdi býráðið mál 17/01123 viðv. prísskipan hjá Kvøldskúlanum 2017-18. Sí hjáløgt skjal frá viðgerðini tá. Ein partur av samtyktini var at innføra eitt depositum á 2000 kr fyri byrjanarskeið, ið næmingurin fær aftur um hann møtir 85% og fer til próvtøku. Sum heild hevði tað áðrenn ikki gingið nøktandi við at møta hjá næmingum og har fleiri møta tí passar teimum best. At læra mál er oftast sera krevjandi og krevur eisini ávísa tilskundan.

Útlendingalóggávan í Føroyum, ið er danskt málsøkið, hevur í høvuðsheitum verið óbroytt síðani aldarskiftið, meðan tað í Danmark eru gjørdar hópin av tillagingum, ið eru ætlaðar at møta teimum avbjóðingunum, ið danir hava innan sítt økið, herundir viðv. væntandi málførleikum hjá tilflytarunum.

Í verandi støðu ber til sbrt. galdandi lóggávu at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum uttan at hava nøktandi málsligan førleika. Mælt verður til, at býráðið formliga heitir á landsstýrismannin í Uttanríkis- og vinnumálum, um at fáa dagført útlendingalóggávuna soleiðis, at reglurnar í Føroyum í størri mun tilskunda og eyggja tilflytarum til skjótt og væl at ogna sær nøktandi málkunnleika og at treyt m.a. verður sett um nøktandi málføreika fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a) at taka undir við hjálagda dagførda uppritinum um málundirvísing við støði í ymsum førleikastigum og torleikastigum, og beinanvegin søkja Mentamálaráðið um fígging til slík skeið at byrja eftir summarfrítíðina, har Kvøldskúlin í Havn eisini bjóðar seg til at verða høvuðsstøð fyri slíka undirvísing
b) at áheitan verður send til landsmyndugleikarnar um at fáa sett sum megintreyt fyri varandi uppihaldsloyvi, at persónar hava staðið hóskandi málroynd.

Málið at senda í býráðið um trivnaðarnevndina.

**Ískoyti**:
Fíggjarligar avleiðingar
Virksemi innan málundirvísing fyri tilflytarum er sum meginreglu fíggjað soleiðis, at landið fíggjar undirvísingarkostnaðin og Kvøldskúlin annað. Tó so, at ofta er ávís óvissa knýtt at fíggingini frá landinum. Ítøkiliga hevur Kvøldskúlin oyramerkt ávísa upphædd til at fara undir eyka byrjanarundirvísingartilboðið fyri tilflytarum við veikum bókligum førleikum. Víðari viðgerðin í nevndunum vil sýna um og hvøjar aðrar møguligar fíggjarligar avleiðingar vera í 2019 og framyvir.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at heita á landmyndugleikarnar um saman við kommununum at fara undir røð av átøkum at fremja integratión bæði viðvíkjandi málmenning, mentan, førleikameting, arbeiðsmarknað o.a.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum samtykt í fjør er starvssetanin av integratiónssamskipara tíðaravmarkað til 31. oktober 2018.

Integratiónssamskiparin leggur fram stutta frágreiðing um virksemið higartil, um royndirnar og avbjóðingarnar eins og boð uppá framhaldandi arbeiði við integratión.

Frágreiðingin verður send seinni í vikuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til trivnaðarnevndini til at umrøða frágreiðingina.

**Trivnaðarnevndin 13. september 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Setanin av integratiónssamskipara er avmarkað til eitt ár og gongur út 31. oktober 2018.

Á síðsta nevndarfundi varð frágreiðing løgd um virksemið higartil og boð uppá arbeiðsætlan fyri eitt komandi tíðarskeið.

Støða skal takast til, hvussu integratiónsarbeiðið skal skipast framyvir, harundir, um integratiónssamskiparastarvið skal skipast fast, leingjast í eitt ávíst tíðarskeið ella niðurleggjast.

Verður avgjørt, at integratiónssamskiparastarvið skal halda fram antin sum fast starv ella longt ávíst tíðarskeið, er neyðugt við fígging til endamálið.

Í løtuni fíggjar konta 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál løn hjá integratiónssamskiparanum og tiltøk v.m. Fígging er tøk á kontuni til at fíggja framhald í inniverandi ári. Fíggjartørvurin er í høvuðsheitum løn fyri november og desember. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2019 er upphædd til integratión ikki sett av.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at integratiónssamskiparastarvið verður skipað sum fast starv ella verður longt fram til 31. oktober 2019, at útreiðslur til virksemið restina av inniverandi ári verða fíggjaðar av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, tó í mesta lagi kr. 120.000, og at játtan fyri 2019 verður fingin til vega á fíggjarætlanini fyri 2019. Málið verður at beina í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 01. oktober 2018:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at leingja setanina av integratiónssamskipara til 31. desember 2018, og at málið um framhaldandi skipan av integratiónsarbeiðinum verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Trivnaðarnevndin 05. november 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**

Á kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, sum higartil hevur fíggjað integratiónsvirksemið, væntast ein minninýtsla í 2018 á kr. 1,1 mió. Í fíggjarætlanini 2019 eru settar kr. 800.000 av til hesa kontu, harav uml. kr. 500.000 eru markaðar til samtykta samstarvsverkætlan (mentorskipan fyri ung). Tá lagt er upp fyri hesum, eru sostatt kr. 1,4 mió tøkar.

Skotið verður upp, at henda minninýtsla verður flutt fram til fíggjarárið 2019, og at kr. 800.000 verður markaðar á kontu 2460 til at fíggja integratiónssamskiparastarvið og integratiónsátøk annars í 2019.

Hetta merkir, at til ber at leinga samskiparastarvið í øllum førum fram til 31. desember 2019 og annars halda fram við at menna integratiónsarbeiðið. Metast má, at politisk støðutakan um eina varandi skipan av integratiónsarbeiðinum eigur at verða tikin í hesum tíðarskeiðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til
- at leingja setanina av integratiónssamskiparanum fram til 31. desember 2019,
- at fíggja kr. 800.000 til integratiónsvirksemið av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið av framfluttari minninýtslu í inniverandi ári, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 26. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Ískoyti:**
Sum samtykt er skipaða integratiónsarbeiðið fyribils sett til at halda fram til árskiftið 2020. Nú hálvtannað ár er gingið, síðani integratióssamskipari varð settur í starv og virksemið av álvara byrjaði, ber til at siga meira um starvið og virksemið á økinum, hetta sum grundarlag fyri at taka støðu til, um integratión skal skipast sum fast virksisøki í fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Niðurstøðan er, at skipanin eigur at halda fram.

**Byrjanin**
Síðan november 2017 hevur Tórshavnar kommuna havt møguleika at seta kós fyri integratiónsøkið í kommununi og í Føroyum við tað, at økið er raðfest politiskt, og at skipað er eitt samskiparastarv til endamálið.

Hetta hevur havt týdning fyri teir tilflytarar, ið longu vóru í landinum, og fyri tey, ið komin eru. Serliga er tað tey, sum eru familjusameind, ið hava fingið ágóðan av, at integratiónsøkið í Tórshavnar kommunu alsamt gerst meira skipað. Tey hava fingið ein persón at venda sær til og tey síggja broytingar á eitt nú málmenningarøkinum – eitt økið, sum hevur stóran týdning fyri integratiónina hjá tí einstaka og børnum teirra.

Í dag búgva í Tórshavnar kommunu 625 útlendskir tilflytarar, norðurlendingar ikki íroknaðir. Av hesum eru 265 kvinnur og 360 menn. Ein stórur partur av monnunum hava einans arbeiðsloyvi og roknast kann við, at tá eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi minkar, fellir talið av monnum eisini. Hesir 625 tilflytararnir koma úr 74 ymiskum londum.

Seinastu 10 árini eru talið av útlendskum tilflytarum til Føroya tvífaldað og væntast skal, at talið komandi árini framvegis veksur.

Á einum meira yvirskipaðum og strategiskum støði hevur Tórshavnar kommuna eisini havt møguleika at gera seg galdandi innan integratiónsøkið. Tætt og gott samstarv hevur verið við Útlendingastovuna, sum hevur ført við sær at amboð og filmur verður tøkur til dagstovnaøkið at brúka í arbeiðið teirra við fleirmæltum familjum.

Tórshavnar kommuna hevur eisini staðið á odda fyri at samskipa verkætlanina um amboð til dagstovnaøki, og hevur verið drívmegin aftanfyri at fáa tær sjey kommunurnar í verkætlanina at samstarva. Harafturat hevur, eftir eitt ávíst trýst frá Tórshavnar kommunu, Útlendingastovan nú kalla inn til fyrsta netverksfund innan integratión, har seks kommunur afturat Tórshavnar kommunu luttaka. Hetta er sera positivt, tí við hesum fer at bera betur til at samskipa integratiónstiltøk kring landið.

Eftir áheitan frá Tórshavnar býráð hevur Vinnu- og uttanríkismálaráðið tikið upp arbeiðið at gera uppskot til rammulóg um integratión. Fundur hevur verið við kommununa um hetta, og hevur kommunan fingið høvi at koma við sínum hugsjónum um, hvussu integratión skal skipast í Føroyum.

Samstarv hevur eisini verið við Mentamálaráðið, ið millum annað hevur stuðlað verkætlanini um amboð til dagstovnaøkið. Tórshavnar kommuna hevur harumframt verið vertur fyri fundin hjá “An inclusive cultural sector in the Nordics”, eitt samstarv í norðurlendskum høpi, um hvussu mentan og mentanarlig tiltøk kunnu stuðla undir góða integratión og inklusjón.

Innanhýsis í kommununi hevur týðandi samstarv verið millum integratiónssamskiparan og Kvøldskúlan um føroyskt sum annað mál. Leiðslan í Kvøldskúlanum arbeiðir miðvíst fyri at fáa í lag skipan um føroyskt sum annað mál, soleiðis at tey, ið fáa prógv, fáa eitt prógv, sum er á einum góðkendum støðið, har CEFR skipanin verður brúkt. Samstarv er við MMR um hetta.

Samstarv hevur eisini verið við hinar deildirnar í Trivnaðarfyrisitingini, har integratiónssamskiparin hevur verið brúktur sum innanhýsis ráðgevi í mun til mál, ið hava havt eitt integratión og inklusjón aspekt tengt at sær. Samstarv er við Býarbókasavnið og við Tórsgøtu um tiltøk ol. til tilflytarar. Gott samstarv hevur eisini verið við Snarskivuna.

Í 2018 var skipað fyri nógvum ymiskum tiltøkum og nógv orka varð brúkt uppá hetta. Talan var um almenn tiltøk, har øll vóru vælkomin at luttaka. Í Posthúskjallarinum varð skipað fyri open space tiltøkum, til Mentanarnáttina var stórt tiltak í Perluni, og Diversity week var í oktober. Afturat hesum varð skipað fyri regluligum fundum við einum úrval av tilflytarum fyri at fáa kenslu av, hvat rørir seg í tilflytarahópinum og at koma tættari nøkrum teirra. Eisini var útlendskur lesandi í praksislæru á integratiónsøkinum á vári 2018, og ein tilflytari í starvsvenjing gjøgnum ALS á heysti 2018.

**Í løtuni**
Í løtuni er nógv ymiskt á skránni innan integratiónsøkið. Feltið er stórt og ríkiligt er at tríva í. Sumt er líka til at fara undir og ber væl til at røkka við ásettum fíggjarkarmi og innan kommunumark. Annað er meira trupult at fara undir, avmarkað av manglandi rammulóg og manglandi tilfari. Eisini liggur eitt arbeiði at gera politiskt innanhýsis í mun til integratiónsøkið.

Í løtuni verður arbeitt við at fáa fund í lag við heilsufrøðingarnar hjá Gigni, sum arbeiða í Tórshavnar kommunu um eitt møguligt samstarv um upplýsandi mammubólk til tilflytara

mammur. Endamálið við einum slíkum mammubólki er at fáa samband við hendan ávísa bólkin av mammum og stuðla undir tí góða samstarvinum við heilsufrøðingin.

Byrjandi fundur hevur verið við skúlastjórarnar í Tórshavnar kommunu um at fara undir skreening av tilflytara næmingum, sum koma beinleiðis úr útlondum og inn í fólkaskúlan – samskifti hevur eisini veri við MMR um hetta. Endamálið er at tryggja næminginum best møguligu byrjan uppá skúlagongdina.

Byrjandi samstarv er millum Tórshavnar kommunu, Mariehamn/Áland og Nuuk, um integratiónsøkið. Endamálið er at kanna nærri, um hesir tríggir partar kunnu fáa nyttu av samstarvi um eitt felags prosjekt, sum søkt verður um pening til frá norðurlendska samstarvinum um integratión. Orsøkin til, at hesir tríggir partar hava eitt byrjandi samstarv er, at migratiónsmynstrið í hesum trimum londum líkist, og at ymiskar avbjóðingar í mun til integratión og inklusjón líkjast. Og brýtur hetta burturfrá hinum norðanlondunum.

Fyrireikað verður eisini til Mentanarnáttina og til Diversity week.

**Fyri framman**
Arbeiði á integratiónsøkinum fer framyvir at snúgva seg um at halda fast í nøkrum føstum tættum, sum til dømis Diversity week og luttøku á Mentanarnáttini. Harumframt at seta onnur tiltøk í verk, sum til dømis innførsluskeið til nýggjar tilflytarar og gera tað til fastan tátt í árshjólinum hjá integratiónsøkinum. Hetta er alt mentanarlig og almenn tiltøk, ið hava til endamáls at varpa ljós á margfeldi í Tórshavnar kommunu og at leggja lunnar undir eina góða integratión.

Annað arbeiði á integratiónsøkinum er áhaldandi at tryggja samstørv við stovnar uttan fyri kommununa, aðrar kommunur, landið og útlandið. Hetta alt fyri at tryggja, at Tórshavnar kommuna altíð bjóðar øllum sínum borgarum bestu tænastuna og starvsfólkum sínum nýggjastu vitanina innan integratións- og inklusjónsarbeiði.

Eitt afturat er at veita innanhýsis ráðgeving innan integratión til deildir í fyrisitingini og til stovnar hjá kommununi. Aftur er talan um at tryggja borgarum eina góða tænastu, men meira umráðandi er, at starvsfólkini hjá kommununi fáa tey amboð og tann stuðul, sum skal til, til at tey kunnu fremja arbeiði sítt í mun til tilflytarar á ein munagóðan hátt og føla seg tryggan í at gera hetta.

Ein partur av tí arbeiðinum, sum liggur fyri framman, bíðar eftir politiskari støðutakan og rammum. Her verður sipað til skipan við starvsvenjing, málmenning til vaksin og tilflytaranæmingar í fólkaskúlanum. Tá rammulóg verður gjørd innan hesi øki, skal væntast, at nakað av hesum verður lagt til kommununar at skipa.

Ein áhaldandi partur av arbeiðinum innan integratiónsøkið er strategi og fyrisiting. Undir hesum eru serliga tvey mál, sum eru átrokandi at fara undir og tað er at fáa í lag integratiónspolitikk fyri Tórshavnar kommunu, og at fáa enska partin av heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu og kunningini til tilflytarar yvirhøvur dagført.

Spurningur er eisini, í hvønn mun integratiónsarbeiðið skal fevna um persónliga ráðgeving til tilflytarar.

Niðanfyri verða lýst tvey uppskot til, hvussu integratiónsøkið í Tórshavnar kommunu kann skipast framyvir:

1. Integratiónsøkið hevur primært tvær funksjónir – innanhýsis ráðgevandi, fyrisitingarliga og strategiska funktión og at skipa fyri tiltøkum. Ynskiligt er við tveimum starvsfólkum. Ein, sum tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi. Og ein, sum tekur sær av tiltøkum.
    a. Innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi
        i. Skipar økið strategiskt í mun til politikkin hjá kommununi og menning av økinum eitt nú við støði rammulógini um integratión, tá hon verður samtykt, og sum útgreinar kommunalu uppgávurnar á økinum
        ii. Skipar fyri innanhýsis menningartiltøkum til starvsfólk í kommununi bæði fyrisiting og stovnar, ið hava beinleiðis samband við tilflytarar, td. ráðgeving, fundir og skeið innan integratión og inklusjón
        iii. Samstarvar við aðrar partar – deildir og stovnar í kommununi, aðrar kommunur, stovnar, land og útland
        iv. Samskipar samstarv um starvsvenjingar

Hetta yvirlitið er ikki úttømandi, bert eitt yvirlit yvir nøkur arbeiðsøki hjá tí persóninum, sum tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi.

    b. Tiltøk
        i. Diversity week
        ii. Mentanarnáttin
        iii. Innførslu skeið
        iv. Skeið / fundir saman við Gigni til tilflytara mammur
        v. Onnur føst tiltøk td. kvøldsetur, hugni og annað
        vi. Uppsøkjandi arbeiði fyri at fáa eitt tættari samstarv við tilflytarar – td. at fara á tey arbeiðsplássini, ið hava nógvar tilflytarar, at hava fund/prát við teir tilflytarar, ið eru har. At fara á Kvøldskúlan, tá skeið í føroyskum, sum annað mál byrjar osv.
        vii. Standa fyri samskifti á Facebook-síðuni hjá integratiónsøkinum

Hugsast kann,at onnur tiltøk kunnu koma afturat, og at annað arbeiði eisini verður at fyriskipa hjá hesum persóni. Talan er um yvirlit yvir, hvat er á skrá og ætlað.

Við hesum leistinum verður ikki bjóðað persónlig ráðgeving til tilflytarar hjá Tórshavnar kommunu. Hetta kemst av tí, at royndirnar seinasta hálvtannað árið vísa, at tað, sum tilflytarar venda sær til kommununa um, er ráðgeving, sum aðrir almennir myndugleikar og skipanir eiga at veita.

Annað, sum tilflytarar venda sær til kommununa um, er ráðgeving í mun til umsóknir teirra um uppihaldsloyvi – hetta er øki, sum Útlendingastovan varar av. Rættarhjálpin bjóðar eisini ókeypis løgfrøðiliga hjálp. Eitt annað er ráðgeving í mun til útbúgving og umskúling.

2. Integratiónsøkið skal røkja innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi. Skal skipa fyri tiltøkum. Og ráðgeva tilflytarum. Neyðugt verður við í minsta lagi tveimum ársverkum – fulla tíð til ein persón, ið tekur sær av innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi, hálva tíð til ein persón, ið tekur sær av at skipa fyri tiltøkum og hálva tíð til ein persón, ið veitur persónliga ráðgeving til tilflytarar.
    a. Innanhýsis ráðgeving, fyrisiting og strategi er tað sama, sum í uppskoti 1
    b. Tiltøk er sum í uppskoti 1 – tó avmarka til Diversity week, Mentanarnáttina, onnur tiltøk, so sum kvøldseta og hugni og samskifti á FB.
    c. Ráðgeving til tilflytarar

i. Persónlig ráðgeving til tilflytarar
ii. Uppsøkjandi arbeiði at fáa eitt tættari samstarv við tilflytarar – td. at fara á tey arbeiðsplássini, ið hava nógvar tilflytarar, at hava fund/ prát við teir tilflytarar, ið eru har. At fara á Kvøldskúlan, tá skeið í føroyskum, sum annað mál byrjar osv.

Verður integratiónsøkið skipað á hendan hátt, mugu onnur hølir finnast at hýsa integratiónsøkinum. Starvsfólkini mugu sita soleiðis, at viðskiftafólkið, tilflytarin, kann ganga beint inn og út uttan at órógva onnur starvsfólk hjá TK og má hetta vera eitt stað, sum er lætt at finna, serliga hjá tilflytarum, sum ofta ikki eru so staðkend. Afturat hesum er umráðandi at hava atgongd til fundarhøli, sum bæði skal brúkast til persónliga ráðgeving og fundarvirksemi.

Omanfyri eru lýst tvey uppskot. Mælt verður til fyrra uppskotið, ið er mest viðkomandi fyri kommununa

**Bygnaður og skipan**
Integratión er í dag skipað sum virkisøki í trivnaðarfyrisitingini við beinleiðis tilvísing til trivnaðarstjóran, men virksemið gongur tvørturum fyrisitingar og deildir/stovnar. Við einum ella tveimum starvsfólkum er økið enn ov lítið til at skipa sum deild í fyrisitingini, og tí kann verandi skipan í høvuðsheitum halda fram.

Hinvegin eigur virksemið at verða fíggjað av sjálvstøðugari rakstrarkontu. Í dag er játtan sett av á kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsumál, men hetta er ikki rakstrarkonta.

Skal integratiónsøkið mennast og leggjast í trygga legu bæði í mun til menningararbeiðið og fyriskipan av tiltøkum, verður mett neyðugt at økja um starvsfólkaorkuna, har miðað eigur at verða eftir tveimum starvsfólkum.

Gjørt er uppskot til fíggjarætlan, har støðið er tikið við verandi starvsfólkaorku og fígging kr. 800.000, harav kr. 200.000 er til ymisk tiltøk. Um fíggingin verður veitt, sum eftir hjálagda uppskoti, verður talan um eina øking uppá kr. 750.000, har økt verður bæði um lønarjáttan og játtan til tiltøk og menning.

Dømi um fígging er hjálagt, sum eisini tekur støði í teimum báðum uppskotunum omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at integratión heldur fram sum virkisøki í Tórshavnar kommunu. Mælt verður harumframt til, at játtan til integratión verður skipað í sjálvstøðugari rakstrarkontu frá fíggjarárinum 2020.

**Trivnaðarnevndin 06. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 138/19 Arbeiðsevni í leiðslubólkum á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 194/17 | 17/02486-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 263/18 | 17/02486-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 219/18 | 17/02486-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 05.11.2018 | 43/18 | 17/02486-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 63/18 | 17/02486-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.11.2018 | 60/18 | 17/02486-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 2/19 | 17/02486-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 37/19 | 17/02486-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 80/19 | 17/02486-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 109/19 | 17/02486-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 142/19 | 17/02486-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 175/19 | 17/02486-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 162/19 | 17/02486-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 138/19 | 17/02486-1 |

**Málslýsing:**

**Ískoyti:**

Við støði í tørvi á strategi og felags menningarátøkum fyri alt dagstovnaøkið, er avgerð tikin um at skipa menningararbeiðið á økinum øðrvísi.

Til tess, at allir dagstovnaleiðarar skulu hittast regluliga og koma í tættari samstarv um viðurskifti og skipanir, sum er øllum dagstovnaøkinum at gagni, eru økisleiðslubólkarnir nú skipaðir um til leiðslubólkar.

Endamálið er eisini at fáa javnari og gagnligari samskifti og samstarv millum dagstovnaleiðararnar og fyrisitingina á dagstovnaøkinum, og at geva politisku skipanini betri grundarlag fyri avgerðum og átøkum, sum hava við dagstovnaøkið sum heild at gera, harundir eisini námsfrøðiliga virksemið, sum henda menningararbeiðsætlan fyri komandi árið leggur størstan dentin á.

Leiðslubólkauppgávur:

Skipaðir eru seks leiðslubólkar. Hvør leiðslubólkur fær eitt ávíst evni at viðgera og ítøkiligar uppgávur tí viðvíkjandi at arbeiða við, sum er viðkomandi fyri alt dagstovnaøkið, lutvíst sum grundarlag fyri víðari fyrisitingarligari og politiskari viðgerð.
Evnini verða viðgjørd og lýst soleiðis, at tey gagna framtíðararbeiðinum á dagstovnaøkinum.

Fyrstu evnini eru vald bæði við støði í ynskjum og ávístum tørvi frá dagstovnaleiðarum, fyrisitingini og politisku skipanini.

Evnini eru:

- Námsætlan og námsfrøðilig stevnumið
- Starvsfólkanormering og fígging
- Mannagongdir
- Námsfrøðiliga tilboðið í Tórshavnar kommunu

- Dygdarmenning og góðskumeting á dagstovnaøkinum
- Barna- og ungdómspolitikkur í Tórshavnar kommunu

Sí hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Trivnðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða menningararbeiðsætlanina.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Menningararbeiðsætlanin fyri dagstovnaøkið varð umrøtt í mentamálanevndini 13. september 2017. Leiðslubólkarnir eru um at vera lidnir við arbeiðið. Uppgávuorðingarnar eru ymiskar og úrslitini krevja ymiska viðgerð – eisini politiskt.

Leiðslubólkur 4, 5 og 6 hava svarað uppgávuorðingini og verða við hesum latin mentamálanevndini.

**Leiðslubólkur 4: Námsfrøðiliga tilboðið í Tórshavnar kommunu**
Dagstovnaleiðarar saman við starvsfólki standa fyri námsfrøðiliga innihaldinum á einstøku dagstovnunum. Hetta arbeiðið er á mangan hátt ment sjálvstøðugt úti á stovnunum. Tórshavnar kommuna, sum varðar av øllum dagstovnunum og harvið hevur ábyrgd av námsfrøðiligu tænastunum, ynskir at arbeiða fram í móti eini felags allýsing av dagstovnavirkseminum í kommununi. Hetta skal vera við til at lýsa virksemið á dagstovnaøkinum í síni heild. Leiðslubólkurin fer at arbeiða við at orða felagsnevnara fyri virksemið á dagstovnaøkinum í kommununi við støði í hesum:

- Orða einfalda lýsing av tænastuni á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu
- Lýsa megintættir, kjarnuuppgávur, eyðkenni og krøv
- Lýsa og gera uppskot um aðalkrøv til tænastuna á dagstovnaøkinum
- Lýsa eginleikar/eyðkenni og fakligar førleikar hjá starvsfólkunum á dagstovnaøkinum
- Evna kunnandi tilfar til nýggj starvsfólk og til fólk uttanfyri organisatiónina

Gjørd er lýsing av námsfrøðiliga tilboðnum, Ætlanin er, at hetta tilfarið skal almannakunngerast á heimasíðuni og møguliga eisini sum faldari. Eisini er orðað tilfar til nýggj starvsfólk, sum leiðarar kunnu brúka í sambandi við setan av starvsfólki. Hetta verður lagt fram á fundinum.

**Leiðslubólkur 5: Dygdarmenning og góðskumeting á dagstovnaøkinum**
Dagstovnavirksemið í Tórshavnar kommunu hevur í stóran mun verið ment desentralt av dagstovnaleiðarum og starvsfólkunum á dagstovnaøkinum. Fyri at kunna arbeiða meira yvirskipað við góðsku, námsfrøðiligum innihaldi og námsfrøðiliga umhvørvinum er ynskiligt at tilevna og taka í nýtslu felags góðskumeting, sum støðugt kann nýtast til interna dygdarmenning á hvørjum einstøkum

dagstovni í kommununi. Leiðslubólkurin fer at arbeiða við at gera uppskot um dygdarmenning fyri dagstovnarnar í Tórshavnar kommunu við støði í hesum:

- Hvussu tryggja vit dygdarmenning á øllum stovnum í Tórshavnar kommunu?
- Hvørjar dygdarmenningar- og góðskumetingar frymlar/hættir kunnu setast í verk?
- Hvør skal skipanin vera handan dygdarmenning?
- Hvør luttekur í dygdarmenningini, og hvussu verður hendan uppfylgd?

Gjørd er frágreiðing um, hvussu dygdarmenning og góðskumeting kann skipast, og ítøkiligt uppskot er somuleiðis gjørt tí viðvíkjandi. Talan er um nýggja funktión, ið krevur fígging, skal hon kunna setast í verk. Verður lagt fram á fundinum.

**Leiðslubólkur 6: Barna- og ungdómspolitikkur í Tórshavnar kommunu**
Ynski er at orða ein barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga virksemið, hetta er eisini ásannað av politisku skipanini. Undanfarna býráð byrjaði hetta arbeiðið, men kom ikki á mál og kom arbeiðið tí heldur ikki út til stovnarnar at viðgera. Ynskið er nú at geva politisku skipanin eitt barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga virkseminum við støði í virkseminum á dagstovnaøkinum, sum fevnir um vøggustovu-, barnagarðs-, frítíðarskúla-, klubb- og ungdómshús virksemi. Leiðslubólkurin fer at arbeiða við hesum:

- Orða uppskot til barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga virksemið í Tórshavnar kommunu

Gjørt er uppskot til barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga virksemið, ið verður lagt fram á fundinum. Ætlanin er, at mentamálanevndin umrøður uppskotið og beinir tað til hoyringar hjá viðkomandi pørtum so sum starvsfólki, foreldrum og børnum á dagstovnaøkinum umframt ávísar býráðsnevndir. Tá innkomnu hoyringarnar eru viðgjørdar, viðgerð mentamálanevndin uppskotið endaliga at lata býráðnum at samtykkja, ætlandi fyri jól. Við støði í politikkinum skulu eftirfylgjandi gerast arbeiðsætlanir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at umrøða ymsu evnini. Harumframt verður mælt til, at uppskotið til barna- og ungdómspolitikk fyri námsfrøðiliga virksemið verður sent til hoyringar hjá viðkomandi pørtum at koma aftur til nevndina til endaliga viðgerð og støðutakan, og at uppskotið um dygdarmenning og góðskutryggjan verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanina 2019.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Umrøtt og samtykt at senda uppskotið til barna- og ungdómspolitikk til hoyringar í byggi- og býarskipanarnevndini, trivnaðarnevndini og hjá foreldraráðunum.

**Ískoyti:**
Umboð fyri barna- og ungdómsdeildina leggur uppskotið til barna- og ungdómspolitikk fram fyri trivnaðarnevndini.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur havt barna- og ungdómspolitikkin til hoyringar, og hevur gjørt hesar yvirornaðu viðmerkingarnar til politikkin:

- Í sambandi við gerð av kommunuætlan er tað sera kærkomið, at ein tílíkur politikkur verður settur á breddan. Kommunuætlanin er grundað á ymisku politikkirnar, sum kommunan varðar av, og er tað ætlanin at kommunuætlanin í sínum visjónum tekur

útgangsstøði í øllum kommunalum politikkum. Tá tað er sagt, so er eisini at viðmerkja, at mett verður at tað ikki er serliga heppið, at politikkurin einans fevnir um virkisøkið hjá barna- og ungdómsdeildini. Ynskiligt hevði verið, at politikkurin fevndi um øll børn í øllum aldri og alt kommunalt virksemið, sum á onkran hátt er tengt at børnum og teirra lívi í kommununi. Politikkurin hevði sostatt eisini skula sett visjónir á breddan um skúlabørn og frítíðarvirksemið, sum so ella so ávirkar dagin hjá børnum og ungum í øllum aldri.

- Somuleiðis verður mett, at tað er av týdningi, at politikkurin staðfestir, at tá býurin verður planlagdur, so skal býurin vera innrættaður við tilboðum til allar borgarar, bæði vaksin, men eisini børn og ung. Børn og ung skulu gera gagn av býnum eins og onnur, og skulu tilboðini stimbra undir eitt aktivt mentanar- og frítíðarlív, sum er við til at styrkja um almennu heilsuna, førleikarnar og samræði hjá børnum og ungum. Harumframt verður mett, at politikkurin kann staðfesta, at býarrúmini skulu innrættast og sniðgevast soleiðis, at tey bjóða til rørslu, uppihald og samveru, umframt at politikkurin kann áseta, at børn og ung skulu kunnu ferðast trygt í býnum til gongu, á súkklu ella við almennu ferðsluni.
- Tá kommunalir bygningar verða planlagdir og bygdir, so eigur planleggingin og sniðgevingin av hesum bygningum at taka støði í brúkaranum. Og tá bygningar til børn og ung verða planlagdir og sniðgivnir, so eigur hetta somuleiðis at vera í hásæti. Harumframt eru tað vanliga eisini námsfrøðingar, lærarar og onnur fakfólk, sum varða av børnunum og teimum ungu, og eiga hesir førleikarnir ikki at verða undirmettir, tá ein bygningur verður planlagdur, bygdir og umbygdir, og tí eiga hesir førleikarnir somuleiðis at vera við í tilgongdini. Mett verður at politikkurin eigur at staðfesta hetta, soleiðis at vit tryggja, at neyðugi fakkunnleikin altíð er hoyrdur.
- Yvirgongdin millum ymisku tilboðini kommunan bjóðar børnum og ungum eiga somuleiðis at vera soleiðis tilrættað, at barnið, tann ungi og tey avvarðandi kenna seg tryggan, tá tey ymisku tilboðini í kommununi eru í nýtslu. Børnini skulu á ein tryggan hátt kunna flyta seg millum tey ymisku tilboðini kommunan bjóðar barninum gjøgnum lívið, men eisini í gerandisdegnum. Her verður t.d. hugsað um yvirgongdina frá vøggustovu til barnagarð, frá barnagarði í skúla, frá skúla til frítíðarvirksemi o.s.fr.

Í sambandi við at politikkurin hevur verið í hoyring hjá Býarskipanardeildini, hevur deildin heitt á Barna- og ungdómsdeildina um at koma á fundin at leggja politikkin fram.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at politikkurin verður endurhugsaður í mun til omanfyri standandi viðmerkingar og sendur teknisku nevnd og náttúru- og umhvørvisnevndini til hoyringar.

**Trivnaðarnevndin 05. november 2018:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Tekniska deild varðar av vegakervinum og harvið skal tryggja nøktandi ferðslutrygd og framkomuleika í sambandi við tílíkar stovnar, fyri koyrandi til gongu og á súkklu.
Tí er tað sera umráðandi at eisini yvirskipaðu ferðsluviðurskiftini, herundir parkerings- og avsetingarmøguleikarnir fyri tílíkar stovnar verður tikin við heilt frá byrjan. Somuleiðis eigur trygdin kring tílíkar stovnar at vera í lagi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at ferðslutrygdargrannskoðan frá uttanhýsis ferðslutrygdargrannskoðara skal vera partur av øllum verkætlanum frá byrjan til lidnan stovn. Somuleiðis eiga allar verkætlanir á sama hátt at verða atkomugranskaðar, tað veri seg bæði uttan- og innandura.
Við verandi stovnar verður mælt til at hava bæði ferðslutrygdar- at atkomuinspektión t.e. gjøgnumgongd av ferðslutrygdar- og atkomuviðurskiftum, umframt tilmæli til ábøtur.

**Ískoyti:**
Umhvørvisdeildin varðar av náttúru- og umhvørvisøkinum hjá Tórshavnar kommunu. Ynskiligt hevði verið at Grøna leiðin – umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu eisini var innlimaður inn í Barna- og ungdómspolitikkin. Til dømis kann nevnast, at í Grønu leiðini er málið, at matur á kommunalum stovnum og arbeiðsplássum skal vera vistfrøðiligur í mest møguligan mun og harumframt at maturin er úr nærøkinum. Nevnast kann eisini, at Grøna leiðin hevur sum mál, at bygningar skulu vera sniðgivnir og innrættaðir orkusparandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til:

- At Grøna leiðin – umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu, verður innlimað í Barna- og ungdómspolitikkin
  At Barna- og ungdómsdeildin leggur fram politikkin fyri Umhvørvisdeildina og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og leiðaranum á umhvørvisdeildini.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hjá leiðslubólki 2 verður lagt fram. Uppgávuorðingin var soljóðandi:

Leiðslubólkur 2: Starvsfólkanormering og fígging
Tað er upp til einstøku kommununa at áseta starvsfólkanormeringina og fíggingina annars á dagstovnaøkinum. Vegleiðandi normeringslykil hevur verið brúktur av flestu kommunum í mong ár. Nógv verður kjakast um nóg góða normering til námsfrøðiligt virksemi og stovnsrakstur annars. Frá stovni til stovn, kommunu til kommunu, frá landi til land verður tosað um normering á ymiskan hátt, tá fleiri hættir verða nýttir til útrokning og praktisering av normering til virksemið hjá starvsfólkum í mun til børnini. Leiðslubólkurin fer at arbeiða við støði í hesum:

-  Hvør er normeringin á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu?
-  Hvørjar eru avbjóðingarnar í mun til at veita dygga og javngóða námsfrøðiliga tænastu á øllum dagstovnaøkinum við verandi normering og fígging, harundir verandi stovnsbygnaði?
-  Hvør námsfrøðilig tænasta er ynskilig ella ikki møgulig við verandi skipan, og hvussu kann bøtast uppá hetta?

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða evnið.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hjá leiðslubólki 1 verður lagt fram, uppgávuorðingin er soljóðandi.

**Leiðslubólkur 1: Námsætlan og námsfrøðilig stevnumið**
Við støði í kunngerð frá 4. mai 2006 um virksemi á dagstovnaøkinumum var námsætlanarfrymilin hjá Tórshavnar kommunu evnaður til. Hvør stovnur arbeiddi síðani við at seta orð á námsfrøðina og at gera sína egnu námsætlan. Á várið 2009 vóru allar námsætlanirnar lidnar og lagdar fram. Flestu stovnar í kommununi hava síðani skipað sítt virksemi sambært hesum. Í 2017 lat Mentamálaráðið úr hondum rit um námsfrøðilig stevnumið sum leiðbeinandi karmur um virksemið á dagstovnaøkinum. Leiðslubólkurin fer at arbeiða við støði í hesum:

- Eftirmeta og endurskoða námsætlanararbeiðið hjá Tórshavnar kommunu
- Viðgera og sammeta námsætlanirnar hjá dagstovnunum í Tórshavnar kommunu við námsfrøðiligu stevnumiðini, ið Mentamálaráðið hevur latið gera, og við støði í tí gera uppskot um møguligar tillagingar, íverksetan og regluligar dagføringar av námsætlanum í framtíðini

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða evnið.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Við støði í tilfarinum frá leiðslubólki 2, sum er lagt fram og sum lýsti avbjóðingar við verandi fíggjarleisti, starvsnormermingum v.m., verður nýtt arbeiðið, sum trivnaðarfyrisitingin og miðfyrisitingin fara standa fyri, sett í gongd til tess at gera uppskot til ítøkiligar broytingar. Uppskot skal leggjast fyri aftur mentamálanevndina á nevndarfundinum í juni 2019 sum grundarlag fyri fíggjarætlanarviðgerðini 2020. Sí skjal.

Leiðslubólkur 4, ið lýsti námfrøðiliga innihaldið, og sum er lagt fram, hevur lutvíst við støði í hesum gjørt uppskot til nýtt arbeiðsevni, har verandi størv/starvsheiti verða neyvari skilmarka viðvíkjandi uppgávu, ábyrgd og førleikum, og sum skulu verða felags fyri alt stovnsøkið. Sí skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka hetta til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Leiðslubólkur 5: Miðlan av námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovnaøkinum.

Mett verður tørvur á at miðla kjarnuuppgávurnar í námsfrøðiliga arbeiðinum á øllum dagstovnaøkinum.

Miðlanin eigur bæði at lýsa virksemið, námsfrøðina og tænastuna, sum Tórshavnar kommuna bjóðar børnum og ungum. Miðlanin skal bæði geva vanliga borgaranum og foreldrum eina fatan av dagstovnaøkinum, men somuleiðis vísa námsfrøðiliga fakið og uppgávuna á dagstovnaøkinum soleiðis, at starvsfólk og komandi starvsfólk vera kveikt til námsfrøðiligu kjarnuuppgávurnar.

Miðlanin av dagstovnaøkinum skal vera breið, soleiðis at hon bæði lýsir kjarnuuppgávurnar, men eisini kjarnuuppgávurnar innan ymisku virksemini á dagstovnaøkinum. Virksemini eru hesi: vøggustovuvirksemi, barnagarðsvirksemi, forskúlavirksemi, frítíðarskúlavirksemi, ungdómsvirksemi og serligu tiltøkini fyri børn við serligum avbjóðingum.

Miðlanin lýsir felagseyðkennini í dagstovnavirkseminum og gagnar tískil øllum dagstovnaøkinum, samstundis sum miðlanin skapar eina felagskenslu av tænastuni á dagstovnunum.

Miðlanin av tænastuni er eisini ein miðlan til politiska myndugleikan, ið varðar av námsfrøðiliga innihaldinum og tænastuni á dagstovnaøkinum. Hetta kann geva vitan og íblástur til framtíðar avgerðir, ið viðvíkja dagstovnaøkinum.

Leiðslubólkur 5 átekur sær at gera eitt uppskot um miðlan, har námsfrøðiliga innihaldið og tænastan á dagstovnaøkinum er í miðdeplinum og sum víðari kann setast í verk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka hetta til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Tikið til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Leiðslubólkur 1 hevur endurskoðað og eftirmett námsætlanirnar, ið dagstovnaøkið hevur arbeitt eftir síðani 2009. Eisini hevur leiðslubólkur 4 viðgjørt og sammett námsætlanirnar við námsfrøðiligu stevnumiðini, ið Mentamálaráðið hevur lagt fram.

Stevnumið og námsætlanarfrymilin fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu er lagdur fyri dagstovnaleiðarnar og er hjálagdur.

Fyri at tryggja íverksetanini av nýggja námsætlanarfrymilinum skipar Barna- og ungdómsdeilin fyri temadøgum fyri dagstovnaleiðarnar í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til at staðfesta endurskoðaða námsætlanarfrymilin.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til kunningar.

**Ískoyti:**
Uppskot til barna- og ungdómspolitikk varð lagt fram fyri mentamálanevndini 12. september 2018. Síðani hevur politikkurin verður til hoyringar í trivnaðarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini umframt foreldraráðnum og starvsfólkum á dagstovnaøkinum. Hoyringsarbeiðið hevur verið drúgt og umfatandi, men eisini gevandi.

Afturvendandi í hoyringssvarunum er, at ongin er ósamdur við politikkin, men spurnartekin verður sett við, hvussu politikkurin verður at síggjast aftur í námsfrøðiliga virkseminum á dagstovnaøkinum.

Hesin spurningur varð tí eisini tikin upp í leiðslubólki 6 og samráði við fyrisitingina sum liður í at gera ítøkilig menningarátøk, sum taka støði í barna- og og ungdómspolitikkinum.

Úrslitið av hesum er ein listi við átøkum, sum fevna um viðurskifti viðvíkjandi fakliga støðinum, inklusjón, spæl og læru, foreldrasamstarvi v.m. Átakslistin er livandi skjal, har átøk verða sett í verk og nýggj sett á skrá eftir høvi og tørvi. Sí skjal.

Barna- og ungdómspolitikkurin verður við hesum lagdur býráðnum til samtyktar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja barna- og ungdómspolitikkin og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 139/19 Listaverkstøð í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 106/17 | 17/01361-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 173/17 | 17/01361-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 279/17 | 17/01361-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 324/17 | 17/01361-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 294/17 | 17/01361-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 6/18 | 17/01361-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 53/18 | 17/01361-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 107/18 | 17/01361-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 69/18 | 17/01361-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 146/18 | 17/01361-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 152/18 | 17/01361-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 137/18 | 17/01361-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 120/18 | 17/01361-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 164/18 | 17/01361-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 234/18 | 17/01361-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 213/18 | 17/01361-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 4/19 | 17/01361-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 39/19 | 17/01361-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 94/19 | 17/01361-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 118/19 | 17/01361-1 |
| 21 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 208/19 | 17/01361-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 191/19 | 17/01361-1 |
| 23 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 139/19 | 17/01361-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er m.a. orðað viðv. skapandi list:

**"Skapandi list, mentan og siðsøga í kommununi**
Íløgur í mentan og list, eru íløgur í okkara egna samleika. At kenna og vera partur av søguni, er ein virðismikil førningur og tí eiga søvn at verða sjónligir partar av høvuðsstaðnum.
...
Listahús eigur at útvegast, har listafólk í kveikjandi umhvørvi kunnu fáa frið at skapa. "

**Myndlistaverkstað í Finsen**
Slíkt verkstað kundi verið hugsað í ovaru høllini í Finsen (fyrrv. fimleikahallunum í fyrrv. kommunuskúlanum). (sí hjálagdar myndir og tekning).
Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fer at fáa hita frá Finsen.

Ynski er hjá myndlistafólki um at fáa betri møguleikar fyri verkstøðum. Ein fyrimynd er t.d. listaverkstað í Tróndheimi. Sí www.lkv.no

Høllin kundi verið avsett til verkstað hjá myndlistafólki og umsitin av myndlistafelagnum sbrt. nærri avtalu við kommununa viðv. upptøku, skipan, gjaldi v.m. Hugsanin er at rindast skal leiga fyri hølini og at tey so vítt til ber hvíla í sær sjálvum fíggjarliga.

Tað er hugsandi at har kundi verið einir 10-12 básar til listafólk.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av høllini v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Hugsanin er at minimalt skal gerast við hølini.

Ætlandi verður farið í samskifti við felagið hjá Myndlistafólki at gera uppskot til avtalu um, hvussu virksemi kann skipast har.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Býarskipanardeildin vísir á, at í heildarætlanini fyri Finsen hevur málið verið at ymisku hølini, sum eru afturat sjálvum lestrarbústøðunum skulu vera útatvend og bjóða býnum og borgarum inn o.s.fr. Ovara høllin er serstøk m.a. við góðum ljósi og útsýni til garðin í Finsen. Ein vandi við at gera myndlistaverkstað er, at virksemi verður ov innatvent og ikki uppnær endamálinum m.a. um at fáa lív í umhvørvi kring Finsen.

Tí er neyðugt, um avgjørt verður at fara víðari við hesi verkætlan, at umsitingin í dialoginum við listafólkini fær greinað, hvørt virksemi kann skipast soleiðis, at tað kann inngangа í visjónina um útatvent virksemi, sjónliggera list, framsýningar o.a.
Hartil er hóskandi at verkætlanin verður gjørt tíðaravmarkað og eftirmett t.d. innan 1 ár.

**Grafiska listaverkstaðið í Finsen (listgrafo)**
Er longu lutvíst staðsett og íverksett í hæddini undir auluni. Er ætlað til verkstað hjá listafólki innan grafikk (sí mynd og tekning). Hølini tilhoyra Bústaðir, men eru ætlaði til mentanarligt endamál, har tað verður rindað fyri rakstur og bygningsviðlíkahald, men ikki beinleiðis leiga.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið fyri listagrafikarar. Hugsanin er áhugaði søkja um upptøku til at brúka hølini hjá felagnum sbrt. upptøkureglugerð sbrt. avtalu við kommununa um upptøku, skipan og gjald. Hugsanin er at rindast skal fyri hølini.
Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Áðrenn verkætlan kann fremjast er neyðugt at endalig avtala kemur við Bústaðir um bygningsviðlíkahald o.a.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt tíðarætlan.

Eins og fyri møguliga myndlistaverkstaðið, er hóskandi at skipa verkætlanina sum eina tíðaravmarkaða roynd og við eftirmeting.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um listagrafiskan verkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum
b) at viðgera um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um myndlistaverkstað og herundir samráðingar við avvarðandi felag um treytir v.m. fyri virkseminum.

**Mentamálanevndin 3. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum a og b.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri Føroysk myndlistafólk og ListGraFo. Hesi hava latið inn uppskot/frágreiðing um, hvussu tey kundu hugsað sær at virka í hølunum í Finsen. Sí hjáløgdu skjøl.

Ein avbjóðing, sum serliga tykist gera seg galdandi fyri listgrafiska verkstaðin, er húsaleigan. Enn er ikki endaliga greitt, hvør fermetrakostnaðurin verður fyri raksturin av í listgrafisku hølunum og myndlistaverkstaðnum, men fyri tað fyrra helst nakrar túsund kr. um mánaðin og tað seinna nakað hægri.

Í tí sambandi hevur samband eisini verið við Tórshavnar Kvøldskúla um til ber at kombinera skeiðsvirksemi hjá skúlanum við virksemið hjá listgrafiska felagnum. Skúlin er sum útgangsstøði jaligur um hetta, og letur tað upp fyri virksemi, ið kann vera ymiskar tíðir á degnum gjøgnum alla vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin í september.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 8. november 2017:**
Viðv. listgrafiska verkstaðnum

Samskifti hevur verið við felagið Listgrafo og Kvøldskúlan um møguleikarnar. Felagið ynskir at hava hølini burturav og sigur seg vera til reiðar at rinda fyri kostnaðin av hølunum. Endaligi kostnaðurin er treytaður av brúksavtaluni millum Bústaðir og kommununa. Hesin kemur til viðgerðar í fíggjarnevndini 15. november 2017. Hølini vera ætlandi tøk seinni í november. Ávíst ivamál er um tørv á útsúgving til arbeiðið við vandamiklum løgi. Hetta er ikki kostnaðarmett.

Fyrivarni hjá umsitingini fyri hesi loysnini er mest um nýtslan av hesum serstaka høli verður nóg nógv til at felagið burturav skal hava tey.

Viðv. Myndlistaverkstaðnum

Samskifti hevur verið við Føroysk myndlistafólk um møguleikarnar. Umrøtt hevur verið antin at skipa tað sum verkstøð fyri tey sum eru at rokna sum yrkislistafólk. Hin møguleikin er at skipa virksemi meiri sum ein verkstað fyri yngri listafólk, ið ikki eru at rokna sum yrkislistafólk ella eina samanseting av báðum. Um fyrra loysnin verður valt metir umsitingin at tað er best um felagið sjálvt gerð avtalu við kommununa um virksemi og tekur sær av umsitingini av hølunum, upptøku v.m. Sum er eru hølini ikki klár at taka í nýtslu. Ymiskar ábøtur eru neyðugar. Herundir serliga viðv. brunaviðurskiftum, umframt aðrar ábøtur innan HVS, el v.m. Mett verður hóskandi at fáa ráðgeva at gera eina lýsing av viðurskiftunum. Umsitingin greiðir nærri frá hesum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

**Viðv. Listgrafiska verkstaðnum**
Samráðingarnar við Bústaðir um brúksavtalu fyri Listatornið í Finsen eru lidnar og kemur málið ætlandi fyri í fíggjarnevndini í desember. Í rundum tølum fevnir fyrrv. Evningsstovan, um umleið 1/3 av fermetrunum í Listatorninum og skal felagið tá rinda umleið 5.000 kr. / mánaðin íroknað el&hita fyri hølini.

Samstundis verður mett, at tað hevði verið ynskiligt, um listgrafiska undirvísingin hjá Kvøldskúlanum var í somu hølum. Umsitingin og Kvøldskúlin meta at tað hevði verið ein fyrimunur og hevði kunna økt um nýtslustigið, umframt at Kvøldskúlin so kann nýta verandi listgrafiska hølið til onnur undirvísingarendamál. Eisini verður mett, at ein møgulig avtala eigur at vera tíðaravmarkað t.d. til 2 ár ella at hava møguleika fyri uppsøgn við rímiligum skotbráði.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til og gera tilmæli til fíggjarnevndina um:
a). hvørt Listgrafo skal fáa í boði leigusáttmála
b). hvørt Listgrafo og listgrafiska virksemi hjá Kvøldskúlanum eigur at vera í felag í hølunum

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við loysn b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri Myndlistaverkstaðið í Finsen. Sí hjálagt kostnaðarmeting v.m. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 524,7 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Møguliga kunnu einstakir postar takast út.

Støða er ikki tikin til fígging av verkætlanini.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina og taka støðu til um um farast skal víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur spurt ráðgevan um hvat kostnaðurin vildi verið um ovara høllin verður umvæld, men ikki niðara. T.v.s. hvat krevst av umvælingum v.m. í trappuøkinum upp til ovaru høllina. Metingin er at 496 tkr. koma aftur í hondverkaraútreiðslum, umframt kostnaðurin til ráðgeving, ókent og mvg. T.v.s. uml. 631 tkr. Sí hjálagt tilfar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata hervið nevndini hesar upplýsingar til umrøðu við atliti til møguligt tilmæli á komandi fundi.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Umrøtt.

Ískoyti
Vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 29. november 2017 hevur samskifti verið við Listgrafo um samhýsing í hølunum í Finsen saman við Kvøldskúlanum. Sí hjálagt uppskot til avtalu.

Fyri at fáa hølini klár til endamálið hjá Listgrafo og Kvøldskúlanum er neyðugt við ymiskum ábótum o.a. Hetta er mett til umleið 100 tkr. og verður ætlandi framt innan raksturin hjá Kvøldskúlanum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til avtalu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Málið er nú gjøgnumgingið av nýggjum saman við Húsaumsitingini, umframt at ráðgevin hevur samskift við byggivaldið um fyritreytirnar í verkætlanini. Byggivaldið boðar frá, at

arbeiðast kann víðari við verkætlanini, tó so, at endaligt byggiloyvi skal fáast til vega, áðrenn farið verður í gongd.

Um ynski er at fara í gongd við at gera myndlistaverkstað í ovaru høllini, eru hondverkaraútreiðslurnar (HVÚ) mettar til 524,7 tkr. umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ), ókent (ca. 15% av HVÚ) og kommunalt MVG (6,25% av øllum postum). Um farið verður undir arbeiðið í ovaru høllini og ikki samstundis undir arbeiðið í niðaru høllini, er neyðugt at gera trappuuppgongdina millum báðar hallirnar. Metingin fyri tað arbeiðið er 496 tkr., umframt somu postar til ráðgeving, ókent og kommunalt mvg. Samanlagt gevur tað umleið 1,3 mkr.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión. Arbeiðið kann hóskandi verða boðið út í mai/juni til at verða útint tíðliga í heyst.

Við atliti til at fáa góðar prísir verður mett best, um arbeiðið í ovaru høllini var gjørt samstundis sum arbeiðið í niðaru høllini t.e. virknishøllini í Finsen – sí mál 17/01362, men er tað ikki alneyðug trey og krevur meirfígging uppá uml. 1,5 mkr.

Á løgukonto 5775 eru tøkar 921 tkr. fluttar frá verkætlan L57027 frá 2017 – sí mál 16/03404. Restin av fíggingini til verkætlanina, uml. 400 tkr., verður skotið upp at fíggjað av løgukonto 5775, smærri ítróttaanlegg, har 1,5 mkr. eru tøkar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðari á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir útboð av arbeiðinum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Halla Samuelsen atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og játta kr. 921 tkr., ið eru tøkar fluttar frá verkætlani L57027 frá 2017 umframt 400 tkr. av løgukonto 5775, smærri ítróttaranlegg, sum eykajáttan til arbeiðið. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til at fara aftur til upprunaætlanina at nýta hølini til alment innandura spælipláss.

**Ískoyti:**
Í skrivið dagfest 17. mai 2018 hava býráðslimir fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin ynski um at fáa málið um hølisviðurskifti hjá Listgrafo á skrá til fyrst komandi býráðsfund.

**Viðv.sáttmála við Listagrafo um leigumál í Finsen, sum er góðkendur í bæði mentamálanevnd og fíggjarnevnd**.
Undirritaða fer vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði at biðja um at fáa eitt mál á skrá á næsta býráðsfundi. Tað snýr seg um leigusáttmálan, sum er gjørdur við felagsskapin Listagrafo um leigumál í Finsen.

Og sum eisini fevnir um, at Kvøldskúlin skal arbeiða har ávís avtalaði tíðspunkt. Hesin sáttmálin er sum skilst góðkendur tann 24. Apríl í ár.

Sum skilst hava tey nú fingið boð um, at tey ikki sleppa inn har kortini.

Hesum kunnu vit í andstøðuni ikki taka undir við. Tí hetta er ein tilgongd, sum hevur staðið uppá í nógv ár. Og tey hava bíðað í tolni eftir avtaluni, sum er staðfest í einum av bæði Mentamálanevndini og fíggjarnevndini góðkendum sáttmála – og sum listabólkurin eisini hevur góðtikið.

Soleiðis kann mann ikki fara við fólki, felagsskapum og skúlum – og tað kunnu vit í andstøðuni ikki góðtaka.

Tað verður víst til, at Skúlin á Fløtum skal disponera yvir hølunum. Vit hava sum andstøða ferð eftir ferð víst á, at sjálvandi skulu vit gera alt vit eru ment til tess at Skúlin á Fløtum kann húsast á so fáum matriklum sum møguligt, meðan bygt verður. Og júst tú skutu vit upp, at Skúlin á Fløtum fekk Gamla realskúla at húsast í, inntil byggjaríîð verður liðugt. Tá ber so til at gera Gamla realskúla um til ein dagstovn. Tørvurin á dagstovnaplássum eigur at verða loystur á annan hátt beint nú – til dømis við at brúka allan brúna Skúla til endamálið.

Vit fara tí at krevja málið á næsta býráðsfund, soleiðis at vit kunnu samtykkja, at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Vinarliga
Vegna Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráði
Helena Dam á Neystabø
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bjørghild Djurhuus og
Annfinn Brekkstein

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani viðgerðina seinast hevur samskifti verið millum Tórshavnar kommunu og Listgrafo um viðurskiftini og hvør onnur møgulig hølisloysn kundi verið hóskandi til virksemi felagsins. Felagið metir, at niðara høllin í Finsen og hjárúmið norðanfyri eru meiri áhugaverd enn ovara høllin og hjárúmini har. Felagið ynskir ein leigusáttmála um hølini skjótast tilber. Í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen er innleiðandi viðgjørt at gera eina virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Í sambandi við fyrireiking av málunum eru ávegis tekniskar greiningar og kostnaðarmetingar gjørdar av ráðgeva og Húsaumsiting fyri bæði niðaru høllina sum virknishøll og í sambandi við hetta málið um listaverkstøð. Mett verður, at tað lutfalsliga skjótt ber til at fáa greinað viðurskiftini viðv. við atliti til at broyta endamál og ístaðin gera listaverkstøði í niðaru høllini ístaðin teirri ovaru høllini.

Í næstum kann farast í samráðingar við Listgrafo um innrætting og krøv til hølini, soleiðis at neyðug teknisk fyrireiking og byggimálsviðgerð kann fremjast, sum so síðani kann vera grundarlag fyri einum leigusáttmála.

Harumframt kann eisini eftirfylgjandi farast í samráðingar við Myndlistafelagið um møguleikan fyri myndlistaverkstaði í parti av niðaru høllini í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a) um farast skal í samráðingar við Listgrafo við tí endamáli at gera leigusáttmála og fyrireika listgrafiskan verkstað í parti av niðaru høllini í Finsen,

b). um farast skal í samráðingar við Myndlistafelagið um at gera leigusáttmála og fyrireika myndlistaverkstað í parti av niðaru høllini í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir a) og b).

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mæla til at halda fast í uppskot í skrivi, dagfest 17. mai 2018, sum gongur út uppá at Býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin Listagrafo og við Kvøldskúlan .

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam:

Mælt verður til at halda fast í uppskoti í skrivi 17. mai 2018, sum gongur út uppá, at býráðið heldur gjørdar avtalur og sáttmálar við Listabólkin, Listagrafo og við Kvøldskúlan.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti:

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Listaverkstøð
Umsitingin hevur verið í samskifti við Listgrafo um málið. Felagið er nú sinnað til at viðgera møguleikan fyri at gera listaverkstøð í ovaru høllini og ynskir at fara í samráðingar um tað.

Ovara høllin er nakað størri enn niðara av tí at fleiri hjárúm eru. Tí er møguliga møguligt at kombinera listagrafisk virksemi við annað listaverkstaðarvirksemi. Hetta verður ætlandi kannað nærri í komandi tilgongdini.

Betri møguleikar fyri framsýning/gallarívirksemi fyri yrkislist í býnum
Listgrafo hevði upprunaliga ætlanir um at hava samansett verkstað og framsýningarhøli, men av tí at talan nú er um ovaru høllina setur felagið fram ynski um at kommunan betrar um møguleikarnar hjá yrkislistafólki til at framsýna og eisini selja sína list. Til komandi fund kemur tilmæli um, hvussu hetta kann fremjast, bæði uppá stytri og longri sikt og soleiðis styrkja um møguleikarnar fyri at yrkislistafólk kunnu virka og annars geva borgarum og vitjani høvi til at síggja nútíðarlist í góðum umstøðum.

Henda ætlanin hongur í stóran mun saman við ætlanunum um virknishøll í hinari høllini í Finsen, sí tilmæli um tað. Neyðugt verður við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini til at gera uppskot til leiguavtalu við Listgrafo um leigumál um listaverkstøð í meginpartinum av ovaru høllini, møguliga samansett við annað listavirksemi.
b). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við b.

**Ískoyti**
Umsitingin er í holt við tilgongdina at bjóða umvælingina av ovaru høllini út. Hetta við endamálinum at hava listaverkstøð har.

Listgrafo hevur 1. februar 2019 fráboðað, at tey ynskja niðaru høllina til listaverkstøð.

Mett verður ikki hóskandi at býta virksemi um millum ovaru og niðaru høllina í Finsen. Fyrst og fremst vegna atkomuviðurskiftini, ið mugu vera sera høgligt til virknishøllina um hon skal kunnu brúkast til skúla, dagstovnar, frítíðarskúlar og virkni hjá borgarum v.m. Umframt at endaliga byggiloyvið til ovaru høllina vil hava avmarkingar viðv. tali av fólki í høllini, ið kann vera torført at hondhevja við eini virknishølll í teirri ovaru høllini.

Helst er betri at kanna víðari um onnur staðseting kann finnast til listgrafiskt virksemi. Verkætlanin viðv. listaverkstøðum verður síðani fyrireikað víðari, men til annað listaverkstaðarendamál enn listgrafiskt virksemi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at halda fast við samtyktina um at listaverkstøð í ovaru høllini og at farið verður undir víðari kanningar um listagrafiskavirksemi hjá Listgrafo kann hýsast aðrastaðni.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at halda fast við samtyktina um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Ískoyti**
Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum
Tilgongdin er ávegis og væntast klárt til næsta fund. Sí eisini mál 17/01362 Virknishøll í Finsen.

Viðv. listverkstaði í ovaru høllini í Finsen
Listgrafo hevur nú boðað frá, at tey taka av møguleikanum fyri at brúka ovaru høllina í Finsen og at tey ynskja samráðingar um avtalu uppá rímiligar treytir. Umsitingin metir, at tað er hóskandi at virksemi verður kombinerað við listgrafisk virksemi hjá Tórshavnar Kvøldskúla. Hetta verður fyri tað mesta avmarkað til stutt skeið og burdi væl kunna virka saman við virkseminum annars har. Eisini verður mett hóskandi at partur av hølunum verður gjørt tøkt til annað listarligt virksemi og at farið verður í dialog við Myndlistafelagið um menning av tí konseptinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara í samráðingar:
a). við Listgrafo um brúksavtalu um listagrafiskan verkstað í ovaru høllini og
b). við Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við Listgrafo og Myndlistafelagið um listaverkstøð í ovaru høllini í Finsen.

**Viðv. Listgrafo**
Felagið vísir á ymiskar vansar viðv. hølunum og vísir harumframt á, at vánirnar fyri kunna koma inn í hølini er væl út í 2019. Tí ynskir felagið heldur sum fremsta ynskir at bíða eftir at sleppa inn í hølið tey upprunaliga høvdu fingið uppskot til leigusáttmála um – nevniliga evningstovnuna undir Auluni í Finsen. Tey hølini eru í løtuni ein 3. fl. hjá Skúlanum á Fløtum og verða tøk aftur á sumri 2020. Onnur alternativ vildu verið í kjallarahæddini í Skansastovu, men er har avbjóðingin at Tøkum lætt hevur brúksavtalu um hølini einaferð um vikuna, umframt at felagið eisini nevnir høli í norðara bygninginum á Bacalao.

**Viðv. Myndlistafelagnum**
Dialogurin er nógv tengdur at viðurskiftunum hjá Listgrafo, ið fevnir um fleiri av somu fólkunum. Felagið arbeiðir samstundis saman við LISA viðv. møguleika fyri at fáa listaligt virksemi í Hoydølum, umframt at felagið nevnir møguleika fyri listaverkstøðum í norðara bygninginum á Bacalao. Felagið ynskir fegin at halda fram við dialoginum í næstum.

**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum av ovaru høllini**
Umsitingin greiðir frá kostnaðarmetingunum v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at lata Listgrafo sama leigusáttmála um evningstovnuna, sum felagið hevði í boði 2017, men galdandi frá sumri 2020, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoyti í máli 17/01362 Virknishøll í Finsen.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiniluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinni Brekkstein um, at hallirnar í Finsen verða brúktar til innandura spælipláss sum uppruna ætlanin var, og at peningurin verður játtaður til tað endamálið, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 atkvøðum ímóti og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen,  og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen,  og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 140/19 Virknishøll í Finsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 107/17 | 17/01362-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 174/17 | 17/01362-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 5/18 | 17/01362-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 357/18 | 17/01362-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 352/18 | 17/01362-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 17/01362-1 |
| 7 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 313/18 | 17/01362-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 84/19 | 17/01362-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 117/19 | 17/01362-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 150/19 | 17/01362-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 186/19 | 17/01362-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 207/19 | 17/01362-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 192/19 | 17/01362-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 140/19 | 17/01362-1 |

**Málslýsing:**
Í samgonguskjalinum er m.a. ásett: “**Framsøknan ítróttarpolitikk -** Ítróttur og rørsla hava stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi. Møguleikarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir bæði fyri breiddina og úrvalsítrótt.“

Nú Finsen í næstum verður liðugt, er hugsan frammi um at lata niðaru fimleikahøllina í Finsen (fyrrv. kommunuskúlanum) til virknis- rørsluendamál. Sí hjálagdar myndir og tekning av hølunum.

Høllin er partur av høvuðsumvælingin av Finsen til lestrarbústaðir hvat viðvíkur útveggum, vindeygum og taki, men er annars ogn hjá kommununi. Høllin fær hita frá Finsen. Samráðingar eru í gongd við Bústaðir um bygningsviðlíkahald uttan, hita o.a.

Skotið verður upp at høllin verður í dagtíð tøk hjá skúlanum og frítíðarskúlanum hjá Eindini í Kongagøtu hjá Skúlanum á Fløtum og frítíðarskúlanum í Sankta Frans skúla, umframt dagstovnum í økinum. Høllin kundi eisini í dag verið tøk hjá eldraøkinum at brúkt til virknistiltøk hjá Heilsuhúsinum. Eftir uml. kl. 16 ella 17 kundi høllin verið tøk at leiga hjá borgarum, fyritøkum o.s.fr., ímóti gjaldi at kunna brúka høllina til alskyns spæl, ítrótt, rørslu o.a., t.d. til fótbólt, kurvabólt, flogbólt, fimleik og aðra likamsvenjing.

Í sunnara enda av høllini er eitt goymslurúm, sum kann rúma ymiskum reiðskapi, tólum o.ø. Í norðara enda eru eisini rúm. Høllin kemur at vera hædd um hædd við virksemi á ovaru hæddini og er málið at hesi kunna og megna at virka lið um lið.

Sbrt. núverandi praksis vildu skúlarnir og frítíðarskúlarnir ikki rindað fyri nýtslu, meðan aðrir brúkarabólkar/eindir vera at rinda ásett tímagjald sbrt. galdandi gjaldsskrá hjá Ítróttaanleggum. Bílegging v.m. vildi farið fram á www.hallirvallir.fo. Hugsanin er at høllin sum útgangsstøði ikki verður disponerað til fast virksemi hjá t.d. hondbólts-, flogbólts- og fimleikafeløgunum.

Samskift hevur verið við teknisku fyrisiting/Húsaumsitingina um standin av hølunum v.m. Ætlanin er at halda fram við greiningunum og fáa endaliga avkláring í mai 2017. Sannlíkt er at ávísir kostnaðir eru av at fáa høllina brúkiliga.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða nærri frá fyribils metingum viðv. uppstartskostnaðum og rakstri av hølunum, umframt WC-bygninginum, ið er partur av hallunum. Málið er at raksturin í stóran mun kann verða fíggjaður av leiguinntøkum frá brúkarum.

Henda verkætlan vil innibera at verkætlanin um innandura spæliland í hallunum í Finsen (mál 16/02253) verður slept í hesum umfari.

Við hesi verkætlan ber til at fáa eitt viðkomandi virknishøli miðskeiðis í býnum, tøk til grannalagi, tey lesandi í Finsen, býin sum heild og soleiðis eitt nú stuðla undir visjónina um tann virkna og vakna høvuðsstaðin.

Um neyðugu fyritreytirnar eru til staðar er sannlíkt, at høllin kundi latið upp í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at viðgera og samtykkja, um farast skal víðari við fyrireiking av verkætlan um virknishøll í Finsen

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at farast skal víðari við fyrireiking av verkætlanini. Nevndin mælir til at kanna í hvønn mun til ber at hava atgongd til frítt spæl ávísa tíð í vikuni.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mikudagin.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva fyrireika arbeiðsætlan og kostnaðarætlan fyri virknishøllina. Sí hjálagt kostnaðarmeting, umframt skitsur. Talan er um metingar, ið skulu takast við ávísum fyrivarni. Eisini hevur verið samskift við Byggi- og umhvørvisdeildina viðv. fyritreytum og krøvum um í mun reglurnar í byggikunngerðini fyri Føroyar.

Samanlagt er samlaða metingin fyri hondverkaraútreiðslur (HVÚ) 1.458 tkr., umframt ráðgeving (ca. 6% av HVÚ) og ókent (ca. 15% av HVÚ) og MVG (6,25% av øllum postum). Hugsanin er at starvsfólk hjá Ítróttaanleggum kunnu gera nakað av arbeiðinum og sostatt spara nakað í metingini, umframt at møguliga eru einstakir postar sum kunnu takast út.

Málið hongur lutvíst saman við máli 16/03404, ið eisini er á skrá á fundinum og har tilmæli er at flyta uml. 941 tkr. frá aðrari verkætlan til hesa. Tískil vantar nakað av fígging til at kunna fremja verkætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera metingina við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um verkætlanina og fíggingina til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Sbrt. avtaluni við Bústaðir um Finsen skal TK taka sær av lonini har hallirnar eru.

Tilmæli um hallirnar er enn í gerð og er væntandi til komandi fund, bæði viðv. virknishøll og listaverkstøðum.

Samstundis rykkir Bústaðir eftir, at ljós kemur í serliga skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin og metir hetta ikki kann bíða. Eisini er støðan at hallirnar standa kaldar og eru ikki íbudnar hita í verandi støðu. Í áður gjørdari meting, er HVS -(útskifta radioatorar, montering o.a). arbeiðið mett til 50 tkr.

Íbinding hjá SEV, talva, montering, o.a. er mett til 94 tkr. til samans. Við tí fæst ljós í bygningin, skrellirúmið, vesirúmið og almenna garðin. Afturat upphædddunum skal roknast umleið 10% til eftirlit o.a., 10% til ókent, umframt kommunalt MVG. Tilsamans mett til 182 tkr. Húsaumsitingin og verkætlanardeildin samstarva um verkætlanina og at fáa arbeiðstakarar at útinna arbeiðið.

Á framflutta løgukarminum L00002 eru 1.051 tkr. tøkar til verkætlanina í hallunum í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini, deildarleiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fremja el&hvs arbeiði í Finsen og at flyta 1.051 tkr. á nýggja løgukontu til hallirnar í Finsen. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtyk at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Vísandi til mál 17/01362 Listaverkstøð í Finsen er aftur aktuelt at viðgera ætlanina um virknishøll í niðaru høllini í Finsen.

Fleiri fyrispurningar hava verið um innandura spæliland í Finsen, sum mentamálanevndin 11. apríl 2018 eisini viðgjørdi. Mett verður framvegis, at tær ætlanirnar ikki eru hóskandi til givnu karmarnar. Hinvegin kundi verið áhugavert at latið uttanhýsis veitara staðið fyri at gjørt nakrar royndir við tilboði um spæl og leik útvaldar dagar, men har uppsetingin er meiri avmarkað og letur seg samanseta við, at høllin annars eisini virkar sum virknishøll fyri skúla, frítíðarskúla og borgarar annars.

Til verkætlanirnar í hallunum í Finsen eru pt. tøkar: 1.051 tkr. Hetta røkkur neyvan til verkætlanirnar og verður helst neyðugt við eyka fígging til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at heimila umsitingini at fara undir útboð av umvælingararbeiðinum av niðaru høllini.

b). at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini í Finsen aftrat almennari nýtslu sum lýst omanfyri.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
**Viðv. útboði av umvælingararbeiðinum**
Tilgongdin er ávegis og væntast klár til næsta fund.

**Viðv. gerð av útboðstilfari til at reka virksemi við spæli og leiki í niðaru høllini**
Sí hjálagt uppskot til lýsing og rakstraravtalu til eina royndarverkætlan.
Á fundinum verða uppskotini gjøgnumgingin.

Hugsanin er at fara undir eina tilgongd, har áhugaði kunnu senda inn uppskot til konsept og virksemi og út frá tí verða 2-3 vald út til eitt endaumfar til at fáa møguliga avtalu við kommununa. Í hesum konseptinum liggur, at TK útvegar nærri tilskilað leikur, amboð v.m.

Ráðgeving frá fakpersóni til fyrireikingarnar
Hugsanin er at gera avtalu við ein fakpersón við vitan innan rørslu, børn og tøkni/innrætting til at ráðgeva TK viðv. málinum og at gera undankanningar viðv. hvat kundi verið hóskandi at fingið til vega. Hetta verður gjørt innan raksturin á kontu 1312 trivnaðarfyrisitingin.

Til komandi fund er ætlanin at hava eina nærri meting um væntaðan kostnað av tilboðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið til royndarverkætlan við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli um útbjóðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Umrøtt. Samtykt at umsitingini arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti**

Útboðstilfarið uppá høvuðsarbeiðstøkuna viðv. umvæling av niðaru høllini (og ovaru) fór út í farnu viku til tvey byggifeløg. Tilmæli um val av veitara verður ætlandi klárt til fundin 8. mai 2019.

Á fundinum í mentamálanevndini verður kostnaðarmeting løgd fram. Á kontu L57030 eru tøkar umleið 900 tkr., sum mett verður ikki røkkur til alt arbeiðið.

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Umsitingin kunnar um innkomnu tilboðini.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini og ovaru høllini (sí eisini mál 17/01361 listaverkstøð í Finsen – samtykt 13. januar 2019).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna.

Av tí at útlit ikki eru fyri fígging í hesum umfari til bæði ovaru og niðaru høllirnar, verður mett best at gera sáttmála um niðaru høllina fyrst og at málið um ovaru høllina verður tikið uppaftur í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2020 og langtíðarløguætlanina.

Sí hjálagt uppskot til arbeiðstøkusáttmála fyri niðaru høllina á tkr. 1.960.479.

Hartil koma koma útreiðslur til reinsing av veggum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. 627 tkr.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til 2.588 tkr.

Á projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið 900 tkr. tá frároknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Tískil er fíggjartørvurin til at gera niðaru høllina umleið 1.687 tkr. Í máli 18/02446 Ljósviðurskifti við Tórsbreyt verður mælt til at flyta 400 tkr. av projektkontu L57029 Smærri ítróttaanlegg til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen. Til resttørvin á 1.287 tkr. verður mælt til at flyta ta upphæddina av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn (íløgur).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f JJ Byggitænastuna á tkr. 1.960.479 um umvælingar av niðaru høllini í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm á 2.577 tkr.

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at flyta 1.287 tkr. av løgukontu 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur) til projektkontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva gjørt liðugt projekt fyri verkætlanina í niðaru høllini (virknishøll) og ovaru høllini (mál 17/01361 Listaverkstøð í Finsen).

Ráðgevin hevur síðani heintað inn undirhondstilboð frá Sp/f ÁTS og Sp/f JJ Byggitænastan. Sí hjálagt skjal við neyvari upplýsingum um tilboðsupphæddir og viðurskiftini annars.

Ráðgevin hevur síðani eftirkannað tilboðini og samskift við tilboðsgevararnar um tilboðini og mælir til at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS, um báðar hallirnar á 2.781.823 kr.

Hartil koma útreiðslur til reinsing av veggjum við turrísi, ráðgeving&eftirlit, ókent og kommunalt MVG mett til tils. kr. 897.000.

Samanlagt eru útreiðslurnar mettar til kr. 3.700.000.

Á løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen eru tøkar umleið kr. 900.000 tá frároknað útreiðslur til el-íbinding o.a., ið var samtykt í fjør. Restfíggjartørvur er sostatt kr. 2.800.000, ið kann fáast til vega við at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg ætlað betran av ljósviðurskiftum á Tórsbreyt, og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at gera arbeiðstøkusáttmála við Sp/f ÁTS á 2.781.823 um umvælingar av hallunum í Finsen og útinna verkætlanina innan ein samlaðan kostnaðarkarm uppá kr. 3.700.000,

b). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at flyta kr. 400.000 av løgukontu 57029 smærri ítróttaranlegg og kr. 2.400.000 av løgukontu 6175 Umsiting og rakstur av fastari ogn til løgukontu L57030 Hallirnar í Finsen.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentalamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum og mælir til at halda fast við upprunaligu ætlanina at brúka báðar hallirnar til innandura spælipláss.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Minnilutin viðmerkir, at hann ikki tekur undir við málinum og vísir ístaðin til uppruna ætlanina um at brúka hallirnar til innandura spælipláss.

# 141/19 Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 34/19 | 19/00411-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 31/19 | 19/00411-1 |
| 3 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 23/19 | 19/00411-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 176/19 | 19/00411-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 205/19 | 19/00411-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 190/19 | 19/00411-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 141/19 | 19/00411-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/03521 Útvega fleiri dagstovnapláss, har ein av ætlaðu verkætlanum er at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat. Ávíst fyrireikingararbeiðið hevur verið í hesum sambandi, har kostnaðarmetingar og tilboð eru fingin til vega fyri útbyggingini. Nú kommunan hevur leigað skúlalonina í Hoydølum og at talan er um stóra íløgu, verður mett skilabest, at arbeiðið verður boðið út á annan hátt, enn gjørt er. At annar leistur verður valdur kann hava við sær útreiðslur fyri kommununa um krav verður sett fram um gjald fyri útint arbeiði hesum viðvíkjandi.

Mett verður skilabest at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til tríggjuar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa).

Ætlanin er at byggja Býlingshúsið vesturi á Flat út við fýra nýggjum stovum, so at stovnurin fer at hava sjey stovur. Víst verður í hesum sambandi til mál 18/03848 Staðseting av nýggjum og víðkan av dagstovnum, har økið er sett av til endamálið. Krav til byggingina verður harumframt betri parkeringsumstøður í økinum.

Til tess at bjóða arbeiðið út, skal gerast útbjóðingartilfar, ið lýsir hølistørv, bygningskrøv, funktión v.m. Neyðugt er í hesum sambandi at seta av upphædd til fyrireikingar, ið mett verður kr. 100.000 ætlað ráðgeving, umframt samsýning til teir bjóðandi, ið ikki fáa arbeiðstøkusáttmála. Skotið verður í hesum sambandi upp kr. 75.000 í samsýning. Tilsamans er fíggjartørvurin til hesa tilgongdina kr. 250.000.
Á løgukarmi á grein 3 Børn og ung konta 3175 Barnaansing fyri 2019 eru í alt settar kr. 20 mió av til dagstovnar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at fáa heimild til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið at útbyggja Býlingshúsið vesturi á Flat í innbodnari lisitatión til tríggjar arbeiðstakarar sum heildarveiting (totalentreprisa), og at gera avtalu um ráðgeving í hesum sambandi. Harumframt verður mælt til at játta kr. 250.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing til nýggja løgukontu Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum vísandi til, at hon er ógegnið.

**Ískoyti:**
Greitt verður frá úrskurði viðvíkjandi innkomnu uppskotunum og tilboðunum.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Trý heildararbeiðstakaratoymi vórðu boðin í innbodna lisitatión at byggja út Býlings-húsið vesturi á Flat. Tvey tilboð komu inn.

Tvey tilboð komu inn við hesum handverkaraútreiðslum (HVÚ):

| | |
|---|---|
| Sp/f ÁTS | kr. 28.189.000,00 |
| Sp/f Búsetur | kr. 34.962.000,00 |

Tilboðini eru mett eftir hesum metingartættum:

1. Arkitekturur og landslag (15%)
2. Uppfylling av byggiskrá (25%)
3. Innrætting, funktión og spæliplass (25%)
4. Tilboðsupphædd (35%)

Niðurstøðan hjá dómsnevndini er, at Sp/f ÁTS fær flest stig og hevur samlað sæð eitt betri uppskot. Allir neyðugir hentleikar eru við og byggiskráin er væl fylgd. Innrættingin er nøktandi. Prosjektið kann tillagast nakað. Tilboðsprísurin og fermetrakostnaður er eisini nøktandi. – Sí annars fylgiskjal 1a Dómsnevnd niðurstøða, og fylgiskjal 2 Tekningar og myndir.

Samlað kostnaðarmeting, har tað aftrat HVÚ er roknað við byggiharraveitingum, ráðgeving, verkætlanarleiðslu, eftirliti, listprýði, innbúgvi, óvæntaðum og mvg, er kr. 36.477.998, sí fylgiskjal.

Í íløguætlanini fyri 2019 eru á løgukontu 3175 barnaansing kr. 18 mió tøkar umframt kr. 171.919 á løgukontu 3175 L31010 Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat og kr. 155.496 á løgukontu 3175 L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum. Í alt eru sostatt kr. 18.327.415 tøkar til byggingina. Fíggjartørvurin avrundað er sostatt kr. 18.150.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin fyri verkætlanardeildina mæla til at fara í endaligar samráðingar við Sp/f ÁTS um útbygging av Býlingshúsinum vesturi á Flat og at skriva undir endaligan arbeiðstøkusáttmála.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina til at játta kr. 18 mió av løgukontu 3175 løgukarmur L00001 og kr. 155.000 av løgukontu 3175 L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum at flyta á løgukontu 3175 L31010 Útbygging Býlingshúsið vesturi á Flat. Aftrat verður mælt til at játta kr. 18,15 mió á íløguætlanini fyri 2020 til endamálið, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Ein meiriluti Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus atkvøða blankt.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergunn Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neyst, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at tað ikki er ávist, hvussu byggingin skal fíggjast.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

## 142/19 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 201/14 | 14/04756-36 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 14/04756-36 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 221/17 | 14/04756-36 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 233/17 | 14/04756-36 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 231/17 | 14/04756-36 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 260/17 | 14/04756-36 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 262/17 | 14/04756-36 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 32/19 | 14/04756-36 |
| 9 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 29/19 | 14/04756-36 |
| 10 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 10/19 | 14/04756-36 |
| 11 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 64/19 | 14/04756-36 |
| 12 Mentamálanevndin | 24.04.2019 | 139/19 | 14/04756-36 |
| 13 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 104/19 | 14/04756-36 |
| 14 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 116/19 | 14/04756-36 |
| 15 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 89/19 | 14/04756-36 |
| 16 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 125/19 | 14/04756-36 |
| 17 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 142/19 | 14/04756-36 |
| 18 Fíggjarnevndin | | | 14/04756-36 |

### Málslýsing:

Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin

samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini ynskja hetta málið á skrá.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 09. September 2013:** Kunnað varð um málið.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðst í juni 2013 sendi Tórshavnar kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 fermetra stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll, hetta samsvarandi heimild í lógini um landsjørð § 7a.

Liðin eru skjótt fýra ár, har samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fiskimálaráðið øðrumegin og festararnar hinumegin. Upprunaavtalan var, at landið skuldi bera endurgjaldskostnaðin, meðan kommunan bar útreiðslurnar at byggja vøllin.
Enn hevur ikki borið til at finna semju um endurgjaldið til tann festaran, sum skal flyta virksemið av økinum og longur suður. Eftir áheitan tilnevndi sorinskrivarin uttanveltaðan

metingarmann, men semja fekst heldur ikki um sýns- og metingarskránna, ið er sjálv grundarlagið fyri metingini hjá metingarmanninum.

Ongar veruligar samráðingar hava verið síðani í fjør vár. Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutanum er skrivað, at saman við Tórshavnar Golffelag verður farið undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi. Í hesum sambandi verður málið nú tikið uppaftur.

Sum framgongur av málinum omanfyri, fyriliggur eitt verkætlanaruppskot um golfvøll við 18 holum, umframt driving range, ið er staðsett í fyrra grótbrotinum. Uppskotið stóð Edwin Roald, viðurkendur íslendskur golfvallararkitektur, fyri í samstarvi við kommununa og Golffelagið. Sí hjáløgdu verkætlanarlýsing.

Vøllurin skuldi tá byggjast í einum yvir eitt stutt áramál, tí hann skuldi verða liðugur til Oyggjaleikir 2019. Hetta er ikki longur aktuelt, og tí ber til sum liður í heildarætlan at skipa tilgongdina at byggja golfvøllin øðrvísi og yvir longri tíð.

Hetta er tilgongd, ið Golffelagið sjálvt vísir á sum gongda leið eitt nú soleiðis, at 1-2 hol (breytir) verða bygd hvørt árið, og har ávís upphædd samsvarandi verður sett á íløguætlanina.

Til tess at koma víðari, verður mett neyðugt, at samráðingarnar um leigu av lendinum og endurgjald tí viðvíkjandi verða tiknar uppaftur soleiðis, at málið verður loyst skjótast. Harumframt at heita á golfvallararkitektin um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við umboðum fyri kommununa og golffelagið.

Eingin játtan er tøk til golfvøll á íløguætlanini, men mett verður, at hetta fyrsta fyrireikandi tíðarskeiðið kann haldast innan verandi rakstrarkarmar, og at íløgujáttan verður at koma á fíggjarætlanini frá 2018.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka uppaftur samráðingarnar um leigu av lendinum til golfvøll. Harumframt verður mælt til at heita á golfvallararkitektin, sum í 2013 gjørdi uppskotið til golfvøll, um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við fimm umboðum, har fyrisitingingarnar hava hvør sítt og Tórshavnar Golffelagið hevur tvey.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til heildarætlan og yvirskipaða verkætlartilgongd verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**

Víst verður til uppskotið til tillagað verkætlan um bygging av golfvølli, ið løgd varð fram í mentamálanevndini 13. september 2017.

Golfvøllur við 9 holum fyrst
Sbrt. uppskotinum verður hildið fast við heildarætlan um golfvøll við 18 breytum/holum á Glyvursnesi, men har mælt verður til bygging í stigum, har fyrsta stigið er at byggja níggju hol árini 2018-2022, og at tað eftir hetta verður tikin støða til, hvørt farast skal víðari at byggja vøllin út til 18 hol beinanvegin ella seinni.

Fyri at skipa byggiarbeiðið best er tilmælið, at trý hol verða bygd um árið uttan íhald soleiðis, at tað í 2022 eru 9 hol tøk. Hetta hevur eisini tann ítróttaliga fyrimun, at til ber at spæla golf samstundis, har tey fyrstu trý holini væntandi eru klár í 2020, seks hol í 2021 og níggju hol í 2022.

Verkætlanarbólkurin, sum eru fyrisitingarstjórarnir og tvey umboð fyri golffelagið, tekur undir við hesi tilgongd. Henda bygging kann í stórum øll fremjast í tí syðra økinum av Glyvursnesi, sum sambært byggisamtyktini longu er lagt út sum D2 økið, tvs. ítróttarøki. Hetta økið er uml. 270.000 m2.

Kommunan sendi í 2013 samsvarandi áseting í grein 7a í lóg um landsjørð umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 m2 stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll við 18 holum. Við broyttu tilgongdini, har byrjað verður at byggja 9 hol, ber til at tillaga umsóknina um leigu soleiðis, at økið bert fevnir um teir uml. 270.000 m2.

Integrera golfvøll við tyrving og havnarútbygging
Sum liður í heildarætlanini fyri golfvølli við 18 holum, verða í frágreiðingini eisini umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina bæði við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum, har mett verður, at til ber at skapa felags ágóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri golfvøllin ítøkiliga vil tað eitt nú merkja, at til ber at byggja suðureftir, har lendið er ikki so avbjóðandi sum á norðara partinum, og inn í umskapaðu grótbrotini og harvið spara lendi. Í frágreiðingini verður víst á dømi úti í heimi tí viðvíkjandi, og mælt verður til, at ymsu kommunalu áhugapartarnir og polilitiska skipanin viðgera perspektivini í hesum.

Verkætlanarbólkurin tekur sum heild undir við hesi tilgongd, men ásannandi, at talan er um viðurskifti, sum kunnu taka langa tíð, verður mælt til, at politiska skipanin setir út í kortið heildarætlan fyri Glyvursnes, harundir, hvat gerast skal við grótbrotini og møguliga integratión við golfvøllin.

Smart Range
Eisini sum liður í at spara lendi í fyrsta byggistigi, verður í frágreiðingini skotið upp at fáa til vega sonevnt Smart Range, sum er innandura golfsimulator. Smart Range er tilgild loysn, sum í ávísan mun kann koma í staðin fyri ella supplera ein vanligan driving range, sum er stórur og lendiskrevjandi venjingarvøllur.

Fyrimunur við Smart Range er harumframt, at tað nýskapandi háttur at introdusera golfspælið bæði til børn, vaksin og eldri, at skapa forvitni og draga nýggjar íðkaðar til føroyska golfumhvørvið. Ein Smart Range kann setast upp í hølum so at siga hvar sum helst.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við at fáa til vega Smart Range í øllum førum sum partur av fyrsta byggistigið.

Tíðarætlan og kostnaðarætlan
Uppskotið er, at verkætlanin í 2018 verður nærri prosjekterað og designað, at byrjað verður at byggja trý tey fyrstu holini, og at Smart Range verður sett upp í býnum. Í 2019 verða hesi holini gjørd liðug og byrjað verður uppá trý tey næstu. Og so heldur arbeiðið fram soleiðis, at øll tey níggju holini eru liðug og klára at spæla á í 2022.

Samlaði kostnaðurin er mettur til uml. kr. 27 mió, har metti tørvurin fyri 2018 er kr. 4 mió. Harumframt skulu gerast gøtur og amboðsbygningur.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við tíðarætlanaruppskotinum, sum tó má taka støði í teirri fígging, ið játtað verður til golfvøllin hesi árini. Í løtuni er eingin fígging sett av til endamálið burtursæð frá teimum kr. 300.000, ið settar eru av til fyrireikingar í inniverandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at:

- uppruna golfvallarætlanin verður tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum, men tó so, at tað skal bera til at byggja vøllin út til 18 hol seinni
- senda Búnaðarstovuni nýggja umsókn um leigu av lendi svarandi til syðra D2-økið á Glyvursnesi, í alt uml. 270.000 m2, ætlað til golfvøll við 9 holum
- fáa til vega nærri politiska støðutakan til møguleikan at integrera næsta byggistig til 18 hol við grótbrotini og samskipast við aðrar kommunalar verkætlanir har til tess at skapa felags ágóðar sum liður í heildarætlan fyri Glyvursnes
- fyrireika útvegan av Smart Range, og at
- ætlan fyri fígging verður løgd í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur seinni.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.
**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Útsett

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti:**
Við støði í løgtingslóg um landsjørð § 7a hevur kommunan tvær ferðir søkt Búnaðarstovuna um at leiga lendi á Glyvursnesi til golfvøll. Nevnda lógargrein ásetir, at Búnaðarstovuni verður heimilað at taka aftur nýtslurætt frá festara til lendið, tilhoyrandi festi, og leiga kommunu lendið til almannagagnligt endamál. Verður nýtslurættur til lendið tikin aftur, skal kommunan rinda fult endurgjald.

Fyrru ferð var í juni 2013, tá býráðið tók undir við verkætlanaruppskoti um golfvøll við 18 holum við samlaðum lendistørvi uppá uml. 630.000 m2, har nógv tann størsti parturin er í Glyvurshaga (festari Sjúrður Patursson), ein nógv minni partur í Kirkjubøhaga fyri handan (festari Poul Müller), umframt táverandi grótbrot.

Frammanundan høvdu landsstýrið og kommunan avtalu um, at landið skuldi bera part av endurgjaldinum til festaran. Í tí sambandi játtaði løgtingið kr. 4 mió í fíggjarlógini 2015 til endamálið. Samráðingarnar um endurgjald bóru ikki á mál, og játtanin í fíggjarlógini er síðani dottin burtur.

Í 2017 varð lagt fyri býráðið tillagað verkætlanaruppskot um golfvøll við í fyrsta umfari 9 holum, sum allur kundi gerast innanfyri verandi byggisamtykt í Glyvurshaga. Við støði í hesum varð søkt av nýggjum um lendi stórt uml. 270.000 fermetrar í Glyvurshaga.

Samráðingar vórðu tiknar upp aftur í 2018. Avtalað varð í hesum sambandi at taka støði í lendistørvi, ið svarar til ein golfvøll við 18 holum, tí hetta kortini verður endamálið.

Tó er í hesum umfari valt at avgreiða viðurskiftini við Glyvurshaga fyrst, sum eisini er nógv mest umfevnandi bæði viðvíkjandi avleiðingum fyri virki festarans og sjálvari endurgjaldsupphæddini. Tá golfvallarverkætlanin komandi árini er neyvari ment og projekterað, kann nýggj meting gerast um tørvin at leiga ávíst lendi í Kirkjubøhaga fyri handan eisini.

Vísandi til broyttu umstøðurnar á Glyvursnesi, har kommunan keypti lendið til nýtt grótbrot í sambandi við havnarútbyggingina, vil Búnaðarstovan hava kommununa at keypa gamla grótbrotið úr festinum. Hetta er somuleiðis tikið við í sáttmálauppskotið.

Sáttmálapartarnir eru Búnaðarstovan, festarin Sjúrður Patursson og Tórshavnar kommuna.

**Sáttmálauppskotið um lendi til golfvøll**
Gjørt er kort yvir Glyvursnes, sum lýsir stødd á lendi, longdir á nýggjari girðing, uppdyrkingarvegi o.a., sum ymisk endurgjøld taka støði í, sí fylgiskjal 1 í sáttmálunum. Eisini framgongur staðseting av nýggjum seyðahúsi, nýggjum dyrkaðum lendi v.m.
Við hesum sáttmálanum leigar kommunan í alt 522.000 m2 í 30 ár. Leigumálið kann leingjast. Festarin missir við hesum nýtslurættin til hetta lendið, og tí er neyðugt hjá festaranum at flyta alt virksemið av økinum. Í hesum sambandi skal endurgjaldast fyri at velta upp úr nýggjum uml. 46.000 m2, gera nýggjan uppdyrkingarveg 578 m og nýggjar girðingar í alt uml. 4.000 m. Eisini skal endurgjaldast fyri mist bit. Endurgjøld fyri øll hesi viðurskifti er uml. kr. 3,1 mió.

Gjørt verður harumframt gerðabýti fyri fastar ognir. Kommunan yvirtekur verandi seyðahús og maskinhøll hjá festaranum. Festarin byggir nýtt seyðahús við maskinhøll 13,6 x 34 m, ið er kostnaðarmett til uml. kr. 6 mió., ið kommunan skal endurgjalda.

Haraftrat keypir kommunan gamla grótbrotið, sum er uml. 66.000 m². Tá dagsvirðið av áður inngoldnum gjøldum fyri tøku av gróti í gamla grótbrotinum tíðarskeiðið 1986-2016 er drigin frá, verður keypskostnaðurin uml. kr. 612.000.

Samlaða virði av sáttmálanum er kr. 9.843.016, ið skulu falla til gjaldingar í fjórðingum árini 2019-2022, tað er uml. kr. 2,46 mió um árið.

Leigusáttmálin fyri lendið kostar í løtuni kr. 5.000 um árið. Hóast sáttmálin verður settur í verk í ár, hevur festarin nýtslurætt av bygningum og lendi til í seinasta lagi 31.

desember 2022, tá øll arbeiði festarans sambært sáttmálanum skulu vera avgreidd. Kommunan skal seta upp girðing kring golfvøllin uml. 1.350 m. Henda útreiðsla, sum mett er til uml. kr. 200.000, er ikki partur av sáttmálanum.

Sáttmálin er endaliga treytaður av øðrum myndugleikaloyvum og krøvum, harundir friðingar- og byggimyndugleikum.

Sum lýst omanfyri varð avtalað gjørd við landsstýrið um fígging av endurgjaldinum. Nú sáttmáli eftir ætlan verður gjørdur um hesi viðurskifti, eigur kommunan at taka málið um fígging av endurgjaldinum uppaftur við landsstýrið til tess at staðfesta, um landsstýrið stendur við hesa avtalu. Hetta hevur aftur týdning fyri, hvør endaliga endurgjaldsupphæddin hjá kommununi verður at fíggja. Verður upphæddin tann sama, sum løgtingið játtaði í 2015, er fíggjartørvurin hjá kommununi til endurgjaldið kr. 5,85 mió, ella uml. kr. 1,46 mió um árið. Hetta verður tó ikki staðfest enn.

**Víðari verkætlanartilgongd**
Tá sáttmálin er góðkendur endaliga av øllum pørtum, ber til hjá kommununi at arbeiða meira ítøkiligt við golfvallarverkætlanini. Fram til og við 2022 verður ítøkiligt lendisarbeiði tó at samskipa við virksemi festarans á økinum.

Næsta stig er at gera ráðgevarasáttmála við golfvallararkitektin, har fyrstu arbeiðini verða prosjektering av lidnum golfvallarsniði samsvarandi ætlaðum byggistigum, harundir kostnaðarætlan býtt yvir ár. Seinni skal støða takast til, hvussu farast skal fram viðvíkjandi útbjóðing av lendisarbeiði v.m.

Í hesum sambandi skulu eisini neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikum og byggimyndugleikanum fáast til vega. Býráðið hevur samtykt at broyta byggisamtyktina fyri Glyvursnes ætlað golfvølli, har ávíst øki á Glyvursnesi verður broytt til D2 øki (mál 19/00427). Málið er í løtuni til almenna hoyring.

Higartil hava tvey umboð fyri Tórshavnar Golffelag tikið lut í arbeiðsbólki saman við kommununi. Uppgávan hevur í høvuðsheitum verið samskipan og at fáa til vega tey bæði verkætlanaruppskotini, ið gjørd eru. Mett verður skilagott, at umboð fyri golffelagið halda fram í víðari menningini av golfvallarverkætlanini. Sjálv verkætlanin verður leidd av verkætlanardeildini.

**Fígging**
Á løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur eru kr. 147.000 tøkar. Í málið 19/00144 er

raðfest játtan til golfvøll o.a. kr. 1.050.000 á L57016 Smærri ítróttaranlegg. Írestandi fíggjartørvur til tess at rinda endurgjaldið í inniverandi ári er kr. 1.264.000. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað við at flyta kr. 1 mió. av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión, og kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg.

Í langtíðar íløguætlanini er lagt upp til fígging til golfvøll. Umframt fígging til endurgjaldið, eigur hædd eisini at takast fyri fígging til at prosjektera og byggja sjálvan golfvøllin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja sáttmálan um lendi til golfvøll á Glyvursnesi og í hesum sambandi at játta kr. 2.460.754 hvørt árið 2019, 2020, 2021 og 2022 á kontu 5775 ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur til tess at fíggja endurgjaldið sambært sáttmálanum.

Mælt verður eisini til, at gjaldið fyri 2019 verður fíggjað soleiðis:

- kr. 147.000 á løgukontu L57016 Golfvøllur
- kr. 1.050.000 av raðfestari játtan til golfvøll o.a. á løgukontu L57029 Smærri ítróttaranlegg
- kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg
- kr. 1.000.000 av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at heita á landsstýrið um fígging til endurgjald samsvarandi avtaluni við kommununa tí viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til tvær viðgerðir í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019**: Einmælt samtykt**.**
Marin Katrin Frýdal fór av fundinum vegna ógegni og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.

# 143/19 Gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin, matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 20.05.2019 | 5/19 | 19/01973-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 191/19 | 19/01973-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 143/19 | 19/01973-3 |

**Lýsing av málinum:**
Byggi- og Umhvørvisdeildin heitir á gøtunavnanevndina um at finna eitt gøtunavn til nýggja útstykking við Villingardalsvegin í Havn, sum Tórshavnar kommuna hevur góðkent.
Talan er um matr. nr. 1345a, 1346a og 1347a. Útstykkingin hevur vegatkomu frá Villingardalsvegnum. Hædd er tikin fyri, at trøðin sunnanfyri, matr. nr. 1344a, kann knýtast uppí útstykkingina.

Kort eru hjáløgd.

**Gøtunavnanevndin 20. mai 2019:** Nevndin mælir til, at gøtunavnið verður «Ryskigøta».

Ryski er planta í sevættini og veksur í haga og fjallalendi. Navnið er kent t.d. í Ryskivatni.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

## 144/19 Gøtunavn til nýggja útstykking á Argjum, matr. nr. 32a og 135a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 10.05.2019 | 3/19 | 19/01612-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 20.05.2019 | 4/19 | 19/01612-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 190/19 | 19/01612-2 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 144/19 | 19/01612-2 |

**Lýsing av málinum:**
Heitt er á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti um gøtunavn til eina nýggja privata útstykking á Argjum, sum Tórshavnar kommuna hevur góðkent. Talan er um matr. nr. 32a og 135a. Útstykkingin hevur vegatkomu frá Garðsgøtu, víst við reyðum píli á hjáløgdum mynd/korti.
Hjáløgd eru kort og upplýsingar um fyrsta eigaran.

**Gøtunavnanevndin 10. mai 2019:** Nevndin umrøddi málið, og avgjørt varð at taka málið upp aftur á næsta fundi.

**Gøtunavnanevndin 20. mai 2019:** Nevndin mælir til, at gøtunavnið verður «Garðstún».

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:**Einmælt samtykt.

# 145/19 Klippfisk - eftirmeting og framtíð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 222/15 | 15/04140-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 264/16 | 15/04140-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 287/16 | 15/04140-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 304/16 | 15/04140-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 13.02.2017 | 29/17 | 15/04140-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 51/17 | 15/04140-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 230/18 | 15/04140-3 |
| 8 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 12/19 | 15/04140-3 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 111/19 | 15/04140-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 187/19 | 15/04140-3 |
| 11 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 145/19 | 15/04140-3 |

**Málslýsing:**
Nevndin í Klippfisk hevur á fundi handað mentamálaleiðaranum skjalið "Staðseting og Rakstrarjáttan, 28.10.2015". Skjalið viðger m.a. hølisviðurskifti og virksemi hjá Klippfisk og rakstrarjáttanina frá Tórshavnar kommunu. Skjalið er viðheft.

Eisini eru hesi skjøl viðheft: Álitið "Filmshúsið - Føroyskur filmur á einum vegamóti", (2015) og "Klippfisk – Skulu havnarfólk framvegis hava møguleikan at gera film" (2006).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at mentamálanevndin umrøður tilfarið, soleiðis at fyrisitingin kann fyrireika málið til nevndina at viðgera og taka støðu til.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur saman við Kvøldskúlanum havt samskifti við Klippfisk um framtíðar skipan og innihald av virkseminum, útgerðar- og hølistørv. Sí hjálagt 2 upprit frá Klippfisk. Ein høvuðsspurningur er í hvønn mun skal kommunan fíggjað keyp av nýggjari filmsútgerð og í hvønn mun skal grundjáttanin hækkað nakað.

Eisini hevur verið kannað um Klippfisk framyvir kundi verið hýst saman við Hugskotinum og herundir eisini komandi Filmshúsinum. Ein møguleiki er í skrivstovuhølunum í Bacalao-bygninginum á Vestaru bryggju. Talan er um skrivstovuhølið, ið áður vóru brúkt av felagnum P/F Fiskavirking og sum hava staðið ónýtt í fleiri ár nú. Ikki er avklárað endaliga millum

umsitingina og Tórshavnar Havn, herundir Vinnunevndina, um hetta letur seg gera og uppá hvørjar treytir. Hetta verður kannað í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppritini hjá Klippfiski við atliti til virksemi og neyðugu fíggingina og at umsitingin kemur við einum endaligum tilmæli til fundin í mentamálanevndini 2. november 2016.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin hevur umrøtt málið, og mælir til at verkætlanina við Bacalao-bygninginum verður framd í verki.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fyrireika málið víðari og havt fund við Klippfisk-nevndina. Leiðarin á Hugskotinum, leiðarin á Kvøldskúlanum og umboð fyri Klippfisk-nevndina hava gjørt tilmæli um framtíðar koncept fyri Klippfisk. Sí hjálagt upprit/tilmæli.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppritið við atliti til uppskotið um bygnað, innihald og fíggjarliga raðfesting, soleiðis at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til komandi fund.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 13. februar 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Sí hjálagt dagført upprit, ið leiðarin á Kvøldskúlanum, leiðarin á Hugskotinum hava gjørt saman við nevndini fyri Klippfisk.

Sum framgongur er talan um, at Klippfisk kemur at halda til í hølunum hjá Hugskotinum í Sjóvinnuhúsinum. Møguliga kemur Filmshúsið, sum landsstýrið ætlar at seta í verk, eisini at halda til har.

Í hesum sambandi hevur Klippfisk nýggjar útreiðslur serliga til hølisleigu og til uppgávur, sum Hugskotið tekur á seg vegna Klippfisk. Samlaður játtanartørvur sambært kostnaðarmeting í uppritinum er kr. 540.000. Stuðulin, ið mentamálanevndin vanliga hevur játtað til Klippfisk, er kr. 250.000.

Mett verður, at uppskotið til fíggjarætlan er heldur høgt.

Mett verður, at uml. kr. 400.000 kann bera til í núverandi fasu. Grundarlagið undir Klippfisk bæði í mun til virksemið og útgerð verður tryggjað og týðiliga raðfest, eins og leikluturin hjá Hugskotinum í mun til Klippfisk kann byggjast upp og tillagast tøka karminum.

Vísandi til kostnaðarætlanina í uppritinum verður skotið upp, at tær kr. 400.000 til Klippfisk verða býttar á umleið hesar upphæddir:
- Keyp av útgerð kr. 125.000
- Leiga høli kr. 80.000
- Umsiting, samskipan, verkætlanarleiðsla v.m. Hugskotið kr. 125.000
- Klippfisk ráðgeving v.m. kr. 50.000

- Klárgerð av hølum kr. 20.000

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja framtíðar ætlanina fyri Klippfisk, tó við teirri broyting at fíggjarkarmurin verður 400 tkr.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, umframt at tilboðið skal eftirmetast árliga.

**Ískoyti:**
Klippfisk hevur gjørt frágreiðing um virksemi (sí hjálagt), umframt skjal við skeiðum, ið Klippfisk ætlandi kemur at hava saman við Kvøldskúlanum komandi skúlaár (sí hjálagt). Ætlanin er í heyst at fara í ein víðari dialog við Klippfisk-nevndina um virksemi og framtíðar ætlanir.

Á fundinum framleggur umsitingin tilfarið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Royndartíðin fyri Klippfisk sum samtykt á várið 2017 er nú runnin. Umsitingin hevur havt eftirmeting og fund við leiðaran í Hugskotinum og samskiparan fyri Klippfisk. Sí hjálagt frágreiðing um virksemi. Nevndin í upprunaliga Klippfisk hevur virkað sum ráðgevandi og hevur boðað frá at tey mæla til at gera eina breiðari ráðgevandi nevnd framyvir umboðandi fleiri partar innan filmsøkið. Farið verður ætlandi undir ta tilgongdina í næstum og koma í nevnd við einum tilmæli tí viðvíkjandi í feb. 2019.

Dagliga umsitingin av Klippfisk er framhaldandi ætlað at liggja hjá Hugskotinum og verður játtanin flutt til Hugskotið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja framtíðar ætlanina fyri Klippfisk, tó við teirri broyting at fíggjarkarmurin verður 450 tkr.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í dialogi við nevndina í Klippfisk (limafelagnum), Hugskotið, Kvøldskúlan um nýggja samstarvsavtalu fyri Klippfisk. Eisini hevur KVF ynskt at koma við í samstarvið og at dentur verður lagdur á dokumentarisu. Hetta hevur verið væl móttikið av hinum pørtunum.

Úrslitið er hjálagda avtaluuppskot og má sigast at vera sera jaligt at KVF vil gerast partur av átakinum við bæði útgerð, vitan og kørmum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 597 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við hjáløgdu samstarvsavtalu.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:**Einmælt samtykt**.**

# 146/19 Stovnsetan av listaráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 11/19 | 18/03747-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 43/19 | 18/03747-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 42/19 | 18/03747-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 75/19 | 18/03747-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 63/19 | 18/03747-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 146/19 | 18/03747-1 |

**Upprunin til málið:**
Forkvinnan í mentamálanevndini Gunvør Balle.

**Samandráttur**
Ætlanin er at stovnseta eitt ráðgevandi listaráð í sambandi við list í býarrúminum og at virksemi hjá verandi listabólki verður skipað í einari samlaðari reglugerð og skipan.

**Lýsing av málinum**
Visjónin fyri Tórshavnar Listaráð er, at Tórshavnar kommuna við greiðum listaprofili kann geva kommununi enn størri dám av serligum estetiskum samleika og verða kend sum ein kommuna við livandi list og serstøkum býarrúmum, ið kunnu stuðla undir visjónini um okkara høvuðsstað – virkin og vakin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/04195 Stovnsetan av ráðgevandi listaráði.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fundarpeningur verður latin uttanhýsis limunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti**
Hjálagda uppskot er ein roynd at gera eina samlaða reglugerð og skipa eitt nýtt ráðgevandi listaráð í mun til býarrúm og samstundis varðveita verandi listabólk, ið stendur fyri ítøkiligum útboðum og innkeypi av list.

Útyvir ráðgeving um list, er eisini hugsanin at møguleiki skal vera fyri at spyrja ráðið um ráð í mun til onnur mál og verkevni innan mentan og list.

Málið hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar. Uttanhýsis umboðini fáa fundarpening sbrt. galdandi reglum.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Sbrt. § 3, stk. 1. í reglugerðini fyri Tórshavnar Listaráð tilnevnir býráðið tríggjar uttanhýsis ráðslimir fyri føroyska listafrøði, har Arkitektafelag Føroya, Føroysk Myndlistafólk og LISA mæla til hvør sín lim í ráðið. Við atliti til grein 8 í javnstøðulógini eru feløgini biðin um at mæla til tveir limir hvør – ein av hvørjum kyni. Umframt hesar tríggjar limirnar eru 2 limir frá umsitingini.

Feløgini mæla til at velja millum fylgjandi:

- Arkitektafelagið Føroya mælir til at velja antin Medunu Dalsgarð ella Eyðun Eliasen

- Føroysk Myndlistafólk mælir til at velja antin Randi Samsonsen og Jón Sonna Jensen
- LISA mælir til at velja antin Katrinu í Geil og Knút H. Eysturstein

Sbrt. § 3, stk. 2. velur býráðið forfólk í ráðnum millum kommunalu umboðini (t.e. antin býararktitekin ella listaábyrgdarhavandi í kommununi).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja forfólkið og ein lim fyri hvørt av feløgunum samsvarandi reglugerðini og við atliti at javnstøðu.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Vald eru Eyðun Eliasen, Randi Samsonsen, Knút Háberg Eysturstein og samtykt at velja Biritu Wardum sum forkvinnu í Listaráðnum.

# 147/19 Umstøðurnar kring tennisøkið í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 249/18 | 18/01726-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 257/18 | 18/01726-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 351/18 | 18/01726-4 |
| 4 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 314/18 | 18/01726-4 |
| 5 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 135/19 | 18/01726-4 |
| 6 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 154/19 | 18/01726-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 188/19 | 18/01726-4 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 147/19 | 18/01726-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Havnar Tennisfelag (HTF)

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið ynskir at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins í Gundadali, herundir nýggja breyt, goymslu, ljós o.a.

Felagið er upprundaliga stovnað í 1934, men í longri tíðarskeið var onki virksemi inntil felagið var endurreist í 1996, tá hevði tennisvirksemi verið nøkur ár skipað innan Havnar Badmintonfelag á nýggjum tennisvallunum í Gundadali frá 1990. Vallirnir eru at kalla óbroyttir síðani tá og metir felagið at tíðin nú er komin at betra um karmarnar. Felagið hevur júst mannað nevndina av nýggjum og nýggjur høvuðsvenjari er settur í eitt ár, ið skal taka sær av regluligum venjingum summar og vetur, umframt gera fyrireikingar til Oyggjaleikirnar 2019. Eitt sersamband Tennissamband Føroya er sett á stovn í samráð við ÍSF. Ætlandi verður FM aftur skipað og ymisk átøk fyri at fáa fleiri limir afturat teimum 32 verandi limunum.

Ítøkiliga ynskir felagið at fáa gjørt fylgjandi:
- Nýtt felagshús
- Leggja graslíki á verandi vallir (verandi belægningur er ikki góður í vátum veðri) og sostatt fáa fleiri venjingartímar í árinum
- Fáa ein vøll afturat teimum báðum verandi, so fleiri fáa vant í senn
- Betra um ljósviðurskiftini, so spælast kann størri part av degnum og árinum

Uppá sikt kundi felagið hugsa sær at spurningurin um eina innandura tennishøll var tikin upp.

Felagið hevur fylgjandi uppskot til fígging:

- Graslíki leggjast á verandi vallir. HTF hevur móttikið tilboð fyri 2 vallir á 285 tkr. uttan mvg og toll. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %.
- Ljósprojektørar setast upp við vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Ítøkilig meting er ikki gjørd enn! Eitt fyribils boð er eini 100 tkr.
- Ein vøll afturat eystanfyri verandi vallirnar. Søkt verður um at kommunan fíggjar 100 %. Neyvari meting má gerast av kostnaðinum.
- Nýtt felagshús verður bygt (sí tekningar). Eingin ítøkiligur kostnaður fyriliggur, men ein mettur prísur er 1.600 tkr. (80 m2 x tkr. 20). HTF eginfíggjar 400 tkr., svarandi til 25 %. Søkt verður um at kommunan kann stuðla við restini, uml. 1,2 mió. kr.

Umsitingin metir at í sjálvum sær er talan um eina áhugaverda og viðkomandi verkætlan, ið er ætlað at bera eina lítla ítróttagreina víðari fram á leið, bæði hvat viðvíkur hentleikum og møguleikum fyri venjing o.a. Tó so at tríggir vallir ikki eru nokk til møguligar komandi Oyggjaleikir.

Í verandi støðu eru ikki avsett játtan til gerð av nýggjum vølli, felagshúsi, meðan at ætlanin um at skifta belægning á verandi vallum møguliga kann greiðast innan raksturin hjá Ítróttaanleggum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 18/01964 Nýtt spælipláss í Gundadali og mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið v.m.

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Nakað í sambandi við bygging o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið fer ætlandi at vera viðgjørt víðari saman við Býarskipanardeildini, teknisku deild v.fl.)

**Skjøl**
Framløga um virksemi felagsins v.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til beina spurningin um staðseting av møguligum eyka tennisvølli og felagshúsi í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisiting og trivnaðarfyrisitingin hava reist málið 18/03453 Skipan av Gundadali, ið snýr seg um at fáa uttanhýsis ráðgeva til at menna eina heildarætlan yvir ítróttaøkið í Gundadali.

Í økinum halda flestu ítróttagreinar til, og skal heildarætlanin lýsa hvussu Gundadalur kann rúma øllum virksemi á økinum, umframt møguligum nýggjum virksemi. Staðsetan av virksemi hjá tennisfelagnum er natúrligur partur av hesi heildarætlanini.

Í hesum sambandi hevur býarskipanardeildin mælt til, at uttanhýsis ráðgevin, ið kemur at standa fyri verkætlanini, skal kanna og finna uppskot til staðsetingar av virksemi hjá tennisfelagnum.

Í málinum **18/03453 Skipan av Gundadali** verður skrivað soleiðis:

*"Tennis er ein ítrótt í menning. Tennissamband Føroya er nýtt sersamband, sett á stovn í samráð við ÍSF. Havnar Tennis Felag hevur sett nýggjan høvuðsvenjara, sum skal taka sær av at gera fyrireikingar til Oyggjaleikir 2019, og ynskir Tennisfelagið at fáa endurnýggjað og betra um karmarnar fyri virksemi felagsins"*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at lata uppgávuna um staðseting av virksemi hjá Tennisfelagnum til ráðgeva, ið stendur fyri málinum "Skipan av Gundadali" og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Havnar Tennisfelag hevur meldað út, at felagið fegin vil fáa skift belægningin á verandi breytum og um tað verður gjørt nú í næstum, so tað fer at bera til at spæla og venja komandi sesong.

Tilber hjá veitara at koma í juni og tekur arbeiðið eini 2 vikur. Felagið ynskir at TK rindar 100% av arbeiðinum, ið er mett til umleið 285 tkr. umframt MVG.

Við hesum er spurningurin um eina triðju breyt meiri ella minni sleptur. Í næstum kemur málið um skipan av Gundadali fyri í nevndunum og er har sum er ikki lagt upp til at ein triðja breyt skal koma afturat.

Felagið ynskir harumframt at montera ljós við vøllin og gera eitt felagshús. Málið um skipan av Gundadali kemur eisini inn á tann spurningin.

Verandi breytir trongja til endurnýggjan og útlit fyri aðrari staðseting ella møguligari høll eru longri frammi í tíðini. Tískil er helst skilagott at fáa gjørt verandi anlegg betri.

Hóskandi er at fara í dialog við felagið og gera eina samstarvsavtalu um skipan av anlegginum og býtið millum TK og felagið um útreiðslurnar fyri m.a. endurnýggjan av

breytunum. Møgulig fígging kann vera av kontu 5370 Stuðul til íløgur og/ella partvíst frá Ítróttaanleggum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at gera uppskot til samstarvsavtalu og herundir kostnaðarbýtið og koma aftur í nevnd við úrslitinum til komandi fund.

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við Havnar Tennisfelag um málið. Uppskot til avtalu (sí hjálagt) er gjørt, ið inniber fylgjandi:

a). at HT og TK deilast um at rinda fyri útskifting av verandi belægningi í lutfallinum 50%/50% og at kommununar partur verður rindaður av Ítróttaanleggum kontu 5717.

b). at TK innan í 2020 fær betra um ljósviðurskiftini við tennisvøllin og rindar fyri tað. Metingin er at arbeiðið kostar umleið 80-100 tkr. Ætlanin er at skjóta upp at arbeiðið verður fíggjað av konto 5775 smærri ítróttaanlegg í 2020. Ætlanin er at loysnin skal vera sámulig og ikki innibera órógvandi ljósdálking fyri grannalagið.

c). at TK innan 2020 útvegar eina fyribils bingju til fyribils klubbhús við tennisvøllin. Arbeitt verður við at finna hóskandi og ódýra loysn. Loysnin er treytað av at byggivaldið góðkennir staðsetingina og at TK finnur eina hóskandi fyribils loysn.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu avtalu við Havnar Tennisfelag.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 148/19 Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 18/19 | 18/04368-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 48/19 | 18/04368-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 95/19 | 18/04368-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 146/19 | 18/04368-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 203/19 | 18/04368-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 210/19 | 18/04368-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 189/19 | 18/04368-1 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 148/19 | 18/04368-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hjálagt er skjal til mentamálanevndina at umrøða við atliti til, at umsitingin ger tilmæli til nevndina at taka støðu til á hesum og komandi fundum. Skjalið er eitt yvirlit yvir felagsskapir og stovnar á mentanar- og ítróttaøkinum, ið fingu rakstrarstuðul í farna ári.
Umsóknir koma frá øðrum eisini, og mentamálanevndin samtykti í 2018, at Tórshavnar Big Band og Aldubáran verða tikin við í viðgerðina fyri 2019.
Viðv. fótbóltsfeløgum kann nevnast, at felagið Undrið FF nú eisini hevur ungdómslið og tí eigur at koma við í býtið av rakstrarstuðlinum.

Viðv. Havnar Sjónleikarfelag
Uppskot til samstarvsavtalu við Havnar Sjónleikarfelag fyri 2019 er viðheft. Sambært avtaluni verður stuðulsupphæddin goldin út í tveimum, 40% í januar og 60%, tá avtalan er undirskrivað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur um árligan rakstrarstuðul á mentanarøkinum, sum mentamálanevndin samtykti 16.12.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar.

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar.

**Skjøl**
Yvirlit pr. 24.10.2018 yvir játtaðan og útgoldnan rakstrarstuðul 2018.
Uppskot til samstarvsavtalu við Havnar Sjónleikarfelag fyri 2019.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til
- at umrøða yvirlitið yvir játtaðan rakstrarstuðul í 2018 við atliti til, at umsitingin ger tilmæli at taka støðu til á komandi fundum.
- at játta, at goldið verður Havnar Sjónleikarfelag av kontu 5362 Stuðul til sjónleik fyrra gjaldið av stuðlinum beinanvegin, svarandi til 40% av stuðulsupphæddini sambært hjálagda uppskoti til samstarvsavtalu.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við at játta Havnar Sjónleikarfelag 40% av stuðulsupphæddini nú.

**Ískoyti:**
Viðv. Føroya Synfoniorkestri
Virksemið hjá Føroya Symfoniorkestri í 2019 byrjaði við nýggjárskonsertini tíðliga í januar, og í februar verður stór konsert, har 9. symfoni Beethovens verður framførd. Fíggjartørvurin er so statt stórur longu, og fyrispurningur er komin um rakstrarstuðulin frá kommununi. Ársroknskapurin fyri 2017 er viðheftur, og roknskapur fyri 2018 kemur væntandi í mars mánaði.

Viðv. Tórshavnar Big Band
Eftir umsókn frá Tórshavnar Big Band (J.nr. 18/00078) samtykti mentamálanevndin á fundi 12.09.2018, at Tórshavnar Big Band fær rakstrarstuðul frá 2019, fyrsta árið kr. 30.000, av kontu 5363 Stuðul til tónleik, og at málið verður viðgjørt víðari í sambandi við árliga rakstrarstuðulin 2019. Ársroknskapur og frágreiðing fyri 2018 eru viðheft.

Viðv. Aldubáruni
Eftir umsókn frá bólkinum Aldubáruni (J.nr. 17/02381) samtykti mentamálanevndin á fundi 08.10.2018, at Aldubáran fær rakstrarstuðul frá 2019, fyrsta árið 30.000, av kontu 5363 Stuðul til tónleik, og at málið verður viðgjørt víðari í sambandi við árliga rakstrarstuðulin 2019. Ársroknskapur og frágreiðing fyri 2017 og virksemisætlan fyri 2019 eru viðheft.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at játta rakstrarstuðul fyri 2019 av kontu 5363 Stuðul til tónleik soleiðis: Føroya Symfoniorkestur kr. 240.000, Tórshavnar Big Band kr. 30.000 og Aldubáran kr. 30.000.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Viðv. Føroya Sjósavni:
Uppskot til samstarvsavtalu við Føroya Sjósavn fyri 2019 er viðheft. Føroya Sjósavn hevur sent inn ársroknskap og grannskoðanarprotokoll fyri 2017, ársfrágreiðing 2017 og rakstrarætlan 2018. Mett verður ikki at tað er orsøk til at broyta stórvegis í hesum umfarinum.

Viðv. Fótbóltsfeløgunum:
Í fjør fingu fótbóltsfeløgini B36, Havnar Bóltfelag HB, Argja Bóltfelag AB 250 tkr. í part, og Giza Hoyvík fekk. 175.000 kr. til hølisútreiðslur og ungdómsarbeiðið. Fótbóltsfelagið Undrið FF hevur nú eisini lið í ungdómsdeildum og eigur tí helst eisini at koma við í skipanina. Avbjóðing er, at konta 5365 Stuðul til ítrótt hevur meirnýtslu í 2018 uppá kr. 729.000.

Skal stuðulin í 2019 verða á sama stigi sum í 2018, má kontan fáa nýggja fígging. Uppskot er, at samlaði stuðulskarmurin til fótbóltsfeløgini verður 1.000 tkr., har B36, HB og AB fáa 250 tkr. sum undanfarin ár, har FC Hoyvík fær 175 tkr. eins og í fjør, og at Undrið kemur í skipanina við 75 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at:
a) Føroya Sjósavn: Játta 600 tkr. av kontu 5366 og at gera samstarvsavtalu fyri árið 2019 við savnið.
b) Fótbóltsfeløgini: Játta 1.000 tkr. av kontu 5365 at býta millum feløgini soleiðis: B36, HB og AB 250 tkr. í part, FC Hoyvík 175 tkr. og Undrið 75 tkr. tó treytað av, at fígging verður tøk á kontu 5365 Stuðul til ítrótt til henda rakstrarstuðul.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðv. Westward Ho:
Nevndin fyri Westward Ho hevur sent inn skriv, dagfest 11.04.2019, við frágreiðing um virksemið í 2018 og virkisætlan fyri árið 2019. Skrivið er hjálagt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Westward Ho kr. 450.000 í rakstrarstuðli fyri 2019 av kontu 5366 Stuðul annars. Íroknaður er stuðulin til fiskikappingar við 6. flokkum.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Víst verður til samtykt í mentamálanevndini 13. mars 2019 viðv. stuðli til fótbóltsfeløgini.

Kannað hevur verið at fáa til vega fígging soleiðis, at stuðul kann veitast nøkulunda eins og í fjør.

Skotið verður upp at fáa til vega meirfígging til kontuna 5365 Stuðul til ítrótt av fylgjandi kontum og upphæddum:

| | |
| --- | --- |
| Kontu 1560 Tænastumannaeftirlønir | – 250 tkr. |
| Kontu 5370 Stuðul til íløgur | - 250 tkr. |
| Kontu 6111 Leiga traðir og økir | - 250 tkr. |
| Kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum | - 150 tús |
| Tils. | 900 tkr. |

Í verandi støðu eru 186 tkr. tøkar á kontu 5365 Stuðul til ítrótt (ikki íroknað játtan til skipanina við ókeypis hallarleigu).

Í fjør var viðgjørt í mentamálanevndini, í sambandi við sama mál tá, at veita stuðul í mun til stødd á feløgum og møguliga við eini grundarupphædd. Í málinum um rakstrarstuðul til fótbóltsfeløgini, ið var til viðgerðar á fundinum í mentamálanevndini 13. mars 2019 varð støði tikið í samtyktu skipanini í fjør.

Fótbóltsfeløgini eru í serstøðu viðv. stuðlinum, ið er veittur farnu árini ætlaður til bygningsrakstrarútreiðslur og ungdómsarbeiði. Í sambandi við gerð av Ítróttapolitikki – mál 19/00757, ið nevndin samtykti 13. mars 2019 at fara undir, er ætlanini í politikkinum eisini at viðgera og koma við tilmæli um, hvussu stuðul til ítróttavirksemi fyri børn og ung kann skipast á bestan hátt framyvir. Tí er hóskandi at fráboða, í sambandi við møguligan stuðul til fótbóltsfeløgini, at verandi skipan verður endurskoðað í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at samtykkja áseting av stuðli til fótbóltsfeløgini innan fyri ein fíggjarkarm á í mesta lagi 1.000 tkr.
b). at samtykkja at flyta 250 tkr. av kontu 5370 Stuðul til íløgur á kontu 5365 Stuðul til ítrótt
c). at samtykkja at flyta 150 tkr. av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum á kontu 5365 Stuðul til ítrótt.
d). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at flyta 250 tkr. av kontu 1560 Tænastumannaeftirlønir á kontu 5365 Stuðul til ítrótt.
e). at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at flyta 250 tkr. av kontu 6111 Leiga traðir og økir á kontu 5365 Stuðul til ítrótt.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting at stuðulin verður útgoldin í 3 ratum eftir nærri avtalu við umsitingina. Eisini samtykt at feløgunum verður gjørt greitt, at sbrt. galdandi leiðreglum fyri bílegging og brúk av fótbóltsvøllum hjá Ítróttaanleggum, er skylda hjá feløgunum at taka væl upp eftir sær á stadion í sambandi við dystir og at feløgini gera nærri avtalu við Ítróttaanlegg um tað.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við fíggjarnevndini 20. juni 2019.

# 149/19 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir

- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt

til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
• Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
• Toymið SNA Ark.
• Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við*

*projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini."*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um árskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

| Býráðsfundur<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 616 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við byggingina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.

# 150/19 Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 29/18 | 18/02331-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 208/18 | 18/02331-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 153/18 | 18/02331-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 14.03.2019 | 12/19 | 18/02331-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 79/19 | 18/02331-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 67/19 | 18/02331-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 17.06.2019 | 22/19 | 18/02331-1 |
| 8 Eldranevndin | 17.06.2019 | 14/19 | 18/02331-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 193/19 | 18/02331-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 150/19 | 18/02331-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur hølir til 13 kommunulæknaviðtalur. Seinnu árini hevur verið vaksandi tørvur á fleiri kommunulæknum í kommununi við tað, at fólkatalið er nógv vaksið. Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur játtað at seta 2 kommunulæknastørv í TK, tá hølir eru tøk til hetta.

Sambært Heilsutrygd so verða teir 4 kommunulæknarnir í Miðlon, sum allir starvast niðursetta tíð, settir fulla tíð og dekka harvið eitt av nýggju kommunulæknastørvunum, sum er játtað til TK.

Hitt starvið bíðar til Tórshavnar kommuna hevur tíðarhóskandi viðtaluhølir at vísa á.

Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á kommunulæknaøkinum er ásett í l*óg um kommunulæknaskipan*, har tað er ásett, at Heilsutrygd setir kommunulæknar og avloysarar í starv, og at kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Krøvini til kommunurnar hesum viðvíkjandi eru so aftur útgreinað í *kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum.*

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt miðvíst við at finna hóskandi loysnir á bráðfeingis trupulleikanum, sum er at finna høli til nýggjan kommunulækna og at endurnýggja viðtalurnar á Frúutrøð og í Berjabrekku, sum ikki longur eru mettar tíðarhóskandi.

Fleiri atlit eru at taka í tílíkum máli. Hølini skulu lúka í minsta lagi tey krøv, sum kommunan sambært omanfyristandandi lóg um kommunulæknaskipan, hevur skyldu til.

Við støði í samskiftinum við kommunulæknarnar er greitt, at formliga grundalagið, her serliga viðvíkjandi kunngerðarkrøvum um høli, als ikki er í samsvari við faktiska virksemið í fleiri av viðtalunum. Fleiri kommunulæknar hava eitt nú útbúgvingarlækna starvandi í viðtaluni, men lóg og kunngerð fyrihalda seg ikki til økta hølis- og rakstartørvin, ið hesin hevur við sær. Samstundis er hetta tó við at betra um tænastuna til borgaran og av størsta týdningi til tess at

fáa til vega nýggjar kommunuæknar. TK hevur tí lagt upp fyri, at minstukrøvini til hølir í ávísan mun víkja frá kunngerðini.

At finna eina skjóta og góða loysn á málinum, hevur eisini verið eitt atlit. Umsitingin hevur somuleiðis lagt seg eftir at finna fíggjarliga skynsama loysn.

Av teimum møguleikum sum umsitingin hevur kannað, metir umsitingin at besta loysnin er at leiga bygning í Hoyvík sum verður innrættaður til 5 kommunulæknaviðtalur (3+2).

Talan er um bygning á Kirkjustræti 2. Bygningurin stendur í løtuni í gerð, og kommunan fær tí høvi at innrætta bygningin eftir egnum ynski. Sostatt kann bygningurin verður innrættaður soleiðis, at hann beinanvegin verður gjørdur til kommunulæknaviðtalur og ikki skal byggjast um.

Bygningurin er umleið 1250 fermetrar til støddar í tveimum hæddum og góð parkeringsviðurskifti eru runt um bygningin (39 pláss). Tað er góð atkomuviðurskifti til báðar hæddir í bygninginum.

Byggideildin metir, at bygningurin er væl egnaður til endamálið. Av tí at bygningurin longu stendur uppi og arbeiðið við at gera bygningin lidnan er í gongd, fer hetta at minka um bíðitíðina eftir at sleppa inn í bygningin, í mun til um talan var at byggja nýggjan bygning ella at leiga bygning, har kostnaðarmiklar umbyggingar og umvælingar skulu gerast.

Tórshavnar kommuna fær til vega tekning til innrættingina og ráðgeving um krøv til innrætting, so sum ljós og ljóð viðurskifti, luftskifti o. s. fr. Í leigusáttmálanum verður viðmerkt, at útleigarin skal tryggja at tey krøv, sum verða sett til bygningin og innrættingina verða lokin, og at útleigarin hevur ábyrgdina, um hetta ikki verður lokið.

Útleigarin ger bygningin kláran til innflyting eftir tekningum, sum TK fær tilvega. Væntandi verður bygningurin klárur til innflyting um eitt ár. Leigusáttmálin tekur við, tá bygningurin er klárur at flyta inn í.

Leigugjaldi verður 1280 kr. pr. fermetur umframt árliga prístalsregulering, tó í minsta lagi 1% og leigusáttmálin verður fyri 15 ár. Sí fylgiskjal við leigukostnaðinum fyri 15 ár.

Ein ávís upphædd verður at seta av til innbúgv, útgerð til viðtalurnar og til ráðgeving og tekningar. Enn er ikki klárt at siga neyvt, hvør upphædd talan verður um, men væntast kann at hetta verður áleið 5 milliónir og verður henda uppphædd at taka við í fíggjarætlanina fyri 2019, tá umsitingin hevur fingið gjørt neyvari útrokningar.

Viðvíkjandi rakstrinum av kommunulæknaviðalum hækkar hesin sjálvsagt, tí talið av viðtalum økist, tá eitt nýtt starv verður sett og talið av viðtalum fer úr 13 upp í 14.

Annars verður mett, at raksturin av bygninginum, hiti, ljós og reingerð o.s. fr. helst ikki hækkar munandi við tað, at raksturin av verandi viðtalum verður fluttur til nýggju viðtaluna, tá gomlu viðtalurnar vera niðurlagdar.

Heilsutrygd er kunnað um ætlanina og metir Heilsutrygd, at hetta er ein góð loysn. Í sjálva innrættingina verða umboð fyri kommunulæknarnar tikin við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, virkandi tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla Trivnaðarnevndini til at heimila umsitingini at gera leigusáttmála við útleigaran av Kirkjustræti 2, har leiguprísurin er 1280 kr uttan mvg. fermeturin og at sáttmálin tryggjar at krøvini til kommunulæknaviðtalur eru lokin. Harafturat at seta fígging av til innbúgv, tól o.a. á fíggjarætlanini 2019 og at leggja málið fyri Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til, at somu tekningar, sum nýttar vórðu í samband við læknaviðtaluhølini í Gundadali verða nýttar í sambandi við útboð í umvendari lisitatión við tí endamáli at byggja nýggj læknaviðtaluhøli á grundøki hjá Tórshavnar kommunu á Oknarvegi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Heilsutrygd hevur boðað frá, at tað ikki longur ber til at hava 4 læknar í verandi viðtaluhølum í Miðlon og at tey í samband við at nýggj læknahøli verða tøk í Kirkjustræti, ætla at skipa økið soleiðis at bert tríggir kommunulæknar húsast í Miðlon. Upprunaliga var ætlanin at tríggir kommunulæknar skuldu vera í Miðlon, men teir læknar sum fluttu inn har av fyrstani tíð, ynsktu at arbeiða niðursetta tíð og at deila tey trý læknastørvini í millum 4 læknar sum skuldu halda til í Miðlon.

Av tí at fólkatali í Tórshavnar kommunu er økt nógv seinnu árini, hevur Heilsumálaráðið uppraðfest øki við tveimum nýggjum kommunulæknastørvum. Tað eina starvið er ætlanin at seta, tá klárt er at flyta inn í Kirkjustræti. Hina normeringina hevur Heilsutrygd brúkt til at uppnormara tey fýra læknastørvini í Miðlon og hevur hetta við sær, at hølini nú eru ov lítil til virksemi hjá fýra fulltíðarsettum læknum.

Heilsutrygd hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at varðveita viðtaluhølini í Berjabrekka til ein kommunulækna.
Um áheitanin verður gingin á møti verður ein viðtala í Berjabrekku, 4 viðtalur í Gundadali, 3 viðtalur í Miðlon og 5 viðtalur í Kirkjustræti, umframt at ein viðtala er í Kollafirði.

Henda loysnin kann setast í verk tá Kirkjustræti er liðugt, væntandi í aug. í 2019. Heilsutrygd metir at við hesari loysnini eru góðir møguleikar at fáa øll læknastørvini í Tórshavnar kommunu sett við føstum kommunulæknum.

Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av Berjabrekku og til ber at halda fram við leigumálinum.

Við at halda fram at leiga hølini í Berjabrekku verður rúm eisini fyri klinisku diætistunum. Í løtuni eru klinisku diætistarnir staðsettir í viðtalunum í Miðlon og í Gundadali.

Heilsutrygd, klinisku diætistarnir og kommunulæknarnir hava fleiri ferðir gjørt vart við vánaligu umstøðurnar hjá kliniskum dietistunum og hava heitt á kommununa um at sýna vælvild og veita kliniskum dietistum betur umstøður. Hóast kommunan ikki hevur beinleiðis skyldu at veita kliniskum diætistinum hølir, so stendur í  Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21 mars 2017 í § 1 stk. 4 at Kommunan eigur harumframt at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsuøki.

Við framhaldandi leigumálið í Berjabrekku ber til at hýsa kliniskum dietistum  í tí einu viðtaluni sum verður tóm, tá flutt verður í Kirkjustræti.

Leiguútreiðslurnar í Berjabrekku er roknaðar inn í fíggingina av leigumálinum í Kirkjustræti. Tað er tí ikki sett fígging av til leigumáli í Berjabrekku. Um leigumálið ikki verður uppsagt, kann leigugjald fyri Berjabrekku gjaldast av rakstrinum fyri 2019, men hædd má takast fyri øktu útreiðslunum í komandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla trivnaðarnevndini til at taka undir við, at halda fram við leigumálinum í Berjabrekku eftir ynski frá Heilsutrygd. Samstundis at taka undir við at klinisku diætistarnir fáa bjóða at flyta sítt virksemi inn í Berjabrekku. At leigumálið verður fíggjað av rakstrinum fyri 2019 og at hædd verður tikin fyri útreiðslunum í fíggjarætlanini í 2020 og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.


**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.


**Ískoyti:**
Heilsutrygd hevur boðað frá, at tað ikki longur ber til at hava 4 læknar í verandi viðtaluhølum í Miðlon og at tey í samband við at nýggj læknahøli verða tøk í Kirkjustræti, ætla at skipa økið soleiðis at bert tríggir kommunulæknar húsast í Miðlon. Upprunaliga var ætlanin at tríggir

kommunulæknar skuldu vera í Miðlon, men teir læknar sum fluttu inn har av fyrstani tíð, ynsktu at arbeiða niðursetta tíð og at deila tey trý læknastørvini í millum 4 læknar sum skuldu halda til í Miðlon.

Av tí at fólkatali í Tórshavnar kommunu er økt nógv seinnu árini, hevur Heilsumálaráðið uppraðfest øki við tveimum nýggjum kommunulæknastørvum. Tað eina starvið er ætlanin at seta, tá klárt er at flyta inn í Kirkjustræti. Hina normeringina hevur Heilsutrygd brúkt til at uppnormara tey fýra læknastørvini í Miðlon og hevur hetta við sær, at hølini nú eru ov lítil til virksemi hjá fýra fulltíðarsettum læknum.

Heilsutrygd hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at varðveita viðtaluhølini í Berjabrekka til ein kommunulækna.
Um áheitanin verður gingin á møti verður ein viðtala í Berjabrekku, 4 viðtalur í Gundadali, 3 viðtalur í Miðlon og 5 viðtalur í Kirkjustræti, umframt at ein viðtala er í Kollafirði.

Henda loysnin kann setast í verk tá Kirkjustræti er liðugt, væntandi í aug. í 2019. Heilsutrygd metir at við hesari loysnini eru góðir møguleikar at fáa øll læknastørvini í Tórshavnar kommunu sett við føstum kommunulæknum.

Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av Berjabrekku og til ber at halda fram við leigumálinum.

Við at halda fram at leiga hølini í Berjabrekku verður rúm eisini fyri klinisku diætistunum. Í løtuni eru klinisku diætistarnir staðsettir í viðtalunum í Miðlon og í Gundadali.

Heilsutrygd, klinisku diætistarnir og kommunulæknarnir hava fleiri ferðir gjørt vart við vánaligu umstøðurnar hjá kliniskum dietistunum og hava heitt á kommununa um at sýna vælvild og veita kliniskum dietistum betur umstøður. Hóast kommunan ikki hevur beinleiðis skyldu at veita kliniskum diætistinum hølir, so stendur í Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21 mars 2017 í § 1 stk. 4 at Kommunan eigur harumframt at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsuøki.

Við framhaldandi leigumálið í Berjabrekku ber til at hýsa kliniskum dietistum í tí einu viðtaluni sum verður tóm, tá flutt verður í Kirkjustræti.

Leiguútreiðslurnar í Berjabrekku er roknaðar inn í fíggingina av leigumálinum í Kirkjustræti. Tað er tí ikki sett fígging av til leigumáli í Berjabrekku. Um leigumálið ikki verður uppsagt, kann leigugjald fyri Berjabrekku gjaldast av rakstrinum fyri 2019, men hædd má takast fyri øktu útreiðslunum í komandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla trivnaðarnevndini til at taka undir við, at halda fram við leigumálinum í Berjabrekku eftir ynski frá Heilsutrygd. Samstundis at taka undir við at klinisku diætistarnir fáa bjóða at flyta sítt virksemi inn í Berjabrekku. At leigumálið verður fíggjað av rakstrinum fyri 2019 og at hædd verður tikin fyri útreiðslunum í fíggjarætlanini í 2020 og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 14. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 3 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen,  Bergun Kass, Odd Færø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt akvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kommunulæknahølini í Kirkjustræti er nú um at vera klár til teir fimm kommunulæknarnar at flyta inn í. Nýggjasta metingin frá eigaranum er, at klárt er at byrja innflytingina fyrst í august.

H og U hevur saman við Heilsutrygd gjørt tíðarætlan fyri flytingina. Um tíðarætlanin heldur, virka allar viðtalur í Tórshavnar kommunu fyrst í september.

Kommunan hevur sambært Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21. mars 2017 umframt hølir, eisini skyldu at veita kommunulæknaviðtalum innbúgv og tól. Umsitingin hevur arbeitt við at kanna, hvat innbúgv og hvørji tól kunnu flytast úr øðrum viðtalum í nýggju viðtalurnar, og í tann mun hetta ber til, verður verandi útgerð flutt við niðan í Kirkjustræti.

Í 2018 var veitt eykajáttan á 3 mio. kr. sum skuldi brúkast til at fáa til vega og rinda fyri viðtaluhøli og neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum. (jr. 18/01522)
Higartil eru brúkar 600 tkr. til fyrireikingar og serkøna hjálp í samband við nýggj læknahøli.

Endalig kostnaðarmeting er nú gjørd av tí partinum sum kommunan eigur at rinda soleiðis at kommunulæknahølini kunnu góðkennast og takast í brúk. Kostnaðarmetingin er 3.450 tkr. Sostatt mangla 1.050 tkr.

Á konto 2755 Flytingar millum samstørv eru játtaður peningur til eitt búpláss í aðrari kommunu. Av tí at kommunan ikki longur hevur borgara í hesum plássinum, verður hesin peningur ikki brúktur til játtaða endamálið. Sostatt kunnu 600 tkr. flytast av konto 2755 Flytingar millum samstørv til konto 2210 Kommunulæknatænastur.

Írestandi upphæddin á 450 tkr. verður fíggja av konto 6175 Keyp og søla.

**Tilmæli**:
Heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanarleiðarin og fíggjarfulltrúin í H og U mæla trivnaðarnevndini og eldranevndini til at taka undir við at flyta 600.000 kr. av konto 2755 Flyting millum samstørv til konto 2210 Kommunulæknaviðtalur og beina málið í fíggjarnevndina.

Harafturat verður mælt trivnaðarnevndini til at taka undir við at flyta 450.000 kr. av konto 6175 Keyp og søla á konto 2210 Kommunulæknatænastur og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin og trivnaðarnevndin 17. juni 2019**: Nevndirnar taka undir við tilmælinum um at flyta 600.000 kr. av konto 2755 Flyting millum samstørv til konto 2210 Kommunulæknaviðtalur og beina málið í fíggjarnevndina.

Harumframt tekur trivnaðarnevndin undir við tilmælinum um at flyta 450.000 kr. av konto 6175 Keyp og søla á konto 2210 Kommunulæknatænastur og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin og eldranevndin 17. juni 2019:** Nevndirnar taka undir við tilmælinum um at flyta 600.000 kr. av konto 2755 Flyting millum samstørv til konto 2210 Kommunulæknaviðtalur og beina málið í fíggjarnevndina.

Harumframt tekur trivnaðarnevndin undir við tilmælinum um at flyta 450.000 kr. av konto 6175 Keyp og søla á konto 2210 Kommunulæknatænastur og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við eldranevndini og trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø tekur ikki undir við málinum og vísir til áður gjørdar samtyktir í hesum máli, har mælt er til, at kommunan letur byggja nýggj kommunulæknahøli til ognar.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

## 151/19 Kommunuskúlagarðurin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 185/17 | 17/02741-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 220/17 | 17/02741-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 219/17 | 17/02741-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 249/17 | 17/02741-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 119/19 | 17/02741-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 175/19 | 17/02741-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 151/19 | 17/02741-1 |

**Málslýsing:**
Sambært verkætlan nr. 15/02637 Kommunuskúlin: Retrofitting til býarhús, umfatar verkætlanin ikki garðprosjektið, sum skuldi koma seinni. Hetta framgongur av samtykt í fíggjarnevndini 19.04.2016, mál nr. 15/01465.

Í avtaluni millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir framgongur, at:
*Útyvir verkætlanina, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggjum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.*

Drening og kloakk er avgreitt.

Nú er so farið undir at arbeiða upp á garðin, og hevur býarskipanardeildin saman við tekniska stjóranum, í samráði við Bústaðir og arbeiðstakara á staðnum, mett tað verða røttu loysnina at reinsa eldri yvirskotstilfar í hægra partinum av garðinum niður á hellu, so hendan gerst fyri ein part sjónlig við endaligu loysnini. Garðurin kemur bæði í mun til nýggju nýtsluna av skúlanum og býnum sum heild at hava stóran týdning sum miðdepil og uppihald fyri borgarar í øllum aldursbólkum, og tískil varð mett, at garðurin somuleiðis skuldi bjóða býnum eina øðrvísi uppliving.

Við at grava verandi ífyllu burtur og gera hellulandslagið sjónligt, verður hetta ein garður sum brýtur frá tí annars siðbundna býnum við asfalti ella aðrari álegging; hetta verður ein garður, sum bjóðar náttúruni vælkomna inn í miðbýin.

Hendan tilgongdin til garðin hevur so havt við sær, at rættiliga stórur hæddarmunur er á garðinum og eitt nú inngongdunum í bygninginum, og tískil er neyðugt at tryggja atgongd til høvuðsdyrnar í norðaru- og eystaru lonini, umframt at atgongd mátti skipast til nýggjan tunnil frá garðinum og út á Tórsgøtu/Niels Finsens gøtu. Atkoman verður gjørd við betong gøtum í og omaná lendinum. Har hæddarmunurin millum gøtuna og hellulandslagið verður ov høgt, er ætlanin at seta rimaverk upp. Ætlanin er at gera rimaverk í eldri stíli, smíða í essu, sum vit kenna tað aðrastaðni í býnum, t.d. við kirkjugarðinum á Svínaryggi, á Trappuni í Vágsbotni og framvið Havnará niðan móti SSB.

Ætlanin er somuleiðis at fyrireikað nøkur grøn øki og onnur flísaløgd uppihaldsøki í garðinum við beinkjum og øðrum innbúgvi, umframt at tryggja parkeringsøki til bilar, øki til rørslutarnað og øki til neyðsendarakfør. Sum heild at innrætta garðin til nýggja tørvin á staðnum, men eisini sum eitt uppihaldsøki fyri almenningin og eitt øki at ferðast ígjøgnum.

Fyri at kostnaðarstøði av verkætlanini ikki gerst ov høgt, so verður alt planlagt stig fyri stig á staðnum saman við arbeiðstakara og ráðgeva.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitektur mæla til at at taka undir við ætlanini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 1.550.000,00 av kt. 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið i býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin L62031 er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Tað seinasta sum hevur hingið eftir er íbinding til gøtuljós í garðinum. Hetta er nú avgreitt og verður samskipað við nýggjari el-talvu í lonini móti Tróndargøtu. Endaliga úrslitið er eitt lítið avlop á kr. 5.995,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at loka verkætlanina L62031, at avlopið verður flutt á løgukarmin á konto 6275, fríðkan av kommununi, og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson og Bjørg Dam luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Kunnað varð um málið.

# 152/19 Umbøn um at rætta marknalinjurnar á økinum matr. nr. 1381l, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 29/19 | 18/00535-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.05.2019 | 90/19 | 18/00535-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 173/19 | 18/00535-4 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 152/19 | 18/00535-4 |

**Upprunin til málið:**
Vegna Berg Motors hevur adv. Anfinn V. Hansen heitt á kommununa um loyvi til at marknaumskipa matrikulmarkið millum ognina matr. nr. 1381l, sum er ogn hjá Berg Motors, og vegin R. C. Effersøes gøtu, matr. nr. fb, sum er ogn kommununnar. Hetta er ein liður í at fáa ruddað upp matrikulert.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur arbeitt við ferðslutrygdini í økinum um somu tíð. Við í planleggingini er ein gongubreyt á 2,5 m á R. C. Effersøes gøtu, ein gongubreyt á 1,5 m í báðum borðum av Títlingsvegnum og víðkan av verandi økinum í sambandi við bussskýlið. Hesi átøkini hava ávirkan á verandi matrikulmark.

Hetta inniber, at Berg Motors letur íalt umleið 29,3 $m^2$ av matr. nr. 1381l, Tórshavn, til Tórshavnar kommunu, og Tórshavnar kommuna letur Berg Motors 69,5 $m^2$ av litraøkinum, matr. nr. fb, Tórshavn.
Hetta gevur ein nettomun á 40,2 $m^2$, sum Tórshavnar kommuna kann selja til Berg Motors.

Tórshavnar kommun hevur verið í samband við Derek Brockie í sambandi við marknaumskipanina,

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við málsviðgerð og nevndarsamtyktir av máli **2005-3292**, í tíðarskeiðinum 2005 til 2009, um ymisk viðurskifti hjá Berg Motors, eitt nú parkeringsviðurskifti v.m. og um hvussu hetta kann loysast.

Lýst verður í málinum:
Tað eru ymsir hættir at loysa trupulleikarnar við ognina hjá P/F Berg Motors á Hálsi.

Ein háttur fyri at fáa loyst málið er at áleggja virkinum at seta girðingar upp á markinum millum privata og kommunala ogn sambært tinglýstum servitutti í skeytinum. Hetta førir við sær, at kommunan verður noydd at gera gongubreyt á Títlingsveg og á økinum millum p-plássið á Hálsi og ognina hjá P/F Berg Motors. Trupult er harumframt við útsýninum fyri ferðslu, sum skal snara til vinstru út á R.C. Effersøes gøtu frá Títlingsvegi.

Ein annar háttur er at ognartaka partar av økinum hjá P/F Berg Motors, men henda loysn er tíðarkrevjandi og letur seg neyvan gera, tí kommunan væntandi ikki fær viðhald í væntandi kæru frá P/F Berg Motors.

Tann hátturin, sum er verdur at arbeiða víðari við er, at viðmæla umsóknini um at gera eitt bilhús til uml. 25 p-pláss inni á ognini hjá virkinum.

Tekniska nevndin samtykti 9. februar 2006, at P/F Berg Motors setir girðing upp sambært ásetingunum í skeytinum.
Marin Katrina Frýdal, formaður í teknisku nevnd, hevur ynski um at fáa viðgjørt spurningin um parkeringsviðurskiftini á økinum.

Síðan hevur málið verið aftur til kunningar í teknisku nevnd og seinri beint í býráðið, men bleiv tikið av skrá.
Seinasta viðgerð av hesum máli var 12. november 2009 í teknisku nevnd. Málið bleiv útsett.
Síðan er einki hent í hesum máli.

Annars sæst øll málsgongdin í hjálagda skjali 18/00535-7 (nevndarsamtykt)

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið um at betra um ferðslutrygdina í økinum hevur ávirkan á málið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi frávik.

**Umhvørvisárin**
Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild hevur kannað viðurskiftini og kann staðfesta, at einki er til hindurs fyri, at nevnda marknaumskipan verður framd.

**Skjøl**
TK j. Nr. 18/00535-6 Matrikultekning _14112018_PAP.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Um roknað verður við 1.500,- kr./$m^2$ verður talan um eina inntøku fyri Tórshavn kommunu á kr. 60.300,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við at marknaumskipa og selja áleið 40,2 $m^2$ av litra økinum, matr. nr. fb, Tórshavn, til Berg Motors og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og Byggi-og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

## 153/19 Skógfriðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 71/18 | 18/00982-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2018 | 30/18 | 18/00982-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 170/18 | 18/00982-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 28.08.2018 | 10/18 | 18/00982-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 06.09.2018 | 8/18 | 18/00982-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 258/18 | 18/00982-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 360/18 | 18/00982-1 |
| 8 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 323/18 | 18/00982-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 111/19 | 18/00982-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 176/19 | 18/00982-1 |
| 11 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 153/19 | 18/00982-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Skógfriðing av fleiri økjum í kommununi.** Framhald av máli nr. 17/01142.

Ynski er um at varðveita og náttúrufriða grønu økini og frílendini í kommununi, tískil er avgjørt at fara undir at kanna møguleikarnar at skógfriða fleiri økir í Tórshavnar kommunu.

Ájavnt við einum vaksandi býi, veksur eisini tørvurin á frílendum, viðarlundum og náttúrufriðaðum økjum, har fólk kunnu njóta friðsæluna og koma burtur frá meldrinum. Nógv nýggj altjóða gransking v.m. vísir greitt, at nútíðar býarbúgvin hevur stóran tørv á rekreativum grønum lendi til heilsubót, bæði við atliti at strongd, rørslu og betri fólkaheilsu sum heild. Eisini vísa kanningar í útlondum, at tættleiki til grøn øki við gróðurseting av viðarlundum o.tíl. økja munandi um fastognarvirðið í grannalagnum. Framsøknir býir nú á døgum leggja tí stóran dent á at menna munandi mongd av frílendum av ymsum slag til sínar býarbúgvar at njóta.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 sigur samb. § 3 og 4: at eigarin av skógfriðaðum lendi, skal halda hegn, vegir, gøtur, rudda og gjalda tað, sum tað kostar. Nakrar av ásetingunum í løgtingslógini um viðarlundir eru soljóðandi:

*Tað verður ein treyt í framtíðini fyri almennum studningi til niðursetingar ella rakstur av viðarlund, at friðingarváttan er tinglisin á viðkomandi lendi eftir hesi lóg.*

***§ 3.** Eigari av skógfriðingarskyldugum lendi hevur skyldu at halda haldgott stik rundan um alt lendi, sum kann halda seyði og stórdýrum úti, líka mikið hvør garðskylduna í grundini hevur. Tað er eisini ein treyt, at lendið er vetrarfriðað og hevur hóskandi nógvar breytir. Tað er eigarans skylda at umsita breytirnar og forkoma tílíkum óruddi, sum kann lýta viðarlundina innan og eisini uttanum.*

*Øll forstlig tiltøk eitt nú niðurseting, felling og tynning verða útinnt av skógfriðingarnevndini, sum hevur fullt ræði á øllum vøkstri og dýralívi í viðarlundini.*

*Almenningurin hevur onga atgongu uttan eftir loyvi nevndinnar, men nevndini áliggur at loyva atgongu mest gjørligt uttan at nerva vakstrarlíkindi viðarlundinnar.*

Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995:

*§ 2. Uttangarðs er ikki loyvt at byggja hús, búðir, skúr ella a.l. uttan loyvi frá friðingarnevndini. Undantiknir eru tó smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í samband við landbúnaðin, tá ið teir ikki skemma natúruna.*
*Stk. 2. Innangarðs eigur ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*
*1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum,*
*2) nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi,*
*3) nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Verandi samstarv er skipað soleiðis, at býargartnarin hjá Tórshavnar kommunu saman við deildarleiðaranum hjá Skógrøkt, samskipa arbeiðini í skógfriðaðu økjunum, sum Tórshavnar kommuna eigur; Havnardalur, Kerjar, Grið og Gundadalur, tilsamans 403.000 $m^2$. Daglig røkt planting, tynning, rudding v.m. verður fyriskipað av Skógrøkt, umframt viðlíkahald av hegnum, gøtum og veitum. Árligur rakstur er 1 mió. kr. um árið.

Hjálagt er kort, ið vísir møgulig øki at skógfriða og tey skógfriðaðu økini, ið eru í býnum.

Umsitingin skjýtur upp ítøkiliga at fara undir tilgongd at skógarfriða hesi lendi:

- **Havnardalur**, økið millum Sandvegin-Sandá-Liasarveg og Velbastaðvegin og somuleiðis vestanfyri Sandá frá Velbastaðvegnum til hagamarkið millum Norðara – og Syðra Spakaseyð.
- **Ternuryggur**, brekkuna millum gøtuna Vestan Hoydalsá - Tóru-ogTuriðargøtu og Óluvugøtu, og millum Birnugøtu og Vestan Hoydalságøtuna og Sundsvegin
- **Kaldbak**, økið undir útstykkingini á Fløtum
- **Argir**, undir Hamrinum frá Argjaboða - Kvíggjartún/Hóvabrekku
- **Signabøur** v.f og s.f Flatnabø úttykkingina, matr.nr 280c
- **Kollafjørður,** millum Myllutunguánna og Kirkjuánna, matr.nr. 107a
- **Nólsoy** øki við Hvítthjalla norðuri á Boða matr. nr. 113 og 141a
- **Velbastaður,** øki millum Ervaveg og Velbastaðvegin
- **Hestur,** matr. 102 við Svimjihøllina
- **Norðradalur,** matr.nr. 20a partur av Kongshaga
- **Syðradalur,** við Syðradalsá millum landsvegin og bøgarðarnar
- **Kirkjubøur,** matr.nr. 21b, inni á Fjósi millum Geilina og bøgarðin

og at samráðast við staðbundnu feløgini, avvarðandi myndugleikar, eigarar, festarar og brúkarar. Miðað verður eisini eftir at skipa áhugafeløg á staðnum.

**Onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunur, ið ynskja at skógfriða øki, mugu nevndarviðgera málini innanhýsis, áðrenn málið verður sent um skógarfriðing til skógfriðingarnevndina.

Ein skógarfriðing tryggjar at trø og runnavøkstir fáa frið at vaksa seg stór, og tað tekur eini 40-50 ár, áðrenn tað byrjar at líkjast viðarlund.

Um eitt økið skal skógarfriðast ella ein skógfriðing avtakast, skal málið leggjast fyri skógfriðingarnevndina.

**Umhvørvisárin**
At skógarfriða og gróðurseta bøtir um alheims $CO_2$ javnvágina, hevur fagurfrøðiliga ávirkan á landsløg og náttúrumyndina, umframt at skapa lívsumstøður til fugl, skordýr o.m.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið til ummælis hjá øðrum deildum.

**Skjøl**
Skógfriðing_Bygdir, j. nr. 18/00982-2
Skógfriðing_Tórshavn, j. nr. 18/00982-3
Skógfriðing_Kollafjørður, j. nr. 18/00982-4
Skógfriðing_Kirkjubøur, j. nr. 18/00982-5
Skógfriðing_Signabøur, j. nr. 18/00982-6
Løgtingslóg um skógfriðing, j. nr. 18/00982-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | x | x | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir nevndini til at umrøða heildaruppskotið til øki at skógfriða og hvørji øki skulu raðfestast og fyrireikast til skógfriðing, og at beina málið í náttúru- og umvhørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at arbeiða viðari við uppskotinum og at beina málið í staðbundnu nevndirnar og náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at fáa avleiðingarnar lýstar.

**Ískoyti:**
Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti at fáa avleiðingarnar av at skógarfriða lendið lýstar. Avleiðingarnar verða lýstar niðanfyri:

Tinglýst skógarfriðað øki kann ikki longur brúkast til annað enn planting og upplivingar, ið eru tengdar at træ- og runna vøkstrum, sum fulglalív, skordýr, soppavøkstir, ymiskum

fjølbroyttum urtagróðri og góðari lívd. Umframt til hugsavnan og ró. Skógarfriðing tryggjar, at trø og runnavøkstir fáa frið at vaksa seg stór, og tað tekur eini 40-50 ár, áðrenn tað byrjar at líkjast viðarlund.

Neyðugt er, at økið eisini er tinglýst vetrarfriðað, soleiðis at seyður ella annar fenaðaur ikki hevur rætt til bit á økinum.

Loyvi krevst, tá byggjast skal nærri enn 300m frá tinglýstum friðaðum viðarlundum innangarðs. Tað loyvið krevst frá friðingarmyndugleikunum, náttúru- og yvirfriðingini. Víst verður á, at tað kann hava avmarkingar á verandi og komandi byggilendi, um økið uppat hesum verða skógfriðað, tí bygging nærri enn 300m krevur loyvi frá friðingarmyndugleikanum. At skógarfriða millum býlingar og útsykkingar í verandi býi verður mett trupult, tíðar- og orkukrevjandi, dømi er skógarfriðaða trøðin við útvarpshúsið.

Kommunan, sum eigari av skógfriðaðum lendi, skal gjalda tað, sum tað kostar at skipa og halda hegn, gøtur, beinkir og upprudding. Gróðurseting og tað, sum harav stendst, er undir ábyrgd hjá skógfriðingarnevndini. Fíggjarávirkan, fyri verandi friðaðar viðarlundir, er pr. $m^2$ er 2,50 kr/ár.

Kommunur, ið ynskja at skógfriða økið, mugu nevndarviðgera málini innanhýsis í avvarðandi nevndum og býráði, áðrenn málið um skógarfriðing verður sent til skógfriðingarnevndina.

Um eitt øki skal skógarfriðast ella ein skógarfriðing skal avtakast, skal málið leggjast fyri skógfriðingarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um viðarlundir, sum seinast broytt við løgtinslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 sigur samb. § 3 og 4: at eigarin av skógfriðaðum lendi, skal halda hegn, vegir, gøtur, rudda og gjalda tað, sum tað kostar. Eitt økið á t.d. 100.000 m2, sum verður skógfriðað, kostar kommununi kr. 250.000 pr/ár í rakstrarútreiðslum.

Fundur hevur verið við leiðaran á Skógrøktini, har tosað varð um, hvar frægast var at skógfriða lendið til alment gagnlig endamál. Fleiri egnaðið øki eru at skógfriðað, og avtalað varð at samstarva neyvt um skipan av nýggjum viðarlundum.

Grundað á omanfyri standandi verður í fyrstu atløgu mælt til at velja økið at skógfriða, ið liggja 300m frá bygdum øki.

**Ítøkilig øki at skógarfriða**

| Matr.nr. | Eigari | Vídd $m^2$ | Ummál m | Hegn/stik | Brúk /leiga | Kostnarmeting kr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 55-1165, 1164a og 1160a Tórshavn | TK | 47.860 | 920 | er stikað | hundafeløgini, traðarleigumál | 390.226 |
| 38-50a Velbastaður | BST | 24.450 | 675 | ikki stikað | festijørð fungagimbrar | 2.649.500* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 51-132b, 145a, 107a Kollafjørður | BST TK | 9.896 | 485 | er stikað | festijørð og kommuna | 634.000 |

*Herav er keypsprísur fyri landsjørð 24.450 x 90 = 2.3 mió.
*Prísirnir eru samb. Búnaðarstovuni. Søla av landsjørð uml. 90 kr/$m^2$

**Avloysing av vetrarbiti 0,7 kr/$m^2$

Kostnaður at skógarfriða og matrikulera v.m.:
(dømi um ymisk gjøld fyri viðarlundaruppskotið í Havnardali)

| | | |
|---|---|---|
| • Friðingarbræv (meting): | kr. | 5.000 |
| • Matrikulering: 4000 + 1% av mettum jarðarprísi (90x47860x1%) | kr. | 47.074 |
| • Tinglýsingaravgjald (meting) | kr. | 1.000 |
| • Avloysing av vetrarbiti: (0,7 x 47.860) | kr. | 33.502 |
| • Stik (um tað verður kravt): (200 x 920) | kr. | 184.000 |
| • Árligt viðlíkahald: (2,50 x 47.860) | kr. | 119.650 |
| Tilsamans | kr. | 390.226 |

Harumframt
- Velting: av økjum til planting 25 kr/$m^2$
- Gøtugerð: 1000-1500 kr/lbm

**Skjøl:**
ViðarlundHavnardalu18_00982.pdf j.nr. 18/00982-11
ViðarlKollafj1800982.pdf j.nr. 18/00982-12
ViðalVelbasta18_00982.pdf j.nr. 18/00982-13

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingarnar, at senda málið til friðingarmyndugleikarnar til viðgerðar, áðrenn málið aftur verður at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø mælir til at fara á ástaðarfund, áðrenn støða verður tikin til málið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 28. august 2018:** Staðbundna nevndin tekur ikki undir við staðsetingini og mælir til at málið verður tikið uppaftur í byggi- og býarskipanarnevndini til nýggja staðseting í samráð við borgararnar á Velbastað. Eisini ynskir nevndin at borgarafundur verður hildin um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 06. september 2018:** Staðbundna nevndin ynskir umhugsingartíð og vendir aftur skrivliga hvussu víðari skal farast fram.

**Ískoyti:**
**Havnardalur**, økið heimanfyri Sandvegin millum Sandá og Liasarveg, eru tvær traðir, sí hjálagda kort.

Matr.nr. 1164 a og 1165, fyrr tvær traðir, vídd ávikavist 10.430 $m^2$ og 9496 $m^2$, sum Axel Hansen bóndi velti í 1940'unum. Kommunan keypti traðirnar í 2005 fyri 2.4 mill. til frílendisbrúk hjá borgarunum í býnum. Traðirnar liggja dygst heimanfyri Sandvegin. Har er fitt tjørn á økinum, um 1100 $m^2$ til víddar. Hús var á trøðni, tað varð tikið niður. Ætlan var at gera nýtt hús, sama vídd, sum tað, ið var. Nakað av trøum er gróðursett fram við Liasarvegi.

*Skógfriðing krevur vanliga haldgott hegn í seyðahøgum standi, og er partur av hesum traðunum hegnaður.

Skotið verður upp at skógarfriða matr. nr. 1164a og 1165.

Kostnaðarmeting fyri at friða 1164a og 1165 tils. 19.926 $m^2$.

| | | |
|---|---|---|
| • Friðingarbræv (meting): | kr. | 5.000 |
| • Matrikulering: 4000 + 1% av mettum jarðarprísi (90x19.926x1%) | kr. | 17.933 |
| • Tinglýsingaravgjald (meting) | kr. | 1.000 |
| • Avloysing av vetrarbiti: (einki, TK eigur lendið) | kr. | 0 |
| • Stik øki (um tað verður kravt)*: (200 x 200) | kr. | 40.000 |
| • Árligt viðlíkahald: (2,50 x 19.926) | kr. | 49.815 |
| Tilsamans | **kr.** | **113.748** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at farið verður undir at skógarfriða matr. nr. 1164a og 1165 í Havnardali, at játta kr.120.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykkið til endamálið, at eitt árligt gjald á kr. 50.000 verður at gjalda fyri viðlíkahald av skógarfriðaða økinum av konto 6210 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, 1 ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helenu Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Hallu Samuelsen.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
21. mars 2019 svarar staðbundna nevndin í Kollafirði soleiðis:
Tað er hervið váttað, at staðbundna nevndin í Kollafirði tekur undir við skógarfriðingini, sum Tórshavnar kommuna hevur skotið upp, í sambandi við víðkan av viðarlundini í Kollafirði.

Onkur misskiljing er íkomin, so váttanarskrivið er ikki skrásett í málið fyrrenn nú.

Sostatt er hervið váttað, at ynskiligt er at fara undir ætlaðu skógarfriðingina, sum varð sett á breddan 2018. Partur av lendinum, sum ætlanin er at skógarfriða, er ogn hjá Búnaðarstovuni, og sostatt verður neyðugt at keypa hendan partin av lendinum.

Økið, sum talan er um at skógarfriða, sæst í viðhefta skjali, journal nr. 18/00982-26.

Niðanfyri sæst ein kostnaðarmeting fyri hvat tað kemur at kosta kommununi at skógarfriða umtalaða økið í Kollafirði, sum í alt er 6865 m$^2$:

| | |
|---|---|
| • Keyp av lendi 71 x 6865 m$^2$ | kr. 487.415 |
| • Friðingarbræv (meting): | kr. 5.000 |
| • Matrikulering: 4000 + 1% av mettum jarðarprísi (71x6856x1%) | kr. 8.867 |
| • Tinglýsingaravgjald (meting) | kr. 1.000 |
| • Avloysing av vetrarbiti: (0,7 x 6856 ) | kr. 4.799 |
| • Stik øki (um tað verður kravt)*: (200 x 400) | kr. 90.000 |
| • Árligt viðlíkahald: (2,50 x 9.582) | kr. 23.995 |
| Tilsamans | **kr. 621.076** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at farið verður undir at skógarfriða matr. nr. 132b, 145a og 107a í Kollafirði, at Stjórnarskrivstovan tekur upp samráðingar við eigarar av matr. nr. 107a um keyp ella leigumál av lendinum, at játtaðar verða kr. 650.000 av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001 Løgukarmur fyri árið, til endamálið, at eitt árligt gjald á kr. 25.000 verður at gjalda fyri viðlíkahald av skógarfriðaða økinum av konto 6210 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 1 ímóti og fimm blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

# 154/19 Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 135hg, Bertugøta 11, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 64/19 | 19/00876-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 130/19 | 19/00876-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 106/19 | 19/00876-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 167/19 | 19/00876-2 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 154/19 | 19/00876-2 |

**Upprunin til málið:**
Søkt verður um frávik at byggja bilhús út um byggifeltið til bilhús.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Bilhúsið verður 6,5 m langt og 5 m breitt. Byggifeltið er 4 m breitt. T.v.s. bilhúsið fer 1 m út um byggifeltið móti sethúsunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognin liggur í umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Harumframt eru byrðar lýstar á ognina viðv. byggiøkjum, har Tórshavnar kommuna hevur átalurætt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað eru nøkur bilhús, ið hava fingið frávik í økinum við 300 $m^2$ grundstykkinum.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
Frávik frá ásetingini í skeytinum viðvíkjandi byggifeltum. Bilusið fer 1 m út um byggifeltið til bilhús.

**Umhvørvisárin**
Umhvørvisflokk 1

**Viðmerkingar frá øðrum.** Grannahoyring hevur verið, ongar viðmerkingar eru frá grannum.

**Skjøl** 19/00876-1 Tekningar**.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til at bygt verður út um skeytisásetta byggiøkið og at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan, um átalurætturin skal gerast galdandi ella ikki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam mæla til at geva frávik.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Upplýsast skal, at grannin á matr. nr. 135hf hevur fingið byggiloyvi til eitt líknandi bilhús við sama fráviki í mun til skeytisásetingina og tí verður málið lagt fyri aftur til nýggja viðgerð.

**Viðkomandi mál:**
2007-3686 Niclas Thomsen: Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 135hf, Hoyvík.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið frá 8. mai 2019.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at geva frávik og loyva byggingini.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, heldur fast við samtyktina frrá 8. mai 2019.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 155/19 Raðfesting av smærri verkætlanum í bygdunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Økisnevndin | 18.03.2019 | 5/19 | 19/01034-1 |
| 2 Økisnevndin | 03.06.2019 | 8/19 | 19/01034-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 168/19 | 19/01034-1 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 155/19 | 19/01034-1 |
| 5 Hest/Koltursnevndin | 24.06.2019 | 4/19 | 19/01034-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar býráð hevur samtykt eina íløgujáttan fyri 2019 har 2,5 milliónir skulu nýtast til bygdirnar. Henda upphædd skal nýtast bæði til vetrarfriðing og til smærri verkætlanir úti á bygdunum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt við einum raðfestingarlista, sum skal lýsa hvørjar verkætlanir ið eru áhugaverdar at seta í gongd úti í bygdunum. Upprunin til hesar verkætlanir, sum verða lýstar á hesum lista eru deils komnar inn til kommununa sum umsóknir frá felagsskapum og eisini eru tær komnar frá fundum, sum hava verið í teimum staðbundnu nevndunum.

Ætlanin er sum sagt, at fáa sett gongd á summar av hesum verkætlanunum, men tað er ikki vist at allar kunnu gerast lidnar í 2019.
Verkætlanirnar hava allar á ein ella annan hátt, øktan trivnaðarligan og mennandi týdning fyri lokalu økini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi

**Upplýsingar frá umsitingini**
Yvirlit yvir konto 6275 – L62035 bygdirnar/vetrarfriðing:

| | |
|---|---|
| Flutt frá 2018 | 293.555,- |
| Vetrarfriðing | 1.000.000,- |
| Ymsar smærri verkætlanir bygdirnar | 1.500.000,- |
| Íalt | 2.793.555,- |

Umsitingin hevur gjørt fylgjandi raðfestingarlista fyri smærri verkætlanir:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Hestur | 400.000,- |
| 2. | Kirkjubøur | 100.000,- |
| 3. | Velbastaður | 100.000,- |
| 4. | Nólsoy | 100.000,- |
| 5. | Hvítanes | 100.000,- |
| 6. | Kaldbak | 300.000,- |
| 7. | Kollafjørður | 400.000,- |
| | Íalt | 1.500.000,- |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/00949 Vetrarfriðing í Tórshavnar kommunu

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi

**Umhvørvisárin**
Summar verkætlanir, so sum alment wc og kampingpláss kunnu hava ávís umhvørvisárin.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar  eru frá øðrum í hesum málinum.

**Skjøl**
Raðfestingarlisti liggur í málinum. J.nr 19/01034-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | x | X |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | x | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | X | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla nevndini til, at viðgera og taka undir við einum raðfestingarlista, sum umsitingin kann arbeiða víðari við, fyri at bjóða verkætlanirnar út til fleiri arbeiðstakarar.

**Økisnevndin 18. mars 2019:** Samtykt at taka undir við raðfestingini og at seta arbeiðini í gongd. Bergun Kass var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Vísandi til skjal 19/01036-3 «raðfestingarlisti verkætlanir í bygdunum», er ætlanin at játta pening til tríggjar smærri verkætlanir í bygdunum Hestur, Kirkjubø, Velbastaður.

Talan er um kr. 150.000,- til rekkverk í Hesti. Tilboð er innkomið frá Nomatek og er prísurin kr. 182.500,- fyri 50 m, uttan mvg. Íroknað er ikki avmontering av gomlum rekkverki og boring av holum. Talan er í fyrst umfari um útskiftan av 30 m. av gomlum rekkverki. Samlaða roknstykkið kemur fram soleiðis: Kr. 120.000,- til nýtt rekkverk og kr. 30.000,- til avtøku og burturbeinan av gomlum rekkverki og boran av holum.

Síðani er talan um kr. 100.000,- til umvæling av bátadráttinum í Kirkjubø. Arbeiðið er mett til kr. 200.000,- og er avtala gjørd við Tórshavnar havn um, at Th skal gjalda helvtina av umvælingini, sum er kr. 100.000,- og økisnevndin kr. 100.000-,.

Kr. 100.000,- skulu nýtast til umvæling av bygdarhúsininum Sólarmagn á Velbastað. Avtala er gjørd við mentamáladeildina um, at býta rokningina í tvey, soleiðis mentamáladeildin skal gjalda helvtina av samlaðu útreiðslunum á kr. 200.000,- sum er kr. 100.000,- og økisnevndin játtar restina kr. 100.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og økissamskiparin mæla til, at játtaðar verða kr. 350.000,- umframt mvg. til hesar tríggjar verkætlanirnar. Peningurin skal játtast av konto 1132111 «fríðkan av kommununi», projekt L62035 vetrarfriðing.

**Økisnevndin 03. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við økisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 156/19 Ljósregulering við Eystara Ringvegur/Hvítanesvegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 120/14 | 14/02605-15 |
| 2 Tekniska nevnd | 26.05.2014 | 144/14 | 14/02605-15 |
| 3 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 23/17 | 14/02605-15 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 70/17 | 14/02605-15 |
| 5 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 95/17 | 14/02605-15 |
| 6 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 59/18 | 14/02605-15 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 281/18 | 14/02605-15 |
| 8 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 244/18 | 14/02605-15 |
| 9 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 273/18 | 14/02605-15 |
| 10 Tekniska nevnd | 12.02.2019 | 6/19 | 14/02605-15 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 42/19 | 14/02605-15 |
| 12 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 37/19 | 14/02605-15 |
| 13 Býráðsfundur | 14.03.2019 | 51/19 | 14/02605-15 |
| 14 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 42/19 | 14/02605-15 |
| 15 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 172/19 | 14/02605-15 |
| 16 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 156/19 | 14/02605-15 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Ætlanin er at fáa gjørt eina kostnaðarmeting fyri at fáa sett upp ljósregulering á vegamótinum Ringvegur/Hvítanesvegur.

Á fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 1,5 mió. til Eystari ringv./Hvítanesvegur – ljósregulering, á konto fyri íløgur, nr. 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur. Mælt verður eisini til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jan Christiansen, metir at besta ferðslu loysnin er, at gera eina rundkoyring og tekur tí ikki undir við at játta pening til ljósregulering.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykkir at mæla býráðnum til at játta kr. 200.000,- fíggjað av kto. 8175 fyri íløgur fyri vegir 2012, til at gera ferðslumeting og kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Bogi Andreasen, vísir til støðuna hjá minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Ferðslunevndin 30. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

Umsitingin leggur fram fyriliggjandi skitsu uppskot j. nr 2012-0279/6.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nógvir ivaspurnignar hava verið frammi um farast skal undir at gera rundkoyring ella ljósregulering. Ì hesum sambandi verður víst til fylgjandi mál:

1. Mál nr. 2002-1244 Rundkoyring við Hvítanesvegin/Eystara Ringveg viðv. uppskoti um rundkoryring upp á Diametur 37 m.

2. Mál nr. 2008-3700 Nevndarviðgerð: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur, Diametur 30 m, kostnaður kr. 14.363.529,- sambært skjali nr. 2008-3699/4.

3. Mál nr. 2008-3699 Fíggjarviðurskifti: Rundkoyring Hvítanesvegur - Eystari Ringvegur viðv. tilboði upp á rundkoyring við ymsum diametrum.

4. Mál nr. 2007-3545 Fyrispurningur til Rambøll viðv. fyrimunum og vansum á vegaøkinum við Eystara Ringveg.

Fyri at fáa staðfest kostnaðin í dags prísum á rundkoyringum sambært omanfyri standandi málum, verður neyðugt at fáa kannað einleikaprísirnar fyri fyriliggjandi uppskotum. Tá hetta er gjørt, ber betri til at samanbera kostnaðarstøðið við uppskotið um ljósregulering á vegamótinum.
Til tess at fáa lýst fyrimunir og vansar ítøkiligari hvat sjálvari ferðsluni viðvíkur, við antin at gera rundkoyring ella ljósregulering, ber til at gera hetta við simuleringum av ferðsluviðurskiftunum á vegamótinum, sum ráðgevi hevur gjørt.

Umboð fyri Rambøll kemur at leggja fram simuleringar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Umsitingin verður biðin um at koma við kostnaðarmeting av rundkoyring við hóskandi diametri og trafikkstýrdari ljosregulering at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt 27.02.2013 saman við ráðgeva gjørt kostnaðarmeting.

**Tekniska nevnd 30. april 2014: Útsett.**

**Tekniska nevnd 26. mai 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjøgnumgingið málið av nýggjum. Tað hava verið fleiri loysnir havdar á lofti bæði við rundkoyringum og ljósregulering. Umsitingin metir, at besta og bíligasta ferðsluloysnin er ein ljósregulering.

Neyðugt er at eftirkanna prosjektuppskotið frá 2012 og at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar. Tá høvuðsprosjektið er gjørt liðugt, verður greitt, í hvønn mun tað verður neyðugt at ogna sær lendi til verkætlanina.

**Víst verður til hesi skjøl**
TK j. nr. 17/00917-3 Rambøll Nyvig – Skitseforslag til overslag

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við loysnini við ljósreguleringini á vegamótinum Hvítanesvegur-Eystari Ringvegur. Mælt verður eisini til at heita á ráðgevan um at gera høvuðsprosjekt klárt til útbjóðingar, og at játta kr. 400.000,- til endamálið av íløgukontoini fyri vegir, konto 8175, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mars 2017: Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Turið Horn samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.**

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men at kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring eisini fyriliggur, tá málið kemur aftur í nevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017: Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.**

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at ein kostnaðarmeting fyri eina rundkoyring fæst til vega, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ljóskurvarnar við vegamótið Hvítanesvegurin – Eystari ringvegur, eru enn nakrar avbjóðingar við at fáa ferðsluna at glíða optimalt. Serliga vísir tað seg at vera torført at fáa ferðsluna at glíða á Eystara ringvegi, móti vegnum Yviri við Strond, í meldurtíðini. Bilrøðin

kann strekkja seg, frá ljóskurvunum og heilt oman móti tyrlupallinum. Hetta ber í sær, at ferðslan frá Hoyvíksvegnum inn á ringvegin eisini verður tarnað.

Umsitingin hevur umrøtt hvør loysnin kann vera og er komin fram til at gera eina høgrasvingsbreyt. Hendan fer at stytta munandi um bilrøðina her, sí viðfestu mynd (Hvítanesvegur – ringvegur_breiðan.jpg). Samstundis skulu setast upp fleiri høgrapílar í vegamótinum.

Tekniska fyrisitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting frá ráðgeva á 1,3 mió. kr. uttan MVG fyri breiðkanina av Eystara ringvegi. Ætlanin er somuleiðis at breiðka Hvítanesvegin frá vegamótinum og oman til Hoydalsá. Her er mettur kostnaður umleið kr. 500.000, umframt útbygging av ljóskurvunum.

Í sambandi við frílendið niðanfyri, móti Hoydølum, er komið ynski um ein ljóðvolla, sum fer at dýrka verkætlanina nakað.

Samlaður kostnaður er mettur til kr. 1,9 mió. kr.

**Tá hetta arbeiði er gjørt, væntar bert at breiðka Eystara ringveg á teininum frá ljóskurvunum og niðan móti rundkoyringini á Hálsi.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður framd sum skjótast og fíggjað av tøkum peningi og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 1,9 mió. av konto 6875 L00001 og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 25. oktober 2018: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 29. november 2018: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið í sambandi við at breiðka Eystara ringveg og Hvítanesvegin oman til Hoydalsá hevur verið í útboði og komu tvey tilboð inn. Frank Hellisdal kann gera arbeiðið fyri kr. 2.359.400,- uttan MVG og Konsax fyri kr. 2.092.410,34 uttan mvg. Umsitingin metir, at leggjast skal upp fyri ókendum útreiðslum, projektering og byggileiðslu. Samlaði kostnaðurin verður sostatt mettur til kr. 2.450.000,- íroknað 6,25% MVG.

Áður eru játtaðar kr. 1.900.000,- til breiðkanina, sostatt mangla kr. 600.000.

Umsitingin vísir á, at væntandi játtan kann fíggjast av kt. 8175, projekt “L81017 Dagføring av Hóvabrekku”, har tað standa kr. 875.000, sum ikki verða nýttar í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:
- at tikið verður av tilboðnum frá Konsax.
- at verkætlanin verður sett í verk skjótast til ber.

- at manglandi játtan uppá kr. 600.000 verður at fíggja av kt. 8175, projekt “L81017 Dagføring av Hóvabrekku.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 12. februar 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.**

**Býráðsfundur 28. februar 2019: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 14. mars 2019: Einmælt samtykt við aðru viðgerð.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at breiðka Eystara ringveg og Hvítanesvegin oman til Hoydalsá er í gerð og gongur væl. Tó eru 2 viðurskifti sum støða skal takast til, tað er:

1) Sambært frílendisætlanini í Hoydølum, skal ein ljóðvolli gerast fram við vegnum, hesin var upprunaliga við í ætlanini, men er tikin burtur úr ætlanini, tá sparingar eru gjørdar, áðrenn sáttmálin varð undirskrivaður.
   Umhvørvisstovan hevur gjørt vart við hetta og hevur umsitingin havt fund við Umhvørvisstovuna um málið. Partarnir vóru samdir um, at kanna eftir um tað ber til at gera eina grótlaðing á sama hátt sum á hinari síðuni av vegnum.

   *Umsitingin er í gongd við at kanna, hvat tað kemur at kosta og verður metingin løgd fram á fundinum.*

2) Konsax hava áður gjørt vart við, at tað í útbjóðingartilfarinum er roknað við alt ov lítlum nøgdum av gróti til uppfylling. Umsitingin vendi sær til ráðgevan við hesum, fyri at fáa gjørt nýggjar útrokningar og upplýsti ráðgevin, at tær nøgdir sum vóru uppgivnar í útbjóðingartilfarinum, vóru rættar.
   Nú arbeiðið er komið væl áleiðis, vísir tað seg, at tað fer nógv meira grót í enn uppgivið í útbjóðingartilfarinum. Sambært sáttmálanum skal byggiharrin gjalda fyri meira veitingar í mun til uppgivnu nøgdirnar í sáttmálanum.
   Tað eru 2 møguleikar:

   a) At játta meira fígging til arbeiðið, soleiðis at alt arbeiðið kann gerast liðugt sambært sáttmálanum.

      *Umsitingin er í gongd við at kanna eftir hvat tað kemur at kosta og verður metingin løgd fram á fundinum.*

   b) At projektið verður broytt, soleiðis at breiðkanin av Hvítanesvegnum ikki verður heilt oman til Hoydalsá, men bara nakrar metrar oman frá Eystara ringvegi.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. ein millión afturat til arbeiðið, av konto 6177, orku- og umhvørvistiltøk, soleiðis at arbeiðið kann gerast liðugt, íroknað grótkant oman ímóti fríøkinum, og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019: Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 157/19 Umsókn um keyp ella brúksrætt til part av matr. nr. 115, Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 77/19 | 19/01445-2 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 27.05.2019 | 3/19 | 19/01445-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 169/19 | 19/01445-2 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 157/19 | 19/01445-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Borgari í Hoyvík eigur ognina á 45 fermetrar, matr. nr. 115 í Nólsoy.
Ognin er eini 250 ára gomul hús, ið eru bygd mestsum á allan matrikulin
Húsini verða brúkt til summarhús.

Søkt verður um at keypa ella fáa brúksrætt yvir eitt øki á 30 fermetrar framman fyri húsini, har ætlanin er at gera eina steingøtu frá vegnum yvir til húsini, og at planta hjálpirøtur og líknandi, eins og økið sum er plantað vestan fyri húsini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, biðið verður um, liggur í litra x, sum er vegur.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið til ummælis á øðrum deildum.

**Skjøl**
19/01445-3 umsókn um brúksrætt til økið, við kortskjali.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at brúksrættur verður veittur til økið í eitt avmarkað tíðarskeið á 10 ár við møguleika fyri at leingja eftir at tíðarskeiðið er runnið, treytað av at økið verður hildið, at økið ikki verður girt inni og ikki verður bygt á økinum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at gera avtalu við umsøkjara.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í Nólsoyarnevndina.

**Ískoyti:** Umsitingin hevur gjørt uppskot til brúksavtalu. Sí skjal 19/01445-5.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera eina 10 ára brúksavtalu við umsøkjara, sí uppskot til brúksavtalu skjal 19/01445-5

**Nólsoyarnevndin 27. mai 2019:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum, men at ein heildarætlan verður gjørd og at man fer undir at fríðka og røkja bygdina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at taka undir við Nólsoyarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 158/19 Kommunalar útstykkingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 126/19 | 19/02316-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 199/19 | 19/02316-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 158/19 | 19/02316-1 |

**Upprunin til málið:**

Stórur bústaðartørvur er í kommununi, og tørvur er á at fáa eina yvirskipaða lýsing og raðfesting av, hvar útstykkingar til bústaðir skulu fyrireikast og setast í verk.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útstykkingar í kommununi eiga at byggja á eina langtíðarplanlegging, ið hóskar til tørvin. Kommunuætlanin, sum væntandi er liðug við ársskifti 2019/2020, viðger hvussu býurin skal útbyggjast og hvar hóskandi byggilendi er.

Í kommunuætlanini verður býtið millum sethús og íbúðir viðgjørt. Í 2017 vóru 72% av øllum bústøðum í kommununi sethús. Skotið upp, at býtið millum bústaðasløgini í framtíðini verður 60% sethús 20% tvíhús/raðhús og 20% íbúðir.
Skotið verður upp at framtíðar bygging verður framd út frá hesum karmi.

| *Bústaðarslag* | *Bústaðir í 2018* | *2024* | | | *2032* | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | *Uppskot vøkstur* | *Bústaðir í alt* | *Bústaðir í %* | *Uppskot vøkstur* | *Bústaðir í alt* | *Bústaðir í %* |
| ***Sethús*** | *5.200* | *400* | *5.600* | *67* | *1.000* | *6.200* | *61* |
| ***Tvíhús/raðhús*** | *1.200* | *300* | *1.500* | *18* | *700* | *1.900* | *19* |
| ***Íbúðir*** | *800* | *500* | *1.300* | *15* | *1.300* | *2.100* | *20* |
| ***Í alt*** | *7.200* | *1.200* | *8.400* | *100* | *3.000* | *10.200* | *100* |

*Við tí væntaða fólkavøkstrinum verður tørvur á umleið 1200 bústøðum afturat í 2024 og so uppaftur 1800 bústøðum áðrenn 2032. Fólkavøkstur og harav bústaðarvøkstur er tó torført at meta um, tá hugt verður langt inn í framtíðini. Tí er áhaldandi neyðugt at dagføra tølini og framskrivingarnar og tær ætlanir, ið eru tengdar at framskrivingunum.*

*Størsti vøksturin og størsti tørvurin er í miðstaðarøkinum, men bygdirnar eiga eisini at verða raðfestar.*

*Fyri at tryggja, at bústaðabygging støðugt er møgulig, er neyðugt at seta myndugleikaviðgerð á fleiri av økjunum í gongd, soleiðis at byggisamtyktin hóskar til virksemi ið er ætlað, og at kommunan ognar sær lendi, har tað er neyðugt.*

# Íbúðabygging/raðhús:

**Stórabrekka útstykking:**
Skipanaruppskot hevur verið til politiska viðgerð.
Skipanaruppskotið fyri Stórubrekku fevnir um trý klingruskap við ávikavist raðhúsum og íbúðum. Lagt verður upp til, at klingruskapið í miðjuni (byggistig 1), sum somuleiðis er størsta skapið av teimum trimum, verður skipað sum raðhúsabyggingin nevnd omanfyri, at grundin

og eldverjaveggirnir fyrst verða gjørdir, og síðani seta einstøku keypararnir sín dám á bygginigina. Treytir viðvíkjandi skapi og útsjónd, sum skapa eina heildarmynd av bygginigini, verða ásettar í serstaka byggisamtykt. Tað kann t.d. vera, at allar tekjurnar skulu vera eins fyri at skapa eitt samanhangandi strekki og heildarmynd fyri byggingina.

| | 1. byggistig | 2. byggistig | 3. byggistig |
|---|---|---|---|
| Stovnur | 1000 m2 | Stovnur/Lættari vinna | Stovnur/Lættari vinna |
| Raðhús | 19 | 20 | 6 |
| Íbúðir punkthús | 18 | 12 | 6 |
| Íbúðir raðhús | 28 | 24 | 14 |
| p-pláss | 88+5 | 94+5 | 24+5 |

Samtykt á býráðsfundi 23. Mai 2019, at heimila umsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av 1. byggistigi at leggja fyri nevndina aftur.

**Ogn:** Tórshavnar kommuna
**Treytir fyri bygging:** Byggisamtyktarøki A3, serstøk byggisamtykt skal gerast
**Stødd:** uml. 60.000 fermetrar íroknað vegir og fríøki
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Verður viðgjørt í.s.v. prosjektering
***At raðfesta prosjektering í 2019-2021***

**Frúutrøð:**
**18/00950 Íbúðarbygging á Frúutrøð**
Av tí at eingi tilboð komu inn, tá Frúutrøð varð bjóðað út til íbúðarbygging, so hevur verið arbeitt við øðrum íbúðarbyggingum í kommununi. Men gundað á bústaðartørvin í kommununi hevur tað verið ynskiligt at fara undir hesa verkætlan aftur, og fyrst í árinum vísti Bústaðir áhugan í at fara undir eitt samstarv um hesa verkætlan.
Ein hugskotsætlan við 4 ymiskum uppskotum er gjørd, og hevur býráðið samtykt at arbeiða víðari við uppskoti 1.

Uppskot 1 er – uttan musikkskúlan og við p-kjallara:
- Talan er um 2700 bygdar fermetrar við 34 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
- Parkeringskjallarin verður í einum dekki gjørdur til 70 akfør, men í tveimum hæddum til 140 akfør.

**Býráðssamtykt 23. mai at:**
- umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina samstarvið við Bústaðir í einum partalagssáttmála
- farið verður undir at gera masterplan av økinum
- farið verður undir at gera boriroyndir og kunnandi tilfar til grannarnar í økinum, og at málið verður beint í at eitt ávíst tal av íbúðum í verkætlanini skal markast til eldri borgarar.

Tað skal tó nevnast, at hetta er eitt yvirskipað innleiðandi hugskot, og í eini møguligari framhaldandi tilgongd kann skipanin broytast rættiliga nógv.
Bústaðir hava víst á ynski um at skipa verkætlanina á líknandi hátt, sum samstarvið við Finsen varð skipað. Í hesum sambandinum verður neyðugt at nágreina leiklutin hjá báðum pørtunum nærri.

**Ogn:** Tórshavnar kommuna.
**Treytir fyri bygging:**
**Stødd:**

**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Má viðgerast nærri
***At raðfesta 2019-2021***

**undir Fjalli:**
Skipanaruppskot er gjørt.
Uppskotið skipar økið við ymiskum slag av bústøðum, bæði í skapi, hædd og slag, umframt at lendi er lagt av til tveir stovnar í økinum. Uppskotið lýsir møguleikarnar fyri at byggja karré bygging við innara garði, ið verjir móti veður og vindi, blokkar, ið eru skiftandi í skurði, bygging, ið veksur í skala frá sethúsastødd til íbúðarblokkar og lágari bústaðarbygging, ið veksur í hædd upp móti fjallasíðuni. Møguligt er at skipa ymisku byggingina við íbúðum, raðhúsum og sethúsabygging.
Harumframt er grøni parturin av økinum skrásettur, og uppskot til hvussu frílendini verða innarbeidd í útstykkingina er lýst, umframt at víst er á grøna kílan, sum kann styrkjast allan vegin oman í innara part av vesturbýnum.
Næsta stig í ætlanini at skipa økið er at kanna, hvussu hon kann skipast í mun til vegir, bústaðir og stovnar á skynsamasta hátt. Mælt verður til, at fáa uttanhýsis ráðgeva at rætta skipanaruppskotið til.
Neyðugt verður at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at ymiska bústaðarbyggingin kann fremjast og verður hetta gjørt í sambandi við arbeiðið at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.
Yvirskipað skipan av økinum er samtykt á býráðsfundi 13.12.2018.

**Ogn:** Tórshavnar kommuna
**Treytir fyri bygging:** Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í mun til ætlanina.
**Stødd:** uml. 60.000 fermetrar
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Útstykkingin er treytað at linjuføring av høvuðsvegi frá Ytra ringvegi til Marknagilsvegin er fastløgd. Útstykkingin skal tilpassast vegaføringina.
***At raðfesta 2022-2025***

**Kollafjørður:**
Eins og aðrastaðni í kommununi eigur íbúða-/raðhúsabygging at verða fyrireikað í Kollafirði.
Øki eru sett av til bústaðabygging í Kollafirði.
í Líðini og Lygnnesi A1 øki og á Kjalnesi A3 øki.
**Ásetingar fyri  A1**

> *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

**Ásetingar fyri A3 øki**

> *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

Tórshavnar kommuna eigur ognina á Lygnnesi, so hon er løtt at fara undir.

**Ogn:**  á Kjalnesi og í Líðini Føroya Jarðargrunnur
**Ogn:** á Lygnnesi Tórshavnar kommuna
**Treytir fyri bygging:** Byggisamtyktarøki A1 og A3, men serstøk byggisamtykt skal gerast.
**Stødd:** á Lygnnesi 3200 fermetrar
**Stødd:** á Kjalnesi 4000 fermetrar
**Stødd:** í Líðini 1300 fermetrar
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Má viðgerast nærri

***At raðfesta 2019-2021***

## Sethúsaútstykkingar:

**Kaldbak:**
Mál nr. 19/02482 útstykking til sethús í Kaldbak
Byggisamtyktarliga liggur økið, sum ætlanin er at útstykkja á, í A-øki í byggisamtyktini fyri Kaldbak. Sambært ásetingunum fyri A-øki í Kaldbak, skulu grundøki vera í minsta lagi 500 $m^2$ til støddar, meðan býráðið kann loyva, at stykkið um sethús í bygdini verða niður til 300 $m^2$ til víddar. Grundøkini, sum er teknaði í útstykkingarætlanini, eru uml. 400 $m^2$ til støddar, og lúka ásetingar fyri økið.
Skipanaruppskot fyriliggur og kostnaðarmeting er gjørd.
Málið er klárt at leggja fyri nevnd.

**Ogn:** Føroya Jarðargrunnur
**Treytir fyri bygging:** Byggisamtyktarøki *A øki til sethús*
**Stødd:** uml. 2500 fermetrar
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Skipanaruppskot fyriliggur
***At raðfesta 2019-2020***

**Sethúsaútstykking við Miðhorn**.
Økið liggur sum óbygt millum býlingar. At byggja á økið verður við til at tætta býin sum bindingarlið millum verandi býlingar. Lendið verður gagnnýtt á bestan hátt, um tað verður raðfest til bústaðarbygging.
Fyri at seta skjøtul á arbeiðið at fyrireika sethúsaútstykking við Miðhorn, er neyðugt at gera neyðugar forkanningar og eina útstykkingarætlan, sum umframt at tryggja skilagóða bygging, er við til at staðseta byggingina, atkomu, parkering, fríøki v.m.
Økið, ið víst verður á, liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
4. Grundumráði er í høvuðsheitum til landbúnað, alment frílendi og tílíkt. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

**Ogn:** Tórshavnar kommuna.
**Treytir fyri bygging:** Almenna byggisamtyktin skal broytast fyri økið, um farið verður undir útstykkingina, soleiðis at økið verður fevnt av ásetingunum fyri A1 øki.
Helst skal serstøk byggisamtykt somuleiðis gerast fyri økið.
Skipanaruppskot skal bjóðast út til eksternan ráðgeva.
**Stødd:**Talan er um uml 30.000 fermetrar øki til grundstykki, fríøki og vegaatkomu
**Teknisk viðurskift, vegir og leiðingar:** Má viðgerast nærri
***At raðfesta 2019-2021***

**Velbastaður:**
Umsitingin hevur arbeitt við at lýsa møguleikar fyri bygging á Velbastað. Tosað hevur verið um raðhúsa- ella íbúðabygging undir Borgarhálsi. Mett verður at lendið undir Borgarhálsi er dýrt at gera byggibúgvi, tí at hæddarmunurin er so stórur. Eisini eigur at ansast væl eftir, at bygdadámurin av Velbastað ikki verður spiltur.
Kanningar av byggiøki framvið Syðradalsvegnum stuðla undir at farast kann undir útstykking av sethúsum.

Umsitingin metir at lættasti máti at fáa til vega byggiøki á Velbastað er, at kommunan ognar sær lendið frá Føroya Jarðargrunni.
Tosað varð við Landsverk um málið. Landsverk tekur undir við at byggjast kann framvið vegnum, men kann vera, at Landsverk seta treytir um frástøðu til vegin.
Um so er, verður møguliga neyðugt at kommunan yvirtekur vegin.

**Ogn:** Føroya jarðargrunnur
**Treytir fyri bygging:** Byggisamtyktarøki B, sethús
**Stødd:**
Við Syðradalsveg uml. 7800 fermetrar.
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Má viðgerast nærri
***At raðfesta 2019-2020***

**Nólsoy skipan av havnaøkinum:**
Tórshavnar Havn hevur heitt á Býarskipanardeildina um at broyta byggisamtyktina, soleiðis at minkað verður um havnaøkið í Nólsoy. Arbeitt hevur verið við at skipa havnaøkið, so tað kann gerast ein virkin býlingur, við bústaðabygging, mentanarbygging og vinnubygging. Hesar broytingar skulu innarbeiðast í byggisamtyktina.
Samtykt í B&B og vinnunevndini í nov. 2018, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum, samskiftir við áhugabólkar, hevur borgarafund í Nólsoy, og leggur málið fyri aftur tá endaliga uppskotið er liðugt. Borgarafundur, ið varð ætlaður fyrst í juni, varð útsettur til september.

**Ogn:** Tórshavnar kommuna
**Treytir fyri bygging:** Byggisamtyktarøki *C havnaøki*
**Stødd:** Samlaða havnaøkið er uml. 16.000 fermetrar.
**Teknisk viðurskifti, vegir og leiðingar:** Má viðgerast nærri

***At raðfesta skipanaruppskot í 2020***

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
19/02316-2 ávegis lýsing og raðfesting av byggiøkjum í kommununi við kortskjølum.
17/01822-9 Stórabrekka-byggiskrá UPPRUNALIG 111218
18/03813-2 Nólsoy – uppskot

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at tikið verður undir við hesari raðfesting fyri kommunalar útstykkingar.

Útstykkingar til Íbúðabygging og raðhús:
2019-2021 Stórabrekka raðhús
2019-2021 Frúutrøð
2022-2025 undir Fjalli
2019-2021 Íbúðabygging í Kollafirði

Útstykkingar til sethús:
2019-2020 Útstykking til sethús í Kaldbak
2019-2021 Sethúsaútstykking við Miðhorn
2019-2020 Velbastaður sethúsabygging

Heildarætlan:
2020 Skipan av havnaøkinum í Nólsoy

Og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
Tilmæli til fígging verður framlagt á fundinum.

Mælt verður eisini til at játta kr. 1 mió. av kt. 6475 – L00001 Byggibúning bústaðir (íløgur).

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørg Dam, tekur ikki undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við ætlanini.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 159/19 Vágsbotnur - skipan av økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 44/18 | 18/00808-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 78/18 | 18/00808-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 58/18 | 18/00808-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 127/19 | 18/00808-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 196/19 | 18/00808-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 159/19 | 18/00808-1 |

**Upprunin til málið:**
Skipan av økinum í Vágsbotni er ein liður og møgulig verkætlan í miðbýarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Trappan, søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið. Vágsbotnur er sostatt ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Men torgið og uttanum økið er í dag ikki serliga væl skipað í mun til hvørt annað og virksemið á staðnum, ferðslu, trygd v.m. og vantar ein betri skipan og heildarloysn fyri økið.

Í sambandi við at skipa økið í Vágsbotni, skal pláss vera fyri gerandisdegi og veitslu, og hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast.

Torgið kann skapa betri møguleikar til uttandura virksemi sum t.d. marknaðardagar, borðreiðing og spæl. Ein partur skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men ynskið er at flyta koyribreytina fyri at skapa eitt størri samanhangandi og vælvirkandi torg.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera skipanaruppskot av torginum og at íverkseta projektering til skipan av økinum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til fyrireikandi arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 28.02.2019 varð í málinum Miðbýarætlan - Steinatún, journal. nr. 14/05065, samtykt at játta 1 mió. kr av verkætlanini L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum til býartorgið í Steinatúni.

Arbeiðið at gera skipanaruppskot og at íverkseta projektering til skipan av økinum í Vágsbotni varð av tí orsøk útsett. Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini Marin Katrina Frýdal ynskir nú at fara í holt aftur við fyrireikandi arbeiðið, men verkætlanin vantar játtanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275, L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 160/19 Umsókn um broyting av byggisamtykt til A1 øki í samband við makaskifti millum matr. nr. 157 og matr. nr. 92a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 2/19 | 17/03594-2 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 19/19 | 17/03594-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 116/19 | 17/03594-2 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 160/19 | 17/03594-2 |

**Upprunin til málið:**
Búnaðarstovan hevur sent Tórshavnar kommunu umsókn vegna bóndan í Homrum í Kollafirði, har ynski er at fáa loyvi til at skifta um matr. nr. 157, sum eru 3 stykkir við økið rundanum matr. nr. 92b, sum eru hansara sethús á Tungu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyri at umbýtið kann verða framt millum Búnaðarstovuna og festaran, má byggisamtyktin broytast soleiðis, at økið verður broytt frá at vera D1 (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál) til A1 (bústaðarøki).
Økið er 3.258 m$^2$ til støddar.

Stykkið, sum húsini standa á, er undir 100 m$^2$ og verður uppskotið framt í verki, fær festarin 400 m$^2$ afturat, soleiðis at hann fær hóskandi grundstykki til húsini.
Ein festari kann keypa lendi sambært lógini um løgtingslógini um landsjørð, § 6.

Í sambandi við viðgerðina av umsóknini um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 92b, Kollafjørður, hevur umsitingin hjá kommununi havt eitt størri øki omanfyri nýggju útstykkingina í Hamrabøi við í viðgerðini, sí kortskjal *Eftir broyting*. Í økinum eru matr. nr. 92b (privatur eigari), matr. nr. 99 (privatur eigari) og matr. nr. 92a (Búnaðarstovan). Skotið verður upp, at økið, sum er víst á viðhefta kortskjali *Eftir broyting*, verður broytt frá D1 øki og 4. Grundumráði til A1 øki, ætla bústaðabygging. Eftirspurningurin eftir sethúsagrundøkjum í kommununi er stórur, øll stykkini í kommunalu útstykkingini við Hamrabø eru umbiðin, og hevði hettar økið ligið sum ein natúrlig leinging av bústaðarøkinum, sum er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri D1, A1 og 4. Grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru:

Kap. 4, §5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði
*Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tilíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Kap. 4, §23. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði*
*Stk. 1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tilíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*
*Stk. 2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Kap. 4, §26. Ásetingar fyri 4. Grundumráði
*Stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

Løgtingslóg um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 15. mai 2014:
**§ 6.** 2) *Festari kann keypa innstøðu, sethús, fjós og aðrar bygningar við hóskandi undirlendi, sum hoyra til festið. Sethús kann hann keypa sjálvur ella saman við hjúnafelaga. Undantiknir keypsrættinum eru bygningar o.a., sum hava serligan fornfrøðiligan ella annan týdning fyri landið at eiga. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi sølu til festara, uppi í hesum, hvat er undantikið at kunna seljast.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av matr. nr. 99, Kollafjørður, sum ynskir, at hennara ogn verður partur av hesi broyting, og verður broytt frá 4. Gurndumráði til A1 øki.

Hoyringsskriv er sent Búnaðarstovuni og hava teir onga viðmerking til broytingina.

**Skjøl**
*Eftir broyting,* journal nr. 17/03594-10.
*Áðrenn broyting,* journal nr. 17/03594-10.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært kortskjølunum, soleiðis at eigarin fær grundstykki til húsini, og festarin og Búnaðarstovan kunnu fremja umbýti og matrikuleru viðurskiftini fáast í rættlag og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, vísandi til at hon er ógegnig.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at broytingin í almennu byggisamtyktini hevur ligið til almenna hoyring, er fornfrøðideildin hjá Tjóðsavninum komin við eini viðmerking/kunning um økið, sí skjal *Kortskjal og frágreiðing um fornminni í Hamrabø frá 2003 opt*. Í økinum eru jarðfest fornminni, m.a. fyrndarbýlingurin í Homrum, bønhús, kirkjugarður o.a.

Grundað á nýggju vitanina, er broytingaruppskotið tillagað og A1 økið minkað munandi, sí skjal *eftir broyting 21.05.19.*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæli til at góðkenna nýggja broytingaruppskotið fyri almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjali *eftir broyting 21.05.19*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson og Bjørg Dam luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 161/19 Broyting av serstøku byggisamtyktini undir Gráasteini, matr. nr. 1116a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 212/18 | 18/03782-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 277/18 | 18/03782-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 114/19 | 18/03782-1 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 161/19 | 18/03782-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, viðvíkjandi íbúðarbyggingini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2017 varð serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini gjørd. Serstaka byggisamtyktin skipaði økið við sethúsum, tvíhúsum og íbúðum. Ásetingar viðvíkjandi bygging var samsvarandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, t.v.s. at mest loyvda hædd til mønuna var 9 m. Fyri hús við einvegis takhalli, var mest loyvda hædd 6 m í tí lægru síðuni og 7,5 m í tí hægru síðuni. Sí skjal *serstøk byggisamtykt – áðrenn broyting.*

Eftir at serstaka byggisamtyktin varð gjørd, eru ætlanirnar fyri byggingina av íbúðum broyttar at sindur. Upprunaliga var ætlanin at byggja 5 íbúðareindir í tveimum hæddum, t.v.s. 10 íbúðir íalt. Umsøkjarin søkir nú um at broyta byggisamtyktina, soleiðis at íbúðarbyggingin kann byggjast í trimum hæddum og at mest loyvda hæddin á hesi bygging er 8,5 metur, sí skjal *2018.10.26.Síðumynd.pdf*. Somuleiðis er skipanin av økinum eitt lítið sindur øðrvísi enn upprunaliga ætlað, m.a. við tað at felagsøkið er staðsett aftanfyri nýggja íbúðarbygningin, sí skjal *2018.10.26.Støðumynd.pdf*.

Býarskipanardeildin metir, at tað er ráðiligt at broyta hæddarásetingarnar fyri íbúðarbyggingina í serstøku byggisamtyktini. Tað er stórur lendismunur í økinum, og nýggja útstykkingin liggur væl lægri enn verandi íbúðarbygging við Heimasta Horn. Umsøkjarin hevur sent lendisskurð, sum vísur, at ein íbúðarbygningur, sum er uml. 8,5 metur høgur, ikki kemur hægri upp enn niðasta íbúðin á Heimasta Horni, sí skjal *2018.10.26.Lendisskurður.pdf* og *2018.10.16.Síðumynd.pdf*, og ávirkar tískil hvørki útsýnið ella ljósviðurskiftini hjá aftanfyri liggjandi bústøðum.
Harumframt hevur broytingin við sær eitt líðandi skifti millum lága og høga bygging í økinum – frá sethúsum, til íbúðarbygging í trimum hæddum, til íbúðarbygging í 5 hæddum.

Skipanin av økinum er broytt eitt sindur, og er fríøkið nú staðsett aftanfyri íbúðarbygningin. 27 p-pláss eru á økinum, tvs. 1,8 pr. Íbúð.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og ásetingarnar í økinum eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*
  *Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handalar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at*

*hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

- *Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.*

- *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús.*

- *Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*

- *Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

- *Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

- *Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk.5, tá ið økið verður roknað sum heild.*
  *Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*
  *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetigum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Broytingin í byggisamtyktini er í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu, ið leggur upp til fleiri íbúðir í býnum.

Í sambandi við endaligu matrikulering verður makaskifti framt millum matr. nr. 1116a og 1116b, sí skjal *2018.10.26.Støðumynd.pdf*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsókn um góðkenning av útstykkingarætlan á matr. nr. 1116a, Tórshavn, journal nr. 16/04386.
Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavn, journal nr. 17/00503.
Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavna, journal nr. 17/00753.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt – áðrenn broyting,* journal nr. 18/03782-2.
*2018.10.26.Lendisskurður.pdf,* journal nr. 18/03782-4.
*2018.10.26.Síðumynd.pdf*, journal nr. 18/03782-5.
*2018.10.26.Støðumynd.pdf*, journal nr. 18/03782-6.
*Serstøk byggisamtykt – broytingar,* journal nr. 18/03782-7.
*Skipan,* journal nr. 18/03782-8.
*Yvirlit,* journal nr. 18/03782-8.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina av hæddarásetingunum fyri íbúðarbygging í serstøku byggisamtyktini, nýggju skipanina av økinum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at broytingin av serstøku byggisamtyktini hevur ligið til almenna hoyring, frá 14. desember 2018 til 25. januar 2019, hevur Tórshavnar kommuna móttikið 4 mótmæli, øll frá grannum.

Grundgevingarnar, ið verða førdar fram í mótmælunum, eru í høvuðsheitum hesar:

1. Spurnartekin verður sett við, um ein 5 metrar breiður atkomuvegur lýkur vanlig krøv til so nógvar búeindir.
2. Heitt verður á kommununa um ikki at geva undantaksloyvi frá at gera veg til útstykkingina.
3. Tað verður mett at vera neyðugt við gongubreyt fram við vegnum.
4. Spurnartekin verður sett til, um nokk parkeringspláss eru, og mett verður at skipanin av teimum sær tilvildarlig og óseriøs út.
5. Spurnartekin verður sett við, um ein íbúðarblokkur í 3 hæddum hóskar seg í einum sethúsa umhvørvi.
6. Mett verður, at nýggja byggingin fer at taka útsýnið frá íbúðunum á Heimasta Horni.
7. Mett verður ikki, at tekningarnar viðvíkjandi hædd av bygningunum geva eina rætta mynd av umstøðunum.
8. Hátturin at fremja almennar hoyringar verður kritiseraður. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna boðar fólki í nærumhvørvinum frá.

M.a. grundað á mótmælini, er uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini broytt nakað. Nýggja uppskotið skipar økið í tríggjar eindir, sí skjal *Økir*:

1. Stakhús
- Grundøki við verandi stakhúsum. Grundøkið er uml. 400 $m^2$.

2. Íbúðarøki

- Íbúðarøkið hevur í alt 18 íbúðir.
- Íbúðarbygningur A hevur 14 íbúðir, er í trimum hæddum og mest loyvda hædd er 9,5. Kortskjal 3 í serstøku byggisamtyktini er við til at tryggja íbúðunum á Heimasta Horni útsýnið, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini 31-05-19,* kortskjal 3.
- Tveir íbúðarbygningar B eru á íbúðarøkinum. Hesir hava báðir tvær íbúðir í hvørjum bygningi, eru í tveimum hæddum og hæddarásetingarnar eru sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
- Vegurin inni á íbúðarøkinum er 7 m breiður og parkeringin er sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Skipanin av vegi og parkering er góðkend av teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu.

3. Vegur

- Vegurin, sum er til íbúðarøkið verður lagdur sum ein matrikul fyri seg, við møguleika fyri, at Tórshavnar kommuna kann yvirtaka hann, tá hann er liðugt gjørdur.
- Ein partur av vegnum er 5 m breiður og ein partur av vegnum er 6,25 m breiður.
- Við endan av vegnum er eitt vendipláss.
- Vegabreiddin er góðkend av teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu og mett verður ikki, at neyðugt er við gongubreyt.

Nýggja uppskotið til skipanina av økinum fevnir harumframt um eina gonguleið millum matr. nr. 1116a og hagan omanfyri. Hendan gonguleiðin gevur møguleika fyri, at samband kann fáast við m.a. rossagøtuna og fótbóltsvøllin undir Gráasteini, og kann hettar verða til gagns fyri íbúgvarnar í økinum og almenningin annars.

Umframt nýggja broytingaruppskotið, so hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hesar viðmerkingarnar til mótmælini:

Ad. 5. Býarskipanardeildin metir, at tað er ráðiligt at broyta hæddarásetingarnar fyri íbúðarbyggingina í serstøku byggisamtyktini. Tað er stórur lendismunur í økinum, og nýggja útstykkingin liggur væl lægri enn verandi íbúðarbygging við Heimasta Horn. Harumframt hevur broytingin við sær eitt líðandi skifti millum lága og høga bygging í økinum – frá sethúsum, til íbúðarbygging í trimum hæddum, til íbúðarbygging í 5 hæddum.

Ad. 8. Øllum er tryggjað smbr. §6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi.

Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða "hoyrdir" í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

*"Á vanligan hátt kunngera"* verður lisið sum kunngera á heimasíðu, skal lýsast í avísum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal skriv til ávísar borgarar. Tað at broyta eina byggisamtykt er at meta sum eitt reguleringsamboð og kann samanberast við "lóggávubroyting" og rakar yvirskipað.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna nýggja broytingaruppskotið, sambært skjali *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini 31-05-19* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 162/19 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Kirkjubøur Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 115/19 | 19/01792-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 162/19 | 19/01792-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna hevur samtykt at selja part av matr. nr. 255a undir Kongavarða, Argir til privat felag, ið skal byggja leiguíbúðir á økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum er samtykt at selja til leiguíbúðir, liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sambært ásetingunum fyri A3 øki kann, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið, byggjast íbúðir.

Sambært skipanaruppskotinum, er talan um 94 íbúðir í ymsum støddum við tilhoyrandi felags parkeringsøki og fríøki. Bygt verður í trimum og fýra hæddum, og ein skurður í serstøku byggisamtyktini ásetur mest loyvdu hæddina fyri byggingini, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir kongavarða,* fylgiskjal 3. Hendan hæddin er ásett fyri at tryggja, at sethúsaútstykkingin við Klingurstjørn varðveitir útsýnið. Annars eru aðrar ásetingar um bygging, so sum byggi- og nýtslustig, frástøða frá marki og nøgd av parkeringsplássi, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

§7, stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Stk. 2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Byggistig 0,3.

Stk. 5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.

Stk. 6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Stk. 7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5.

Stk. 8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.

Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/01973 – Íbúðarbygging undir Kongavarða.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt undir Kongavarða* – journal nr. 19/01792-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt undir Kongavarða sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt undir Kongavarða,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 163/19 Áheitan um at fáa kunning um eftirmetingina av nýggju bussleiðini og víðari tilgongdina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 163/19 | 19/02464-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðslimurin Bjørg Dam ynskir at fáa kunning um eftirmetingina av Bussleiðini og víðari tilgongdina í hesum máli.

Spurningarnar eru m.a. hesir:
Hvussu nógvar áheitanir komu inn frá borgarum og stovnum til eftirmetingina av bussleiðini.
Hvat snúgva áheitanirnar seg í høvuðsheitum um?
Nær verður eftirmetingin liðug?
Hvørjar broytingar verða gjørdar?
Nær verða broytingarnar settar í verk?
Hví vóru busssteðgistøðini tikin niður áðrenn eftirmetingina ?
Hvat væntast umleggingin av bussleiðini at kosta tá, hon er komin í rætt lag ?

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. juni 2019 | Blað nr.: 677 |
| | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Málið umrøtt.

# 164/19 Áheitan um at endurskoða vegir, ferðslu og kollektivu ferðslu í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 164/19 | 19/02467-2 |

**Upprunin til málið:**
Bjørg Dam, býráðslimur biður um at fáa niðanfyri standandi evnið á skrá til umrøðu til komandi býráðsfund.

Eg ynski, at seta gangandi fólkið í kommununi á dagsskrá, við serligum atliti at gonguteigum í kommununi. Hetta, hvat viðvíkir hugburði, staðseting, útsjónd, viðlíkahaldi, tørvi, manglandi virðing og yvirskipað, at fáa eina politiska uppraðfestan av gongufólki í ferðsluni til fyrimuns fyri heilsu, umhvørvi og búðskap.

Í dag eru sera nógvir gonguteigar slitnir, ófulfíggjaðir og fylgja ikki ásettu normunum fyri gonguteigar.

Treytin hjá gongufólki er, at neyðugt er at ganga yvir um vegin har bilarnir eru. Uppgávan hjá kommununi er, at gera tað so trygt sum til ber.

Nógv tora illa at ganga úti í ferðsluni, tí farleiðin er ov ótrygg. Nógv foreldur tora illa ella als ikki, at lata børnini ganga sjálvi og koyra heldur børnini í skúla, til ítriv o.a. Koyristólsbrúkarar og illa gongd kunna ikki ferðast í pørtum av kommununi, vegna manglandi gonguteigar og ov høgar kantsteinar.

Bilarnir fylla nógv og útlitini eru fyri, at fleiri og fleiri bilar verða. Serliga tá undirsjóvartunnilin letur upp. Hagtøl vísa, at bilasølan økist ár um ár. Hagtøl vísa, at lívstílssjúkur gerast alstamt vanligari, eisini hjá børnum. Umhvørvisárinini av bilum eru stór. Fíggjarliga er skilagott at ganga, og meira rørsla er góð fyri sinn og skinn.
Sostatt er eyðsæð, at tað eru sera stórir fyrimunirnir innan heilsu, búskap, trivnað og umhvørvi fyri bæði land og kommunu, um fleiri fólk ganga.

Tí haldi eg, at tað hevur alstóran týdning, at vit í Tórshavnar kommunu fara at endurskoða okkara vegir, ferðslu og kollektivu ferðslu. Serliga við atliti til gongufólkaknútapunkt so sum busssteðgistøð, skúlar, dagstovnar, ítróttaanlegg við meira, og við verandi gonguteigar, tí teir eru á teimum tann bleyta og harða feðslan møtast.
Við at bøta um og endurnýggja gonguteigarnir, og miðvísum arbeiði fyri hugburðsbroyting fáa vit nógv fleiri út at ganga.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Málið umrøtt.

# 165/19 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1378, Tórshavn til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 70/19 | 19/01483-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.05.2019 | 92/19 | 19/01483-3 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 124/19 | 19/01483-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 124/19 | 19/01483-3 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 165/19 | 19/01483-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umhvørvisstovan biður um ummæli til at sundurbýta eina útstykking á matr. 1378 millum Oyggjarvegin og Vestara Ringveg.

Umsóknin til Umhvørvisstovuna er um at sundurbýta 6 grundøkir í 3 stykkir á 500 fermetrar og 3 stykkir á 467 fermetrar.

Ongin fullfíggja útstykkingarætlan fyriliggur.

Umsøkjarin vísir á, at ein vegatkoma kann verða frá Skótarók yvir gjøgnum tvær traðir og útkoyring til byrjan av Oyggjarvegnum.

Víst verður til, at endaliga staðsetingin av innkomuvegnum ikki er ásett. Landsverk og Tórshavnar kommuna arbeiða fyri at finna eina endaliga loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði**
1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri mál**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni j. nr. 19/01483-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla frá at viðmæla at sundurbýta matr. 1378, vísandi til at umsóknin ikki lýkur ásetingunum fyri økið og at staðsetingin til innkomuvegin ikki er ásettur og ongin útstykkingar ætlan fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur biður um at fáa málið á skrá til fyrstkomandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Tróndur Sigurðsson ynskir serstøðu viðmerkta í gerðabókina, ið er soljóðandi: Heitt verður á býráðið um at loyva sundurbýti, og at býráðið heitir á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna, sum er gjørd og endaliga staðfesta, at eingin vegur skal koma ígjøgnum Krákugjógv og ei heldur á niðasta partin á oyggjarvegnum.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 15. mai 2019.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørg Dam, heitir á býráðið um at loyva sundurbýti, og at býráðið heitir á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna, sum er gjørd og samstundis staðfesta, at eingin vegur skal koma ígjøgnum Krákugjógv og ei heldur á niðasta partin á oyggjarvegnum og at tunnilin skal koma út omanfyri Hotel Føroyar.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Málið umrøtt.

## 166/19 Vinnuøki á Gomlurætt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 03.04.2019 | 24/19 | 19/01484-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 31/19 | 19/01484-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 85/19 | 19/01484-3 |
| 4 Vinnunevndin | 14.05.2019 | 31/19 | 19/01484-3 |
| 5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 20.05.2019 | 6/19 | 19/01484-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 124/19 | 19/01484-3 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 166/19 | 19/01484-3 |

**Upprunin til málið:**
EST hevur sett seg í samband við Tórshavnar kommunu.
Innan stutta tíð verður sett á at bora Sandoyartunnilin, og kemur ein stór nøgd av avlopsgróti út streymoyarmegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Higartil hevur ætlanin verið, at tyrva grótið nærhendis sunnaru íbindingina til Velbastaðar, tað er j.nr.  17/00760 "Fyrispurningur um tyrving av gróti á Velbastað í sambandi við Eystur- og Sandoyartunlar".
Eitt uppskot um aðra loysn hevur verið umrøtt, har grótið heldur verður gagnnýtt til vinnuøki norðanfyri ferjuleguna á Gomlurætt.  Í tí sambandi hevur EST gjørt eitt skitsuuppskot og eina kostnaðarmeting, sum lýsir, hvussu nógv fæst fæst burtur úr grótinum fyri ein ávísan kostnað.
Talan er um eitt øki á uml. 30.000 – 35.000 $m^2$ av útfyltum øki, og eitt grótbrot omanfyri á knapt 19.000 $m^2$.
Uppleggið er, at EST byggir økið, og at Tórshavnar kommuna yvirtekur økið eftir at verkætlanin er liðug í umleið 2023, fyri 29 mió. kr.
Samráðast verður um hvussu gjaldið fellur, t.d. í ratum 2021, 2022 og 2023

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggisamtyktin fyri økið má broytast.
Loyvi máa fáast frá friðingarmyndugleikum.
Umhvørvisstovan má geva loyvi til at fylla grót út á sjógv
Landsverk er eigari av Gomlurætt og økinum har ætlanin er at fylla út.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað stóra grótið, sum skal til fyri at verja móti brimi, verður tikið úr einum nýggjum grótbroti, sum liggur í kotu 30
Møguliga kann nakað av gróti frá tunnlinum liggja eftir á økinum/ella í grótbrotinum eftir lokna bygging.

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið.**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:
1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930, útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760, umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817, umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Um øll loyvir fáast til vega og byggisamtyktin verður broytt, so eru ongin frávik.

**Umhvørvisárin**
Tá byggisamtyktin verður broytt og/ella avgerð er tikin um hvat økið skal nýtast til, so verður umhvørvisárin ásett.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Skitsa frá tunnilsfelagnum, j.nr. 19/01484-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Ætlanin er at Tórshavnar kommuna skal keypa økið frá Landsverk og tá verkætlanin er liðug, gjalda 29 mió. til tunnilsfelagið fyri at ogna sær undirlendið, sum tá er grovplanerað.
Kommunan skal síðani gera økið liðugt, at sundurbýta og selja sum vinnuøki.
Kommunan skal rokna við at standa fyri viðlíkahaldi av einum parti av økinum, m.a. atkomuveg, brimgarðar o.a.

**Tilmæli frá kommunustjóranum og havnameistaranum:**
Nevndin verður biðin um at taka støðu til, um arbeiðast skal víðari við málinum.

**Vinnunevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Talan er um 2 øki, tað er:

- Uppfylling út á sjógv, sum er eitt øki uppá uml. 35.000 m$^2$, sum liggur í kotu 4 og sum verður grovplanerað.
- Eitt øki í uml. kotu 36, uppá 18.800 m$^2$, sum veður sprongt út fyri at fáa stórt grót til verjugarðin.

Býarskipanarliga verður mett, at verkætlanin at víðka um havnalagið á Gomlurætt kann verða til gagn fyri kommununa. Kommunan misti møguleikan at gagnnýta Gomlurætt, tá avgerðin um at gera tunnilsmunnan til Sandoyartunnilin niðri á Gomlurætt varð tikin. Men við at víðka um økið norðureftir, so gerst hesin møguleikin at gagnnýta Gomlurætt til eitthvørt sum gagnar kommununi og borgarunum í kommununi aftur aktuellur.

Somuleiðis er vert at nevna, at kommunan tíðum hevur tørv á økjum til nógv ymisk virksemi, sum mangla staðseting. Í sambandi við at gagnnýta Gomlurætt, so hevur tað serliga verið nógv umrøtt at gera verandi Gomlurætt til eitt serligt ferðavinnuøki burturav, møguliga ein frítíðardepil, har virksemi knýtt at ferðavinnuni og sjónum verður staðsett. Men samstundis er

hugsandi, at annað vinnuligt virksemi kann fáa ágóðan av, at økið verður gjørt, so sum aling á landi. Og til seinast kann nevnast, at tað er nú at møguleiki er at víðka um Gomlurætt, tá grótið er tøkt til hetta.

Umsitingin metir sostatt, at hendan verkætlanin at víðka um Gomlurætt er ein munandi betri loysn enn at tyrva grótið á Velbastað, sí journal nr. 17/00760, tí við hesi verkætlanini verður grótið gagnnýtt og ikki bert lagt undir mold. Víst verður somuleiðis til borgarafund, sum var hildin á Velbastað 20.03.2018, har stórur meiriluti var fyri at grótið varð nýtt til ídnaðarøki á sjónum norðan fyri Gomlurætt.

Í málinum journal nr. 18/00817 "Umsókn um loyvi at byggja undirlendi til framleiðsluøki á Gomlurætt", hevur byggi- og býarskipanarnevndin samtykt tann 16.04.2018 at geva loyvi til ætlaðu uppfyllingini, fyri at gera undirlendi til nýtt vinnuøki norðan fyri verandi havnaøki á Gomlurætt, treytað av:

- at verkætlanin verður nærri lýst, áðrenn endalig støða verður tikin
- at neyðug loyvi fáast frá øðrum myndugleikum
- at tekniskt prosjekt verður gjørt, áðrenn nakað endaligt loyvi verður givið
- at verkætlanin verður uttan kostnað fyri kommununa.

Í viðgerðartilgongdini hevur málið verið í staðbundnu nevndini fyri Kirkjubø og Velbastað, har mælt var til at taka undir við hesum sama tilmæli, og hin 24.04.2018 varð kunnað um málið í býráðnum.

Í málinum journal nr. 17/00760 "Fyrispurningur um tyrving av gróti á Velbastað...", hevur byggi- og býarskipanarnevndin samtykt tann 18.06.2018 at loyva nakað av uppfylling omanfyri landsvegin, har uppfyllingin verður tillagað verandi landslagi, soleiðis at tað verður fylt upp í trimum hæddum við skráum ímillum, sum líkjast hamarum.

Í viðgerðartilgongdini hevur málið somuleiðis verið í staðbundnu nevndini fyri Kirkjubø og Velbastað, har nevndin tók undir við tilmælinum.

Báðar nevndirnar vístu tó á, at tær vóru opnar fyri, at aðrir møguleikar vórðu kannaðir til tess at gagnnýta grótið á fullgóðan hátt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Verandi Gamlarætt og økið, sum ætlanin er at fylla út, liggja í umráðispartinum "K, landbúnaður" í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað, har ásetingarnar eru:

1. *Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.*
2. *Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.*
3. *Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.*
4. *Útstykking má ikki fara fram.*

Um verkætlanin skal gerast, soleiðis at eitt nýtt vinnuøki verður norðan fyri verandi havnaøki á Gomlurætt, so verður neyðugt at broyta byggisamtyktina. Hetta vil umsitingin seta í verk, tá øll loyvi fyriliggja og endalig avgerð er tikin um at gera verkætlanina.

**Viðmerkingar frá øðrum:**
Byggi- og umhvørvisdeildin: Skal ætlanin fremjast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:
- Byggisamtyktin skal broytast
- Byggiloyvi skal fáast til vega. T.v.s. at prosjekt skal gerast, sum vísir hvussu økini verða innrættaði við grundstykkjum, vegum, kloakk, reinsiverk o.a.
- Ognarviðurskiftini skulu avgreiðast.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Málið hevur verið hjá Náttúrufriðingarnevndini, sum hevur givið loyvi við hesum treytum, sí journal nr. 19/01484-8:
- At lendið, har grótið verður lagt, verður gjørt snøgt og at sjóarkanturin verður lagdur, so tað ikki kemur at skemma í náttúruni.
- At økið verður væl slættað, so tað verður vakurt at líða á.
- At alt arbeiðið annars verður væl avsluttað.

Yvirfriðingarnevndin er ávegis í gongd við at viðgera málið. Samskiftið millum Tunnilsfelagið og Yvirfriðingarnevndina lýsir hetta, sí journal nr. 19/01484-13.

Landsverk skal viðgera málið í sambandi við ognarviðurskifti, bæði í samb. við lendið, landshavnina og landsvegin. Tunnilsfelagið hevur upplýst fyri kommununi, at enn hevur tað ikki verið samskift við Landsverk um hesi viðurskiftir, tí at tað hevur verið óvist, um Tórshavnar kommuna hevur havt áhugað í ætlanunum um vinnuøkið.

Umhvørvisstovan hevur gjørt eina árinsmeting av ætlanunum, sí journal nr. 19/01484-12 og er niðurstøðan, at Umhvørvisstovan ikki metir, at ætlaða útfyllingin út á sjógv fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐
Sum eisini upplýst omanfyri, so er ætlanin, at Tórshavnar kommuna skal yvirtaka økið grovplanerað frá Tunnilsfelagnum fyri ein kostnað á 28 mió. kr.

Í samb. við ætlanirnar um at gera hesa íløgu á Gomlurætt, so hevur kommunan sett fram ynski um, at Tunnilsfelagið gjørdi eina samanbering av kostnaðinum millum gerð av vinnuøkinum inni á Sundi og hesa ætlanina. Víst verður til journal nr. 19/01484-7 Samanbering av Sundi og Gomlurætt.

Á Sundi:
- Økið væl vart fyri havaldu, tí talan um verjugrót, sum vigar 1-2 tons.
- Dýpið við verjugróti bert 4 m samb. tekning.
- Kostnaðurin fyri koyringina av Hvítanesi til Sund verður býtt millum TK og EST. Partur hjá kommununi 4,46 mió. kr.

Á Gomlurætt:
- Økið er útsett fyri havaldu, tí talan um verjugrót, sum vigar upp til 6-12 tons.
- Dýpið við verjugróti verður lagt niður á 10 m dýpi samb. innleiðandi tekningum.
- Kostnaðarmeting fyri spreinging og at leggja verjugrótið, sum kommunan skal taka sær av, er mett til uml. 40 mió. kr., har Tunnilsfelagið í núverandi støðu átekur sær 12 mió. kr., sum kostnaðarmetingin av tyrvingin av grótinum annars vildi kostað Tunnilsfelagnum. Sostatt verður partur hjá kommununi 28 mió. kr., og umfatar spreinging og útlegging av uml. 100.000 $m^3$ av verjugróti.

Mett verður, at tað er neyðugt at gera eina endaliga avtalu við Tunnilsfelagið um samlaða kostnaðin, áðrenn málið verður endaliga samtykt í fíggjarnevndini og býráðnum.

Í verkætlanartilgongdini kann kostnaðurin broytast nakað, og útyvir kostnaðin til Tunnilsfelagið, skal kommunan ogna sær lendið frá Landsverk/landinum, gera økið liðugt við at planera, leggja leiðingar o.a., umframt at sundurbýta, soleiðis at økið kann seljast sum vinnuøki.

Roknast skal við einum framtíðar viðlíkahaldi av einum parti av økinum, so sum atkomuvegi, brimgarði o.ø.

Tunnilsfelagið hevur lagt upp til, at kommunan kemur at gjalda kostnaðin í ratum, deilt yvir 3 ár, 2021, 2022 og 2023.

**Prosjektering:**
Tunnilsfelagið hevur upplýst kommununa um, at í prosjekteringstilgongdini er ætlanin at nýta somu simuleringar, sum tá Gamlarætt varð gjørd á sinni.

**Skjøl**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Býráðssamtykt 24.04.2018_"Umsókn um loyvi at byggja undirlendi til framleiðsluøki á Gomlurætt", journal nr. 18/00817-13.
- Samtykt Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 21.11.2018_"Fyrispurningur um tyrving av gróti á Velbastað í sambandi við Eystur- og Sandoyartunlar", journal nr. 17/00760-37
- Skriv frá Náttúrufriðingarnevndini, journal nr. 19/01484-8.
- Samskiftið millum Tunnilsfelagið og Yvirfriðingarnevndina lýsir hetta, journal nr. 19/01484-13.
- Árinsmeting av ætlanunum, journal nr. 19/01484-12.
- Samanbering av Sundi og Gomlurætt, journal nr. 19/01484-7.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, kommunustjórin, havnameistarin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin, tekniska nevnd, vinnunevndin, staðbundna nevndin fyri Velbastað og Kirkjubø, fíggjarnevndin og býráðið taka undir við ætlanunum um at gera eitt nýtt vinnuøkið norðan fyri Gomlurætt, og at kommunan kann keypa økið, tá arbeiðið er liðugt og økið grovplanerað, fyri kr. 28 mió., sum kommunan skal gjalda í 2022 og 2023, treytað av:
  - at øll neyðug loyvir fáast til verkætlanina.
  - at almenna byggisamtyktin fyri Velbastað verður broytt samsvarandi ætlanunum.
  - at kommunan kann fáa avtalu við Landsverk um lendið.
  - at ein møguliga komandi nýggjur landsvegur frá Gomlurætt ikki kemur at hindra fyri at økið kann brúkast sum vinnuøki.

og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum treytað av at Tunnilsfelagið planerar økið við knústum tilfari.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 7. mai 2019.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Vinnunevndin 14. mai 2019:** Samtykt at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 7. mai 2019.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 20. mai 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um áheitan frá Tróndi Sigurðsson at viðgera málið ítøkiliga, ið varð einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í vinnunevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn, Tráin Nónklett, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, tí hon metti seg vera ógegniga.

# 167/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 145/19 | 19/00096-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 129/19 | 19/00096-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 204/19 | 19/00096-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 167/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| Sosialar avleiðingar | | | | |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 168/19 Umsókn um keyp av uppískoytisstykki av festinum matr. nr. 3a, Velbastaður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 48/19 | 19/00267-2 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 20.05.2019 | 5/19 | 19/00267-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 99/19 | 19/00267-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 198/19 | 19/00267-2 |
| 5 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 168/19 | 19/00267-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Búnaðarstovuni.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Búnaðarstovan biður um ummæli til eina umsókn um at keypa eitt uppískoytisstykki av matr. 3a til at leggja saman við matr. 35 á Velbastað.

Eigarin av matr. 35 vil keypa økið í beinari linju úr uttaru síðu á brimverjuni og uttaru síðu á neystaenda.

Umsóknin er um at keypa lendið millum húsið og brimverjuna, sum hann sjálvur hevur stoypt og goldið fyri.

Umsøkjarin vil eisini keypa stykkið millum húsið og neystið, og at marknaumskipa soleiðis:

1. Matr. 3a, eigari Búnaðarstovan, letur umleið 71 fermetrar til matr. 35.
2. Matr. 38, sum er Fjøran, letur umleið 38 fermetrar til matr. 35.
3. Matr. 36, eigari Tórshavnar kommuna, letur umleið 13,5 fermetrar til matr. 35.

Ein partur av stykkinum, sum hann hevur søkt um at keypa, er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Hetta stykkið er umleið 13,48 fermetrar til støddar og har er ongin umsókn komin til kommununa um at keypa økið. Ein umsókn til kommununa má fyriliggja.

Loyvi er givið til at borða fyri jarðhita á stykkinum hjá kommununi.

Ein forminnisútgrevstur liggur 70 m eystanfyri frá økinum sum søkt verður um at keypa frá Búnaðarstovuni, víst verður til lógina um fornminni §1 "umliggjandi øki innanfyri 100 m frá fornminninum".
Tað friðaða økið missur eina almenna atkomu, um Búnaðarstovan selur økið millum húsið og neystið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðspartinum G í byggisamtykini á Velbastað, sum er útlagt til neystaøki. Og ein partur liggur inni á H1, sum er friðað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsøkjarin hevur vinnuligt virksemi við skjótt gangandi bátum á staðnum.
Umsøkjarin hevur fingið byggiloyvi frá kommununi at gera brimverju.

Ein annar umsøkjari hevur søkt fyrr um at broyta byggisamtyktina til at gera økið til frítíðarhús øki, men fingið noktandi svar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Viðmerkingar frá Býarskipanardeildini:
Um umsøkjari skal fáa loyvi at keypa lendið, má hann fyrst søkja um at broyta byggisamtyktina í økinum frá H1 øki til G øki. Umsókn um broyting av byggisamtyktini hevði síðani verið viðgjørd sum vanligt, við viðkomandi atlitum.

Eisini verður mælt til at stykkið millum neystið og húsið skal hava almenna atkomu sum tað er í dag, fyri at koma inn á friðað øki.

Hjálagt myndir við viðmerkingum frá býarskipanardeildini j.nr. 19/00267-7.

**Skjøl**
Umsókn og kort frá Búnaðarstovuni j. nr. 19/00267-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideidlini mæla til einans at viðmæla samanleggingini eystanfyri og sunnanfyri sethúsini soleiðis at brimverjan verður partur av ognini og ikki at viðmæla samanlegging av økinum norðanfyri, millum sethús og neyst vísandi til at atkoman til fornminnini eigur at verða varðveitt umframt at dámurin á økinum sum neystaøki eigur at verða varðveittur.

Mælt verður til at kommunan selur 13,5 fermetrar av matr. nr. 36 til samanlegging við matr. nr. 35.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at beina málið í staðbundnu nevndina Kirkjubø/Velbastaðarnevndina.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 20. mai 2019:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum og harumframt viðmælir eisini at økið millum sethús og neyst verður lagt saman við matr. nr 35.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at viðmæla umsóknini.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri treyt, at tað verður tryggjað, at almenn atkoma verður til fornminnini í økinum og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Boga Andreasen um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og selja lendið til umsøkjaran**,** ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tráin Nónklett

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle

Marin Katrina Frýdal lúttók ikki í viðgerðina av málinum, tí hon metti seg vera ógegnia.

# 169/19 Marknaumskipan millum matr. nr. 216a, 216b og litra, Kollafirði í sambandi við gerð av gongubreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.06.2019 | 44/19 | 19/01811-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 97/19 | 19/01811-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 197/19 | 19/01811-2 |
| 4 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 169/19 | 19/01811-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn frá eigaranum av matr. 216b í Líðini í Kollafirði, sum eisini eigur matr. 216a, um kommunan kann keypa/yvirtaka geiran uppá 150 fermetrar, sum liggur úti á almennum vegi. Umsóknin er um at kommunan rindar fyri íbindingargjald til helvtina av matr. 216a, sum er umleið 1040 fermetrar hvør helvt, í staðin fyri at keypa geiran.

- Kostnaður er umleið 19.788 kr. fyri íbindingargjald til tað eina stykkið og kostnaður til Umhvørvisstovuna fyri matrikuleringina er umleið 3.500 kr.

- Um kommunan selur honum stykkið, kostar tað kommununi 16.500 kr., tá er tað roknað út frá 110 kr. pr. fermetur og kemur gjald til Umhvørvisstovuna fyri marknaumskipanina afturat, sum er umleið 3.500 kr.

Tekniska deild metir, at tað er umráðandi, at kommunan fær økið talan er um, um kommunan í framtíðini fer at gera eina gongubreyt.

Ætlanin er at sundurbýta matr. 216a í tvey stykkir og um umsøkjarin kann fáa eina skrivliga avtalu í lag um at kommunan kann rindar fyri leiðingina og matrikuleringina til tað eina stykkið, áðrenn umsøkjarin sundurbýtir matr. 216a í tvey stykkir.

Tekniska deild hevur verið á ástaðarfundi hesum viðvíkjandi og gjørt eina munnliga avtalu um at kommunan kann rinda fyri íbindingargjald og matrikuleringina í staðin fyri at kommunan keypir økið, um nevndin samtykkir tað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 í almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Kort yvir økið, sum søkt verður um at marknaumskipa j. nr. 19/01811-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at kommunan ognar sær umleið 150 fermetrar av matr. 216b og 216a til gongubreyt og at kommunan rindar fyri íbinding og matrikulering til ta einu helvtina, tá sundurbýtið er framt og kommunan ger eina skrivliga avtalu við umsøkjaran.

**Tekniska nevnd 04. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

# 170/19 Ytri Ringvegur vegføring frá Hjalla til Krákugjógv - atkomuvegur - innkomuvegur (2001-0407)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 95/16 | 14/01358-154 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 69/16 | 14/01358-154 |
| 3 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 105/16 | 14/01358-154 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 254/16 | 14/01358-154 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 361/16 | 14/01358-154 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 129/19 | 14/01358-154 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 205/19 | 14/01358-154 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 170/19 | 14/01358-154 |

**Málslýsing:**
**2001-0407/122 SG – BH**

**Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.

Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala **veganetinum.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra

Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Farið verður á ástaðarfund undir Krákugjógv.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Eftir at hava verið á staðnum samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við, at vegaføringin í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringvegi) verður framd við tunnli úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í nýggja atkomuvegin við Sundsvegin.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at leggja atkomuveg til Havnar, er Landsverk sum kunnugt farin undir fyrra part av anleggsarbeiðinum, sum er strekkið frá økinum norðan fyri útstykkingina millum Gilja og suður í móti økinum við Oyggjarvegin - undir Krákugjógv.

Sambært Landsverki er ætlanin, at hetta strekkið skal verða liðugt í 2008, og at strekkið frá Skarðshjalla og suður ímóti verandi atkomuvegi skal vera liðugt í 2012.

Landsverk ætlar nú at fara undir vegarbeiðið á strekkinum frá brúnni um Hoydalsá og suður í móti økinum undir Krákugjógv.

Í sambandi við viðgerðina av øllum projektinum um atkomuvegin hjá landsverki, eru ítøkilig viðurskifti, sum kommunan eigur at taka støðu til. Hesi viðurskifti eru:

1. Íbinding við Eysturoyartunnilin
2. Planskyld íbinding við ídnaðarøki og Stórutjørn
3. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
4. Liðugtgerð av planskyldari íbinding norðan fyri útstykkingina Millum Gilja so at atkomuligt er til Flatarvegin
5. Brúgvaskap á vegamótinum millum landsvegin og Flatarvegin. Skal avtala fáast í lag við Landsverk um fyribils at binda í atkomuveg – ella skal farast undir at gera brúgv, áðrenn ferðsla verður á strekkinum.
6. Umlegging av Sundsvegnum
7. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingardalsvegin
8. Støðutakan til íbindingina undir Krákugjógv
9. Støðutakan til íbinding við Hotel Føroyar
10. Støðutakan til atkomuveg til Velbastaðvegin
11. Støðutakan til verandi íbinding við Oyggjarvegin
12. Veitingar á landsvegi
13. Frástøða - byggilinja

Víst verður til fund, j.nr. 2003-1884/12, millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Sp/f HMP-Consult, sum er ráðgevi hjá Landsverki í hesum máli.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í skrivi, dagfest 5. september 2006, at hóast tað framvegis er metingin, at verandi vegaætlan við Villingardalsveg er ein fullgóð loysn, er ráðið sinnað at ganga ynskinum hjá býráðnum um tunnil á møti, um býráðið góðtekur at gjalda kostnaðarmunin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina, sum er í uppskoti, og hartil meirkostnaðin av rakstrinum í eitt áramál.

Sambært einari leysliga meting er kostnaðarmunurin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina einar 30 mió. kr. umframt meirkostnað í rakstri.

Treytirnar fyri einari slíkari avtalu eru, at umrøddi teinur verður landsvegur, at kommunan tekur meirkostnaðin fyri tunnilsloysnina uppá seg, og at Landsverk kann góðtaka loysnina vegatekniskt.

Býráðið eigur eisini at hava í huga, at ferðslan eftir hesum vegastrekki sambært framrokningum fer at økjast tey næstu 15-20 árini í so stóran mun, at tað helst verður neyðugt at gera eitt tunnilsrør afturat og kannast má tí, um tað av teknisku ávum er neyðugt at spreingja tunnil nr. 2 samstundis sum tunnil nr. 1, og um so er, má kommunan eisini gjalda meirkostnaðin av hesum.

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnilin undir Krákugjógv.

Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørivslig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við ytra ringvegnum, tá talan er um frástøða frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l.

Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli undir Krákugjógv ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununnar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting.

Í sambandi við fíggjarliga partin skal eisini vísast á, at ein tunnil vil gerast dýrari í rakstri enn við at hava ein vanligan veg út frá teimum fortreytum, sum landsvegamyndugleikin rekur landsveganetið uppá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mæla kommunustjórin og tekniski stjórin frá at gera tunnil undir Krákugjógv.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, taka støðu á býráðsfundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Nýtt:**
Ráðgevandi fyritøkan P/F HMP Consult hevur fyri Landsverk gjørt nýtt uppskot til nýggja landsvegaføring til og uttan um Tórshavn. Onnur uppskot hava verið gjørd áður.

Í løtuni eru 3 landsvegainnføringar til Tórshavn. Hesar eru eftir Kaldbaksvegnum, eftir gamla Oyggjarvegnum og eftir vegnum í Havnardali frá Gomlurætt. Nýggi landsvegurin norðan fyri høvuðsstaðin kemur at binda saman allar hesar 3 landsvegainnføringarnar til Tórshavn. Nýggi landsvegurin byrjar úr verandi Kaldbaksvegnum beint eystan fyri Skarðshjalla, og fer so gjøgnum Hoyvíkshagan yvir til Villingadal og fram við Húsareyni, har hann verður bundin í verandi Oyggjarvegin. Haðani er vegurin ætlaður at fara gjøgnum Flatnahagan út í Havnardal, har hann verður bundin í verandi landsvegin til Gomlurætt.

Um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gerst veruleiki, kemur hesin at blíva íbundin Kaldbaksvegin ella omanfyri nevnda nýggja landsvegastrekkið.

Landsveganetið í Føroyum bindir saman bygdir og býir, uttan mun til stødd. Í Tórshavn eru fleiri einstakir býlingar, sum einsamallir eru nógv størri enn fleiri bygdir. Framskrivingar av býarmenningini vísa m.a., at serliga uppi í Hoyvíkshaganum, í Vesturbýnum og á Argjum fer munandi vøkstur at verða í bæði fólkatali og tali av bústaðareindum.
Tekniska umsitingin metir tað vera sera umráðandi, at av- og ákoyringar til nýggja landsvegin verða skipaðar í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tryggjast má ein góð fordeiling av ferðsluni, og at bæði verandi og komandi kommunala veganetið er ført fyri at lofta ferðsluni og fordeila ferðsluna á rættan hátt, fyri ikki at fáa ferðsluruðuleika inni í býnum. Tí er eisini umráðandi at tal, stødd og staðseting av íbindingum í landsvegin taka støði í stødd av býlingunum (fólkatal og bústaðareindir), tí sum longu nevnt eru fleiri býlingar sum eru nógv størri enn heilar bygdir.

Í sambandi við viðgerðina av øllum prosjektinum um atkomuveg hjá Landsverk, hevur umsitingin á eini verkstovu 5. desember 2006 viðgjørt niðanfyri standandi viðurskifti.

1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum
2. Íbinding við Eysturoyartunnilin
3. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli
4. Planskyld íbinding við Stórutjørn
5. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
6. Íbinding við Flatarvegin
7. Umlegging av Sundsvegnum
8. Íbinding við Villingadalsvegin
9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin
10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv
11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin
12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar
13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin
14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin
15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk, fjarhita og reinskan av vegvatni.
16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir.
17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum

**Tilmæli:**
Við støði í viðgerðini á verkstovuni mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til, at á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður ferðin avmarkað til 50 km/t, og at íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum stórar rundkoyringar. Hetta er ikki minst neyðugt fyri at fleiri stórir komandi býlingar, sum koma at liggja uttan fyri landsvegin, fáa samband við hendan. Tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 20.000 bilar um samdøgri, kann ferðin hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við Eysturoyartunnilin**
   Onki ítøkiligt fyriliggur enn uppá hvar linjuføringin fyri ætlaða tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina verður, og tískil heldur ikki uppá hvar tunnilin eftir ætlan kemur upp og hvar íbinding verður í landsvegin. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna, sum planleggingarmyndugleiki í kommununi, setir fram krav um at verða við til at taka avgerð um, hvar og hvussu tunnilin kemur upp.

3. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
   Í løtuni fyriliggur ikki eitt nóg neyvt grundarlag at taka støðu til, bæði um, hvar ella hvussu kommunala veganetið við verandi vinnuøkir á Sandvíkarhjalla og Skarðshjalla, og eitt komandi vinnuøki á Ovara Hjalla, skulu bindast í landsveganetið. Mælt verður tí til, at hetta verður kannað nærri í sambandi við útstykkingar- og byggiætlaninar í økjunum, og at lendi til eina møguliga íbinding við rundkoyring við Ovara Hjalla verður hildi tøkt, til greiða er fingin á hesum. Tí verður mælt til, at vegasamband til Ovara Hjalla verður gjørt við eini rundkoyring frá Hvítanesvegnum.

4. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
   Mælt verður til, at gjørd verður planskyld íbinding við Stórutjørn. Hetta verður fyrsta stóra íbindingin millum kommunala- og landsveganetið á strekkinum, og eigur henda íbinding tí at rindast av Landsverk.
   Mælt verður til, at vegastrekkið frá íbindingini í Kaldbaksvegin til planskyldu íbindingina við Stórutjørn, beinanvegin verður gjørt sum 4-sporaður vegur við mest loyvdu ferð á 80 km/t. Vísandi til omanfyri standandi pkt. 1 verður eisini mælt til, at á vegastrekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður mest loyvda ferðin sett til 50 km/t.

5. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
   Ynski er sett fram um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur norður – tvs. burtur frá Stórutjørn. P/F HMP Consult hevur kannað møguleikan fyri hesum, og onki er til hindurs fyri tí. Men ein slík flyting av vegalinjuni vil viðføra, at ein partur av vegastrekkinum, sum longu er gjørt, má umleggjast. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er av Landsverk mettur til kr. 2,0 mió. Mett verður, at Landsverk undir øllum umstøðum eigur at flyta vegin uml. 25 m longur norður júst við Stórutjørn, fyri at tilpassa vegin betur til lendisviðurskiftini á staðnum – tvs. av umhvørvisávum. Við verandi linjuføring kemur vegurin nærum í sjálva tjørnina, og kemur harumframt beint inn í ein høgan kneysa í lendinum. Mælt verður tí til,

at Landsverk skal flyta vegaføringina minst 25 m longur burtur frá Stórutjørn, fyri at fáa vegin at fella betur í lendi og fyri ikki at koma so nær tjørnini.

**6. Íbinding við Flatarvegin**

Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Flatarvegurin er ein av hesum vegum.

Fram til 2012, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlan verður liðugur, verður mælt til at Flatarvegur, Sundsvegur og Villingadalsvegur verða bundnir í landsvegin, og at teir partar av vegnum, sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.

Fyri tíðarskeiðið aftan á 2012 verður mælt til, at minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingadalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við rundkoyring, sum er minst 32 m í diametur. Nóg stórt økið skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

**7. Umlegging av Sundsvegnum**

Brúgv er gjørd tvørtur um Hoydalsá. Her er sostatt eisini møguligt at føra Sundsvegin undir landsvegin. Við at binda Sundsvegin í landsvegin, fæst beinleiðis vegasamband inn til bæði Vegin Langa og til Norðara ringvegin. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

**8. Íbinding við Villingadalsvegin**

Villingadalsvegurin er lutfalsliga smalur, og trupult er at breiðka hann, orsakað av nógvari bygging á báðum síðum av vegnum. Harumframt er ikki pláss til at gera íbinding í Norðara ringvegin við rundkoyring, uttan at taka burtur verandi hús. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

**9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingadalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli við Villingadalsvegin ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya Landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Mælt verður tí frá at gera tunnil við Villingadalsvegin.

**10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Loysnin í uppskotinum hjá Landsverk er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi. Tekniska umsitingin sær eisini hesa íbinding sum ein part av eini loysn viðv. Landsvegaføringini frá verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Norðara ringveg niðan til Hotel Føroyar. (Sí pkt. 11)

Mælt verður tí til, at hildi verður fast um upprunaligu loysninga sum er, at gera eina íbinding við rundkoyring og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

**11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Landsvegurin er ætlaður at blíva bundin í verandi Oyggjarveg nakað vestan fyri P/F Wenzel Petersen. Oman fyri Hotel Føroyar fer landsvegurin síðani oman av verandi Oyggjarvegi. Henda vegaføring lýkur ikki tær ferðsluteknisku fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild.

Mælt verður tí til, at á strekkinum frá har Landsverk hevur ætlanir um at gera eina planskylda íbinding undir Krákugjógv, til á leið har sum ætlanir eru um planskylda íbinding vestan fyri Hotel Føroyar, skal Landsverk gera 4-sporaðan tunnil í seinasta lagi tá ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar.

**12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar**

Tórshavnar kommuna tekur undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin. Tá talan er um íbinding oman móti býnum, verður mælt til at gera hesa við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding. Nóg stórt øki skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

**13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Tann av P/F HMP Consult teknaða loysnin við íbinding av landsvegnum í verandi landsveg úti í Havnardali, er ikki í samsvar við tað sum áður er teknað. Vegatekniskt er seinasta uppskotið nøktandi, men neyðugt er at fáa betur lýst hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging í økinum og fyri verandi vegir í økinum (Velbastaðvegur og vegin út í Havnardal).

**14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til, at um Landsverk ætlar at niðurleggja verandi íbindingar, mugu teir útvega aðrar í staðin. Harumframt verður mælt til takað undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin.

**15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.

Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg sum fer gjøgnum bygt økið, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatnið og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.

Mælt verður tí til at krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni har landsvegir fara gjøgnum bygt økið. Harumframt er ynskiligt, at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

Víst verður annars á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

**16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**

Mælt verður til, at ein tílíkur vegur gjøgnum bygt økið hevur gonguteigar og súkklubreytir, soleiðis at sleppast kann undan at gangandi og súkklandi – m.a. útlendsk ferðafólk –

ganga og súkkla á koyribreytunum millum bygdir, soleiðis sum tey gera flestu staðni sum nú er. Stórt tal av ferðandi koma hvørt ár til Havnar og fara herfrá víðari kring landið. Víst verður annars á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

17. **Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**
Av tí at talan er um ein landsveg, sum fer ígjøgnum partvíst bygt økið, og økið sum í byggisamtyktini fyri Tórshavn er lagt av til byggilendi, metir tekniska umsitingin, at tað er ikki grundarlag fyri at áseta størri fjarstøðu enn 25 m frá vegmiðju til byggiljuna fram við landsvegnum. Tó verður mælt til, at tað í sambandi við byggilinjuna verður tikin hædd fyri teimum støðum, har íbindingar væntast at koma í framtíðini, sum antin rundkoyringar ella planskyldar íbindingar.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2006:** Tikið av skrá.

**Nýtt:**
Landsverk hevur hin 31. januar 2007 havt framløgu fyri byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini av vegaprojektinum um nýggjan landsveg frá Kaldbaksvegnum til Havnardal. Sama dag, gjøgnumgingu omanfyri nevndu faknevndir einkultu partarnar av málinum, og var hetta framhald av tí nevndarviðgerð, sum frammanundan hevur verið í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Tilmæli hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og býararkitektinum fyri einstøku punktini er eftir henda fundin tillagað soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at **allur** vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður út frá hesum fyritreytum.

Mælt verður tó samstundis til:

a) **at** á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar verður ferðin avmarkað til 50-60 km/t
b) **at** íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum vanligar T-kross íbindingar, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** biðja Landsverk um ferðslutekniskar kanningar av hvat er hóskandi sum mest loyvda ferð á strekkinum, har vanligar T-íbindingar og/ella rundkoyringar verða, av tí at talan verður um bygt øki á báðum síðum av vegnum.
d) **at** tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 18.000 bilar um samdøgri, ella onnur ferðsluviðurskifti viðføra ónøktandi framkomiligheit, kann ferðin um neyðugt hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við tunnil hjá P/F Skálafjarðartunnilin**

Vísandi til §5, stk. 3, litra 6 í *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, og *Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu* verður mælt til:

a) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa tekningar og nærri upplýsingar, um hvussu veganetið á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilin, til góðkenningar.

b) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi.

**3. Íbinding/frákoyring við núverandi Hvítanesvegin**

Mælt verður til:

a) **at** biðja Landsverk um neyvar tekningar og frágreiðing, um hvussu íbindingin/frákoyring millum nýggja landsvegin og Hvítanesvegin verður gjørd, til góðkenningar.

**4. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkahjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**

Mælt verður til:

a) **at** kommunan útvegar sær lendi til vinnuøkið á Ovara Hjalla umframt lendi til vegaatkomu frá Hvítanesvegnum niðan á Ovara Hjalla og lendi til gerð av rundkoyring við Hvítanesvegin.

b) **at** kommunan letur gera útstykkingarætlan og tekniskt projekt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla

c) **at** kommunan letur gera kanningar av íbinding í nýggja innkomuvegin, og leggur av lendi til antin íbinding við rundkoyring ella T-kross íbinding á økinum við Ovara Hjalla. Víst verður í hesum sambandi eisini til omanfyri standandi pkt. 1a.

**5. Planskyld íbinding við Stórutjørn**

Mælt verður til:

a) **at** takað undir við uppskotinum hjá Landsverk um at gera planskylda íbinding við Stórutjørn, vísandi til væntandi nógva ferðslu og virksemi á hesum øki.

b) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar, og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**6. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**

Sambært upprunaligu linjuføringini, sum Tórshavnar kommuna ikki hevur fingið til ummælis, kom landsvegurin at ganga gjøgnum tjørnirnar á økinum. Samstundis hava interessentar í økinum sett fram ynski um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur vestur – tvs. burtur frá Stórutjørn. Onki er til hindurs fyri hesum.

Tí verður mælt til:

a) **at** landsvegurin verður fluttur 50 m longur vestur á økinum við Stórutjørn.

b) **at** nýggi sambindingarvegurin verður longdur tilsvarandi 50 m.

c) **at** kostnaðurin fyri arbeiðið verður at rinda av interessentunum, sum ynskja flyting av vegnum.

**7. Íbinding við Flatarvegin, Sundvegin og Villingardalsvegin**

Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Hetta fyri at høvuðsstaðurin eisini kann fáa veruliga nyttu av nýggja landsvegnum. Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **at** fram til 2010, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlanunum hjá Landsverk verður liðugur, verða Flatavegur, Sundsvegur og Villingardalsvegur bundnir í landsvegin beinanvegin og at teir partar av vegnum sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
b) **at** fyri tíðarskeiðið aftan á 2010 skulu minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingardalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við vanligum T-kross íbindingum, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** nóg stórt øki skal verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera ferðslutekniskt hóskandi íbindingar har um leiðir, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar ella um onnur ferðsluviðurskifti gera tað neyðugt, so sum ónøktandi framkomiligheit o.l.
d) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**8. Tunnilsloysnir við Villingardalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingardalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Hetta er m.a. grundað á simuleringar av óljóði frá landsvegnum, sum Landsverk hevur latið gera, og hevur lagt fram fyri limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli einans við ovasta part av Villingardalsvegnum ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **ikki** at gera tunnil bert við ovara part av Villingardalsvegnum.
b) **at** Landsverk verður biðið um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein longri tunnil líka frá ovara parti av Villingardalsvegnum vestureftir undir Húsareyn, sum kemur útaftur vestan fyri Hotel Føroyar.
c) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um útreiðslubýtið.

**9. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Tann 2-sporaða fyribilsloysnin hjá Landsverk við íbinding beinleiðis í vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen verður als ikki mett nøktandi, tí hon verður ikki mett at beina ferðsluna inn á Norðara ringveg/Marknagilsvegin á ein tryggan og forsvarligan hátt.
Tann 4-sporaða framtíðarloysnin í uppskotinum hjá Landsverk, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar, er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi.
Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **at** tá talan er um fyribilsloysnina við 2-sporaða vegnum, verður hildið fast um upprunaligu loysnina, sum er at gera eina íbinding við rundkoyring, og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.
b) **at** tá talan er um 4-sporaðu framtíðarloysnina, verður í fyrsta lagi víst til tilmæli til pkt. 8.b um at gera ein tunnil líka frá endanum á Villingardalsvegnum til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar..
c) **í øðrum lagi** verður mælt til at Landsverk, í samstarvi við kommununa, verður biðin um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein

styttri tunnil uml. frá st. 6800 til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar. Hetta tilmæli er grundað á ferðslutekniskar orsøkir, og eigur tí at verða rindað til fulnar av landinum. Landið vil við hesum samstundis spara útreiðslur til ognartøkur, óljóðsverju o.a. á hesi leiðini, eins og tað slepst undan trupulleikanum við verandi íbindingum í Landsvegin við Brandstøðina, P/F Norðbil, P/F Wenzel Petersen og sethús á umrødda vegastrekki.

d) **at** gjørdar verða kanningar av hvørt Villingardalsvegurin ella ein nýggjur sambindingarvegur millum innkomuvegin og innara ringveg skal gerast fyri at binda saman hesar vegir, um tunnil verður gjørdur jbr. pk.t 9c ella 9d.

**10. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Tekniska umsitingin metir, at vegaføringin frá P/F Wenzel Petersen til íbindingarnar vestan fyri Hotel Føroyar, lýkur ikki tær ferðslutekinisku fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild á øðrum strekkjum. Tí verður mælt til:

a) **í fyrsta lagi** at Landsverk ger ein longri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b.

b) **í øðrum lagi** at Landsverk ger ein styttri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 9.c.

c) **at** kommunan, sum avleiðing av aðrari av tunnilsloysnunum, yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen.

**11. Vegasamankomingar á økinum vestan fyri Hotel Føroyar**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, nøkulunda soleiðis sum projekterað av ráðgevunum hjá Landsverk.

b) **at** taka upp samráðingar við Landsstýrið/Fiskimálaráðið um keyp av lendi burtur av ”antennuøkinum”, matr. nr. 1231.

c) **ikki** at gera rundkoyring, men vanliga T-kross íbinding, har núverandi Oyggjarvegurin verður bundin í nýggja landsvegin, grundað við at onki er sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring við henda vegkross.

d) **at** nýggj íbinding oman móti býnum verður gjørd við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding.

e) **at** nóg stórt øki tó verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, seinast tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000.

**12. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Mælt verður til:

a) **fyribils at** taka undir við uppskotinum hjá Landsverk til vegaføring í Havnardali og íbinding í Velbastaðvegin, sum tekniska umsitingin metir vegatekniskt at verða nøktandi.

b) **at** biðja Landsverk um neyvari upplýsingar um hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging og vegir í økinum (Velbastaðvegin og vegin út í Havnadal), og somuleiðis fyri framtíðar møguleikarnar fyri bygging og vegum í økinum, áðrenn endalig góðkenning verður givin.

**13. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til:

a) **at** tunnil verður gjørdur jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b. ella pkt. 9.c., og at kommunan sum avleiðing av hesum yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen, sum so verður kommunalur vegur, jbr. pkt. 10.c.
b) **at** uttan mun til um vegurin verður verandi landsvegur ella verður kommunalur vegur, má avvarðandi eigari av vegnum útvega nýggjar íbindingar fyri allar tær verandi íbindingarnar, sum verða burturbeindar ella fluttar.

**14. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**
Sambært upplýsingum, sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.
Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg, sum fer gjøgnum bygt øki, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatninum og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.
Mælt verður til:
a) **at** krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni, har landsvegir fara gjøgnum bygt øki, og at samráðingar verða við Landsverk um útreiðslubýtið í hesum sambandi.
b) **at** krav verður sett Landsverk um burturbeining og reinskan av vegvatni, jbr. býráðssamtykt, j. nr. 2005-1437.
c) **at** gera avtalu við Landsverk um at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

**15. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**
Vísandi til krøv um ferðslutrygd fyri ein slíkan veg, sum fer gjøgnum bygt øki fyri bæði gangandi og súkklandi fólk, verður mælt til:
a) **at** Landsverk letur gera gonguteigar og súkklubreytir, jbr. býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.
b) **at** hámarksferðin fyri vegastekkið frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður samsvarandi omanfyri standandi pkt. 1.c

**16. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**
Mælt verður til:
a) **at** gera avtalu við Landsverk um eina byggilinju fram við Landsvegnum, sum liggur í eini fjarstøðu á 25 m frá vegmiðju, á øllum vegastrekkinum, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tó verður mælt til at tað í sambandi við byggilinjuna í samráð við Landsverk verður tikin hædd fyri størri fjarstøðu á teimum støðum, har størri íbindingar væntast at koma í framtíðini.

**17. Verja móti óljóði**
Vísandi til pkt. 16 er umráðandi at tað, har nýggi landsvegurin fer gjøgnum býin, ikki koma at liggja stór øki á báðum síðum, sum verða ónýtilig til bygging. Tað eigur at kunna byggjast í øllum førum so nær sum 25 m frá vegmiðju, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tí verður mælt til:
a) **at** krav verður sett Landsverk um at verja móti óljóði eigur at verða gjørd fram við vegnum allan vegin frá Kaldbaksvegnum til Havnardal, har lendisviðurskiftini ikki loysa trupulleikan við óljóði við støði í hámarksferðini á vegastrekkinum, jbr. frammanfyri standandi pkt. 1a, og við støði í at óljóð skal verða max 55 dB í eini frástøðu á 15-20 m frá vegmiðju.

b) **at** byggimyndugleikin – t.e. Tórshavnar kommuna – skal góðkenna slíkar ljóðverjur við atliti til útsjónd, tilfar o.a., og at ljóðverjan í minst møguligan mun skal taka burtur útsýnið og møguleikarnar fyri orientering hjá bilførarunum.

**18. Byggimálsviðgerð og avtala við Landsverk.**

Mælt verður til:

a) **at** fráboða Landsverk, at vegurin skal viðgerast og hava loyvi frá Tórshavnar kommunu, sum byggimyndugleiki, sambært *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir,* §5, stk. 3, litra 6 og sambært *K. Nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð*.

b) **at** vísa Landsverk á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436 og á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um fyribils íbindingar, endaligar íbindingar, projektbroytingar, býtislykil fyri ávísar útreiðslur o.a.

**19. Tíðarætlan og raðfylgja.**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við ætlanini hjá Landsverk at gera vegin lidnan til 2010.

b) **at** gera avtalu við Landsverk um í fyrstu atløgu at arbeiða norðureftir frá har vegurin nú er, og so samstundis at gera tær kanningar v.m. viðv. vegaføringini frá har vegaarbeiðið er komið til nú við endan á Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin, vísandi til omanfyri standandi tilmæli í punktunum 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13, og at framhaldið av arbeiðinum suðureftir verður tikið uppaftur, tá nevndu viðurskifti eru loyst.

c) **at** Landsverk og Tórshavnar kommuna í felag arbeiða við at lýsa og loysa omanfyri nevndu viðurskifti, at leggja fyri til endaliga góðkenning seinast 1. desember 2007.

**20. Ferðslutrygdarmeting**

Mælt verður til:

d) **at** projektið viðv. nýggja innkomuvegnum, íbindingar í kommunala veganetið, og fordeilingin av ferðslu frá innkomuvegnum inn á kommunala veganetið, verður latið serkønum at meta um, serliga við atliti til ferðslutrygd.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum viðmerkingum:

- Viðv. pkt. 7.b vil ein minniluti, Høgni Mikkelsen, hava at allir tríggir verandi vegir á staðnum skulu bindast í landsvegin.
- Nevndin varð samd um at strika pkt. 8.c.
- Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin viðgjørdi og samtykti at taka undir við tilmælunum til hesi puntk: pkt. 4 a og b, pkt. 6, pkt. 11 a og b, pkt. 12 b, pkt. 14 a, pkt 16, pkt 17 a, og b og pkt. 18 a.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Viðv. pkt. 7b mælir ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, til at allir tríggir vegirnir skulu bindast í landsvegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen og Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

At enda varð samtyktin í fíggjarnevndini einmælt samtykt.

- Umsitingin leggur fram frágreiðing frá Rambøll.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2008:** Grundað á niðurstøðuna í ferðsluanalysu hjá Rambøll & Nyvig A/S frá apríl 2008 (j. nr. 2001-0407/79), samtykti nevndin at heita á umsitingina at taka upp samráðingar við Vinnumálaráðið og Landsverk á hesum grundarlagi:

1. at mest loyvda ferð á innkomuvegnum, á strekkinum frá Stórutjørn (T2) til íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar (T8), verður 60 km/t,
2. at flest møguligar íbindingar á nevnda strekki verða gjørdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. apríl 2008:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við leiðlsuni og umboð frá teknisku nevnd havt samskifti við landsstýriskvinnuna í innlendismálum – Anniku Olsen. Eitt av málunum, ið partarnir eru samdir um at royna, er at fáa sett gongd á avtalu, ið fyribils loyvir kommununi at nýta partar av innkomuvegnum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Kunnað varð um málið, og nevndin ynskir at viðgera málið á næsta fundi tann 4. marts 2010.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Kunnað var um málið.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Á løgtingsfíggjarlógini eru settar av kr. 10 mió. til nýggja innkomuvegin til Tórshavn. Landsverk hevur í hesum sambandi verið á fundi við umsitingina, til tess at finna fram til eina semju um, hvussu arbeiðið kann halda fram, soleiðis at játtanin fyri 2013 verður nýtt. Landsverk er framvegis av tí áskoðan, at nýggi innkomuvegurin skal gerast út frá teimum fortreytum, at hámarksferðin skal verða 80 km/t. Hetta viðførir ymisk dýrkandi krøv til hvussu íbindingarnar skulu gerast uppá sikt, tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, sambært framskrivingum sum gjørdar eru.

Í hesum sambandi hevur serliga verið roynt at finna eina hóskiliga loysn á, hvussu Sundsvegurin kann knýtast í nýggja innkomuvegin, og hevur Landsverk tilevnað eitt uppskot, sum umsiting kommununar metir at verða ein nýtilig loysn, undir teimum umstøðum sum eru á staðnum.

Eisini hevur íbindingin í Oyggjarvegin verið til viðgerðar, og er lagt upp til eina loysn sum er nøktandi í nøkur ár fram. Tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, er neyðugt at taka hesa íbinding upp aftur til nýggja viðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fylgjandi:
- at loyva Landsverk at halda áfram við vegagerðini frá brúnni um Hoydalsá og vestureftir
- at taka undir við prinsippuppskotinum til íbindingarloysn við Sundsvegin
- at játtanin hjá Landsverk í ár verður brúkt til at gera íbindingina við Sundsvegin, og at restin av játtanini verður brúkt til at halda áfram við vegagerðini vestureftir, oman móti Krákugjógv
- at gera avtalu við Landsverk um, at framhald av arbeiðinum í 2014 og komandi ár, verður gjørt eystureftir, soleiðis at bundið verður í Kaldbaksvegin, áðrenn hildið verður áfram vestureftir. Hetta fyri at fáa vegasamband frá Kaldbaksvegnum til Sundsvegin liðugt fyrst.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur um málið, hevur verið fyri býráðslimum, har umsitingin greiddi frá gongdini í málinum. Eisini var greitt frá fundunum sum umsitingin hevur havt við Landsverk um teknisku viðurskiftini í samband við íbindingar.

Niðurstøðan á kunnandi fundinum varð, at mæla býráðnum til at takað undir við samtyktini í teknisku nevnd 16. apríl 2013, við hesum ískoytistreytum:

- at vegasambandi frá á leið við vatnbrunnarnar við Villingardalsvegin til Hotel Føroyar, verður loyst við tunnli, sum landið rindar og ger sum partur av landsvegnum

- at ein greið avtalað um útreiðslubýtið til íbindinga verður gjørt, har landsmyndugleikarnir átakað sær allan kostnað fyri íbindingarloysnirnar, sum er avleiddur av at Landsverk heldur fast við at talan skal verða um 80 km veg.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd 16. apríl 2013 og ískoytistreytunum sambært ískoytinum til fíggjarnevndarfundin.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin fer saman við umsitingini at kunna um støðuna viðv. Tunnilsvegagerðini og at komuvegnum til Havnar.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 17. mars 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til linjuføringina á atkomuvegnum frá landsvegnum á Hvítanesi, har tunnilsvegurin verður bundin í, til økið undir Krákugjógv og økið oman fyri Hotel Føroyar.
Valið skal verða millum linjuføringina, sum Landsverk og Tunnilsfelagið mæla til, tað er linjuføring fram við útstykkingini á Hjalla og norður móti uppruna atkomuvegnum hjá Landsverk og suður móti Klingruni ella linjuføring fram við útstykkingini Inni á Gøtu og Oman Gil.

Umsitingin kemur at greiða frá fyrimunum og vansum.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016: Nevndin heitti á umsitingina um at koma við einum tilmæli.**

**Ískoyti:**
Borgarstjórin hevur, saman við fyrisitingini, á fundi hin 07.10.2016 gjørt avtalu við Samferðslumálaráðið, treytað av góðkenning frá Tórshavnar býráð, um samlaða yvirskipaða loysn fyri vegaføring, ábyrgdar- og kostnaðarbýti fyri samlaðu vegagerðina í sambandi við innkomuvegin til Tórshavnar.

Avtalan er lýst í sakini 14/01358-182 og við plantekning í 14/01358-183.

Avtalan merkir í høvuðsheitum, at allur vegurin, frá íbinding í Kaldbaksfjarðarvegin norðan fyri Skarðshjalla til Villingadalsvegin, verður landsvegur við ferðmarkinum 80 km/t. Landið skal gjalda allan hendan vegin, og frákoyringar frá honum við Klingruna og Sundsvegin, hesar frákoyringar vera gjørdar sum útflættingar. Landið skal somuleiðis tryggja vegaatgongd til ovara part av Villingadalsvegnum.

Ein vegur verður frá rundkoyringini við Eysturoyartunnilin við Hvítanes til íbinding í rundkoyring á nýggja landsvegnum oman fyri ídnaðarøkið á Sandvíkarhjalla. Hesin vegur og íbindingar verður eisini landsvegur.

Frá Villingadalsvegnum til økið undir Kerjum (við Hotel Føroyar) er, tá ferðslutrýstið ger tað neyðugt, avtalað at gera ein tunnil sum er á leið 1,5 km til longdar. Hesin tunnil skal fíggjast av landinum og Tórshavnar kommunu í felag, helvt um helvt. Talan verður um landsveg, og raksturin verður hjá landinum. Ein sera leys meting av kostnaðinum fyri ein tílíkan tunnil er 100 til 130 mió. kr., har Tórshavnar kommuna tá fer at bera helmingin av kostnaðinum.

Kommununnar partur av vegagerðini í sambandi við fyriliggjandi avtalu um innkomuvegin til Tórshavn er, sera leysliga mett:
Vegur frá Klingruni til Sundsvegin, góðir 800 metrar á 20.000,- kr. pr. metur, kostar 16 mió. kr.

Leinging av Flatarvegnum, frá brúnni niðan til nýggja vegin góðir 120 metrar á 20.000 kr./m, kostar 2,4 mió., og liðugtgerð av 220 metrum á 10.000 kr./m niðan fyri brúnna kostar 2,2 mió. kr.
Leinging og umlegging av Sundsvegnum undir brúnna um Hoydalsá, tilsamans góðir 320 metrar á 20.000,- kr. metur, kostar 6,4 mió. kr. Hetta verður neyðugt at fremja óansæð hvør loysn verður framd.

Samlaði tørvurin á fígging er soleiðis góðar 27 mió. kr. Av hesum skulu tær 16 mió. til Sundsvegin gerast óansæð hvør loysnin verður vald. Verða tær 11 mió. kr. settar upp ímóti kostnaðinum av íbindingunum (3 stk.) og øktu møguleikunum fyri býarmenning norðan fyri landsvegin, talar hetta fyri at avtalan er til fyrimunar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við avtaluni, og samstundis gera neyðugu fyrireikingarnar til at útbyggja kommunala vegakervið í økinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016: Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge tekur undir við teknisku nevnd.**

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Nevndin viðger viðurskiftini viðv. innkomuvegnum í sambandi við mál j. nr. 19/01483.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019: Nevndin heitir á býráðið um at samtykkja at heita á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna '*Avtala um innkomuvegin til Tórshavn millum Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommunu*', sum varð undirskrivað 7. oktober 2016 og samstundis staðfesta, at eingin vegur skal koma ígjøgnum Krákugjógv, ei heldur á niðasta partin á Oyggjarvegnum og at tunnilin skal koma út oman fyri Hotel Føroyar.**

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019: Útsett.**

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini 18. juni 2019, ið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen: Borgarstjórin mælir til, at býráðið heitir á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna «Avtala um innkomuvegin til Tórshavn» millum Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommunu, sum varð undirskrivað 7. oktober 2016. Samstundis mælir borgarstjórin til at farast skal beinanvegin undir samráðingar við Samferðslumálaráðið um, hvar tunnilin skal koma upp.

Broytingaruppskotið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 24:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein | Jákup Dam |
| Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Bjørg Dam |
| | Odd Færø | |